# Møguleikar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið

Frágreiðing frá nevndini
at kanna gagnligastu
marknaðaratgongd til ES.
Latin Føroya Landsstýri 30.august 1995

Tórshavn 1995

Løgmaðurin

# Møguleikar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið

# Møguleikar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið

Frágreiðing frá nevndini at kanna
gagnligastu marknaðaratgongd til ES.
Latin Føroya Landsstýri 30.august 1995

*Jóan Pauli Joensen*
*Tommy Petersen*
*Arne Poulsen*
*Óli Samró*
*Jákup í Gerðinum*
*Eyðun Johannesen*

Tórshavn 1995

Møguleikar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið.
Frágreiðing frá nevndini at kanna gagnligastu
marknaðaratgongd til ES.
Latin Føroya Landsstýri 30.august 1995
Í nevndini sótu: Jóan Pauli Joensen, formaður, Tommy Petersen,
Arne Poulsen, Óli Samró, Jákup í Gerðinum og Eyðun Johannesen.
Skrivarar: Jóannes Madsen og Jens Helgi Toftum
© 1995, Nevndin og skrivararnir

Útgáva: Fróðskaparsetur Føroya fyri Føroya Landsstýri 1995
Prent: Estra
ISBN 99918-3-006-5

Í varðveitslu: Bókamiðsølan
Hoyvíksvegur 72
Postboks 202
110 Tórshavn
Tlf. 13756. Fax 19906.

# Innihald


Lesaraleiðbeining .......... 7

| | | |
|---|---|---|
| KAP.1 | **Arbeiði nevndarinnar** | 13 |
| KAP.2 | **Niðurstøður og tilmæli nevndarinnar** | 15 |
| | 2.1 Niðurstøður | 15 |
| | 2.2 Tilmæli | 19 |
| | 2.3 Viðmerkingar til tilmælið | 22 |
| KAP.3 | **Samandráttur av frágreiðing** | 24 |
| KAP.4 | **Avtaluhættir hjá Evropeiska Samveldinum** | 37 |
| | 4.1 Inngangur | 37 |
| | 4.2 Samstarvsøkini í ES | 37 |
| | 4.3 Landabólkar í ES-høpi | 38 |
| | 4.4 Avtaluleistar hjá ES | 39 |
| | 4.5 Samanbering av frælsunum í ymiskum avtaluhættum | 44 |
| | Skjal 4A: Yvirlit yvir OLT-lond | 45 |
| KAP.5 | **Stjórnarlig viðurskifti** | 47 |
| | 5.1 Samstarv millum lond | 47 |
| | 5.2 Um Evropeiska Samveldið | 48 |
| | 5.2.1 Sáttmálin um Evropeiska Samveldið | 48 |
| | 5.2.2 Stovnarnir í ES | 50 |
| | 5.2.3 Politiskur avgerðarrættur í ES | 53 |
| | 5.3 Avtaluformar og sjálvræði | 54 |
| | 5.3.1 Ríkisrættarliga støða Føroya | 56 |
| | 5.3.2 Sjálvræði og millumlandamál | 57 |
| | 5.3.3 Umboðan í ES | 58 |
| | 5.3.4 Samandráttur | 59 |
| | Skjal 5A: ES - søguligt yvirlit | 60 |
| | Skjal 5B: Um støðu Álands í ES | 63 |
| KAP. 6 | **Fiskivinna** | 67 |
| | 6 .1 Fiskivinnupolitikkurin í ES | 67 |
| | 6.1.1 Inngangur | 67 |
| | 6.1.2 Løgfrøðiliga støðið | 67 |
| | 6.1.3 Myndugleiki | 67 |
| | 6.1.4 ES-Dómstólurin og fiskivinnan | 68 |
| | 6.1.5 Fiskiveiðupolitikkurin | 68 |
| | 6.1.6 Marknaðarskipanin fyri fisk og fiskavørur | 80 |
| | 6.1.7 Bygnaðarpolitikkurin í fiskivinnuni | 85 |
| | 6.1.8 Fiskivinnupolitikkurin hjá ES: Samandráttur og útlit | 89 |
| | 6.2 Fiskivinnupolitikkurin hjá ES í Føroyum. Meting av avleiðingunum fyri føroyskan fiskivinnupolitikk og veiðurættindi, um Føroyar gerast partur av ES | 92 |
| | 6.2.1 Inngangur | 92 |
| | 6.2.2 Fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og ES higartil | 93 |
| | 6.2.3 Fiskiveiðupolitikkurin í ES og Føroyar | 94 |

6.3 Evropeiska Búskaparliga Samstarvið (EBS) og fiskivinna ............... 102
6.3.1 Inngangur ............... 102
6.3.2 Marknaðaratgongd ............... 102
6.3.3 Fiskiveiða og fiskirættindi ............... 104
6.3.4 Almennur studningur og kapping ............... 105
6.3.5 Atgongd til havnir ............... 106
5.3.6 Transitt ............... 107
6.3.7 Atgongd til og íløgur í fiskivinnuni ............... 107
6.3.8 Samandráttur ............... 109
6.4 Hvala- og fuglaveiða ............... 110

KAP. 7 **Landbúnaðarpolitikkur í ES** ............... 111
7.1 Inngangur ............... 111
7.2 Tættirnir í landbúnaðarpolitikkinum ............... 112
7.3 Føroyar og landbúnaðarpolitikkurin í ES ............... 114

KAP. 8 **Orku- og oljupolitikkur í ES** ............... 116
8.1 Inngangur ............... 116
8.2 Felags orkupolitikkurin hjá ES higartil ............... 116
8.3 Oljudirektivið ............... 117

KAP. 9 **Handil, ídnaður, tænastur, samskifti, heilsufrøðilig viðurskifti** ............... 119
9.1 Ídnaður, handil og tænastur ............... 119
9.2 Samskifti ............... 121
9.3 Heilsufrøðilig viðurskifti ............... 123

KAP. 10 **Búskaparpolitikkur í ES** ............... 125
10.1 Inngangur - søguligt baksýni ............... 125
10.2 Búskapar- og pengapolitiska samgongan ............... 125
10.3 Føroyar og búskapar- og pengapolitiska samgongan í ES ............... 129

KAP. 11 **Arbeiðsmarknaður** ............... 131
11.1 Inngangur ............... 131
11.2 Arbeiðsmegin í Rómarsáttmálanum ............... 132
11.3 Lógskipan um arbeiðsfrælsi ............... 132
11.4 Sosial trygd ............... 133
11.5 Støðan hjá føroyskum løntakarum ............... 133
11.6 Stovnseting og tænastuveitingar ............... 134
11.7 Niðurstøða ............... 134

KAP. 12 **Útbúgving og gransking** ............... 136
12.1 Danskar og føroyskar útbúgvingar ............... 136
12.2 Útbúgvingarsamstarvið í ES ............... 136
12.3 Gransking ............... 138
12.4 Niðurstøða ............... 142

Heimildir ............... 144

# Lesaraleiðbeining

**Assosieringsavtalur** eru avtalur, sum ES ger við lond, sum ynskja limaskap í ES, men sum ikki lúka treytirnar, ið ES setir fyri búskapi, demokratii, mannarættindum o.a.m. Endamálið við avtalunum er at stuðla londunum, soleiðis at tey sum frálíður kunnu gerast limir í ES.

**Atland** er land ella øki, sum er knýtt at einum størri landi við ávísum sjálvstýrisheimildum mótvegis høvuðslandinum (t.d Føroyar -Danmark og Áland-Finnland)

**Avgerð.** Í ES-høpi hava avgerðir sum oftast bert organisatoriskan karakter.

**AVS-lond** (*A*frika, *V*esturindia, *S*tillahavi) er heiti á 70 londum í Afrika sunnan fyri Sahara (undantikið Suður-Afrika), Vesturindia og Stillahavinum, sum Lomé-konvensjónin fevnir um (á enskum ACP, )

**Bretton Woods-skipanin:** Heiti á samstarvsskipan við føstum gjaldoyrakursum við støði í dollarunum. Stovnsett eftir seinna heimsbardaga, men skrædnaði fyrst í 1970-árunum.

**Búskapar- og pengapolitiska samgongan.** Ein týðandi partur av Maastricht-sáttmálanum er at skipa eina búskaparliga og pengapolitiska samgongu. Hetta ber í sær, at Innmarknaðurin verður settur á stovn í ES, at búskaparpolitikkurin í limalondunum verður samskipaður (serliga fíggjarpolitikkurin), at gjaldoyrakursirnir verða læstir fastir, at ríkin verður felags penga- og gjaldoyrapolitikkur, sum skal samskipast av einum felags evropeiskum meginbanka. (á donskum ØMU, Økonomisk og Monetær Union; á enskum EMU, Economic and Monetary Union).

**BTÚ**, bruttotjóðarúrtøka

**COREPER** (*Co*mité des *Re*presentants *Per*manents) heiti á føstu sendiharraumboðanini hjá limalondunum við ES-stovnar í Brússel.

**Direktiv** verða samtykt í ES-ráðnum. Í einum direktivi er fyrisett, at landið innan ávísa freist skal gera lógir ella reglur á einum ávísum málsøki. V.ø.o. eru direktiv bindandi, men tað er upp til tey einstøku limalondini at avgera, hvussu tey røkka endamálinum við direktivinum.

**EBS** er stytting fyri Evropeiska *B*úskapar *S*amstarvið. EBS-sáttmálin fevnir um EFTA og ES-londini. (á donskum/norskum EØS: Europæisk Økonomisk Samarbejdsområde; á enskum EEA: European Economic Area).

**ECB** *E*uropean *C*entral *B*ank, evropeiski meginbankin, sum ætlanin er at stovna í triðja stigi í búskapar- og pengapolitisku samgonguni.

**ECBS** *E*uropean *S*ystem of *C*entral *B*anks, skipan sum fevnir um ECB og meginbankarnar í limalondunum.

**ECU**, *E*uropean *C*urrency *U*nit (evropeiska gjaldoyraeindin), sum verður brúkt í ES-samstarvinum. ECU'urin er defineraður sum ein "gjørd valutaeind", samansett av eini fastari nøgd av gjaldoyranum hjá teimum einstøku ES-londunum. Nøgdirnar verða endurskoðaðar fimta hvørt ár, við støði í tí týdningi sum búskapurin í teimum einstøku limalondunum hevur í ES-høpi. Ein ECU er í dag umleið 7 danskar krónur.

EEC Ensk stytting fyri European Economic Community (á donskum EØF). Onnur nøvn: Felagsmarknaðurin.

EF Evropeisku Felagsskapirnir. Fevnir um tríggjar samstarvsfelagsskapir: Evropeiska Kol- og Stálfelagsskapin, EKSF (stovnaður 1952), Evropeiska Búskaparliga Felagskapin, EEC (stovnaður 1957) og Evropeiska kjarnorkufelagsskapin EURATOM (stovnaður í 1958).

EFTA European Free Trade Association (Evropeiska fríhandilsøkið), sum er ein búskaparligur samstarvsfelagsskapur stovnaður í november 1959 (Stockholm-avtalan). Limirnir vóru Bretland, Noreg, Svøríki, Danmark, Portugal, Sveis og Eysturríki. Finnland hevur havt eina assosieringsavtalu og hevur í praksis verið roknað sum limur. Seinni er Ísland komið uppí. Danmark (og Føroyar) og Bretland fóru úr EFTA í 1973, tá tey gjørdust limir í ES. Sama gjørdi Portugal í 1986, og Finnland, Svøríki og Eysturríki í 1994. EFTA er eitt fríhandilsøki, tvs. at allur tollur millum limalondini er avtikin, og at hvørt landið sær kann varðveita tann toll, tey høvdu mótvegis triðjalondum. EFTA-avtalan fevndi upprunaliga bert um fríhandil við ídnaðarvørum. Seinni er samstarvið eisini komið at fevna um m.a. fisk og fiskavørur. EFTA og ES undirskrivaðu í 1992 EBS-sáttmálan, sum gjørdi, at Innmarknaðurin í ES varð víðkaður til eisini at fevna um EFTA. Undantiknar eru tó landbúnaðar- og fiskavørur.

EIB European Investment Bank, evropeiski íløgubankin, sum varð settur á stovn av ES í 1958 við tí endamáli at veita veðhald og langfreistaði lán til ídnaðarmenning í lítið á leið komnum regiónum í ES-londunum. Lánikapitalurin verður lutvíst fingin til vega í limalondunum og lutvíst við virðisbrævalánum á altjóða kapitalmarknaðinum.

Eindarskjalið varð samtykt í 1986 og bar í sær broytingar í Rómarsáttmálanum, sum komu í gildi 1.juli 1987. Broytingarnar miðaðu m.a. ímóti at knýta ES og EPS nærri saman. Virkisøkið hjá EPS varð víðkað til eisini at fevna um trygdarpolitikk. Við at geva ES-tinginum størri heimildir varð roynt at koma "demokratiska undirskotinum" til lívs. Eindarskjalið gjørdi harumframt, at umhvørvis- og granskingarpolitikkur gjørdist partur av samstarvinum. Tann mest týðandi broytingin var tó, at samstarvið í størri mun skuldi byggja á meginregluna um kvalifiseraðan meiriluta. (á donskum Fællesakten ella EF-pakken)

EKSF Stytting fyri Evropeiski Kol- og Stálfelagsskapurin, stovnaður í 1952.

EMI. European Monetary Institute, Evropeiski pengapolitiski stovnurin, sum ES-londini stovnaðu 1.januar 1994 við tí endamáli at samskipa pengapolitikkin. Er at rokna sum fyrsta stigið í royndunum at skipa ein evropeiskan meginbanka.

EMS European Monetary System, samstarvið í ES um gjaldoyrapolitikkin. Varð stovnað í 1979 og loysti tað sonevnda slangusamstarvið av. Samstarvið skrædnaði í 1992-93.

EMU Economic and Monetary Union, enska heitið á Búskapar- og pengapolitisku samgonguni.

EPS Stytting fyri Evropeiska Politiska Samstarvið. Var frá byrjan (1970) eitt samstarv, ið var leyst av ES. Við Eindarskjalinum í 1986 gjørdist EPS formliga ein partur av ES-samstarvinum, men uttan at gerast ein partur av sjálvum ES.

ERM, European Rate Mechanism, skipanini í EMS, sum ásetti, hvussu nógv gjaldoyrakursirnir kundu svinga í mun til ein frammanundan ásettan kurs.

ES Stytting fyri Evropeiska Samveldið, sum varð sett á stovn við Maastricht-sáttmálanum. Í hesi frágreiðing hava vit valt at brúka styttingina ES um samstarvið, sum hevur verið síðan 1952. (á donskum og enskum *EU*).

**ES-dómstólurin** er settur saman av 13 dómarum úr limalondunum. Hann hevur ikki bert dømandi vald við støði í ES-lóggávuni (lógskipanir og direktivir), men hevur eisini lógartulkandi vald. Í teimum førum, har ES-lóggávan ikki hevur verið heilt greið, hevur dómstólurin við úrskurðum sínum í stóran mun verið lógarsmiður

**ES-nevndin** er ovasti umsitingarligi (útinnandi) stovnur í ES. Teir 20 limirnir í nevndini verða valdir av stjórnunum í limalondunum. Tey størstu londini velja tveir limir í part. Hini hava ein lim. Í arbeiði sínum eru limirnir í nevndini óheftir, við tað at teir ikki taka avgerðir vegna heimlandið, men vegna ES. Limirnar býta uppgávur og ábyrgdarøki sínámillum, men taka avgerðir og leggja fram uppskot í felag. Umsitingin hjá nevndini er sett saman av deildum við hvør sínum málsøki (á donskum Kommissionen).

**ES-ráðið** er lóggevandi vald í ES og er stovnur við umboðum fyri stjórnirnar í limalondunum. Ráðið er sett saman av ráðharrum úr limalondunum, alt eftir hvørji málsøki, tey mál, ið eru til viðgerðar, hoyra undir. Ráðið er evsta vald, tá nýggjar reglur skulu samtykkjast. Tað er tað limalandið, sum hevur formansskapin, sum leiðir arbeiðið í ráðnum. Formansskapurin skiftir millum limalondini í tveimum raðfylgjum, soleiðis at eitt limaland skiftivís hevur formanskapin fyrra og seinna hálvár. Tað landið, sum hevur formansskapin, røkir hesa uppgávu á øllum stigum í ráðnum: Í sjálvum ráðnum, í nevndini við føstum sendiharrum úr limalondunum (COREPER), í øllum arbeiðsbólkum undir ráðnum, umframt í uttanríkis- og trygdarpolitiska samstarvinum og samstarvinum í løgmálum.

**Evropa-avtala** er vanligt heiti á avtalum, ES hevur gjørt við londini í Eysturevropa, ið ynskja limaskap, men sum ikki lúka krøvini, sum ES setir til búskap, demokrati, mannarættindi osfr. Endamálið er at hjálpa eysturevropeisku londunum, so at tey kunnu gerast limir í ES. Dømi: Baltalond, Slovenia, Kekkia.

**Evropa-ráðið** er sett saman av stats- og stjórnarleiðarunum í limalondunum, umframt formanninum í ES-nevndini. Evropa-ráðið heldur fund tvær ferðir um árið. Eisini rópt toppfundirnir í ES.

**Evropatingið** (ES-tingið) er samansett av 625 umboðum, sum eru vald við beinleiðis vali í limalondunum. Tinglimirnir eru býttir millum limalondini í mun til fólkatalið. Tinglimirnir skipa seg í politiskar bólkar tvørtur um landamørk. Teir størstu bólkarnir eru sosialistar og kristiligir demokratar. Evropatingið skal takast við uppá ráð, tá formaðurin fyri ES-nevndini verður útnevndur, og skal síðani góðkenna samansetingina av allari ES-nevndini. Harumframt hevur ES-tingið útnevnt sítt egna umboð, sum skal taka ímóti og kanna klagur frá fólki ella fyritøkum í limalondunum, í samband við óreglusemi og vansketni hjá ES-stovnum. ES-tingið hevur eisini týðandi uppgávur í samband við at hava eftirlit við hinum stovnunum. ES-nevndini er álagt at geva Tinginum árligar frágreiðingar um virksemi sítt. Bæði nevndin og ráðið hava skyldu at møta í tinginum og svara spurningum frá tinglimum. ES-Tingið kann við 2/3 av atkvøðunum og einum meiriluta av limunum samtykkja misálitisváttan á ES-nevndina. Evropatingið skal góðkenna fíggjarætlanina hjá ES.

**Felagsmarknaðurin** (sí EEC)

**Fríhandilsøkið.** Samgonga av londum, sum hava tikið av allan innanhýsis toll og aðrar handilsforðingar, men kunnu varðveita tann toll, sum tey frammanundan høvdu mótvegis triðjalondum. Dømi: EFTA, NAFTA

Tey **fýra frælsini:** Vørur, tænastur, kapitalur og arbeiðsmegi hava frítt at fara í ES. Til tess at tryggja hetta er felags búskaparpolitikkurin grundaður á frían, t.e. minst møguliga alment stýrdan, kappingar- og marknaðarbúskap, prísstabilitet fyri at forða fyri prísbólgnan og øllum sløgum av tekniskum handilsforðingum og kappingaravlaging í samstarvinum millum limalondini.

GATT General Agreement on Tariffs and Trade. Sáttmáli undirskrivaður í 1947. Endamálið er at menna millumtjóða handil við at minka um handilsforðingar millum londini, sum eru partar í sáttmálanum. Í kjalarvørrinum av Uruguay-umfarinum varð nýggjur GATT-sáttmáli undirskrivaður og altjóða handilsfelagsskapurin WTO settur á stovn.

GTM, gransking og teknologisk menning.

ICES International Council for the Exploration of the Sea. Millumtjóða havrannsóknarráðið, stovnað í 1902 við tí endamáli at birta upp undir og samskipa havgranskingina og vera ráðgevi hjá limalondunum í fiskiveiðuspurningum.

**Innmarknaðurin** í ES varð formliga settur í gildi 1.januar 1993. Hetta merkir, at ES er ein fríur marknaður fyri vørur og tænastur, arbeiðsmegi, kapital og vinnurekandi, tvs., at ongar forðingar eru við landamørk. Hetta verður gjørt við direktivum, t.d. viðvíkjandi tekniskum standardum, reglum um almenn innkeyp, partafelagslóggávu, um kapitalmarknað o.a.

**Konvergenskrøvini.** Fyri at gerast fullur limur í Búskapar- og pengapolitisku samgonguni í ES skulu limalondini hava verið í gjøgnum ein konvergens, tvs. at tey skulu vera komin nærri hvørjum øðrum í búskaparpolitikkinum, eitt nú tá talan er um hall á almennum fíggjarlógum, almenna skuld, inflasjón og rentustøði.

**Kvalifiseraður meiriluti.** Vanliga mannagongdin í ES-ráðnum, tá avgerðir skulu takast. Tá avgerðir verða tiknar við kvalifiseraðum meiriluta, hava londini eitt ávíst atkvøðutal, sum er sett í mun til fólkatalið í landinum.

**Kvotuhoppan** er framferðarháttur, ið fiskimenn í ES hava nýtt fyri at skaffa sær fiskirættindi hjá øðrum ES-londum. Mannagongdin er í stuttum, at fiskimenn í einum ES-landi seta seg niður í øðrum ES-londum og fiska av kvotunum hjá viðkomandi landi. Hetta hevur antin verið gjørt við at stovnseta feløg í viðkomandi landi og at skráseta fiskifør í landinum ella við at keypa fiskifør, sum longu standa í skipaskrásetingini.

**Lomé-konvensjónirnar** eru avtalur millum ES og lond í Afrika,Vesturindia og Stillahavinum (AVS-londini). Fyrsta avtalan varð undirskrivað í 1975 og hevur verið endurnýggjað fleiri ferðir síðani. Umframt fríhandil fyri at kalla allar vørur úr AVS-londunum fevna avtalurnar eisini um samstarv og menningarhjálp. Sambært avtalunum veitir ES stuðul til eitt nú íløgur í ídnaðarmenning í londunum, eins og Lomé-londini hava møguleika at læna úr Evropeiska Íløgubankanum, EIB.

**Lógskipan** er viðtøka í ES-ráðnum, sum er algild og beinanvegin bindandi fyri øll limalondini. Lógskipanir seta úr gildi nasjónalar lógir og ásetingar, um innihaldið stríðir ímóti lógskipanini. Saman við direktivum eru lógskipanirnar lógarverkið í ES ( á donskum: forordning; á enskum: regulation).

**Maastricht-sáttmálin** er heitið á Sáttmálanum um Evropeiska Samstarvið (ES), sum kom í gildi 1.november 1993. Sáttmálin fevnir um Rómarsáttmálan við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar á fundinum í Maastricht í 1992. Onnur heiti eru Samveldis-sáttmálin ella ES-sáttmálin.

MLV. Stytting fyri *M*est *L*oyvdu *V*eiðu. (Á enskum TAC (Total Allowable Catch).

NAFO. *N*orth West *A*tlantic *F*isheries *O*rganization. Felagsskapur stovnaður sambært millumtjóða avtalu í 1978. Endamálið er at tryggja optimala gagnnýtslu og skynsama røkt av fiskatilfeinginum í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum. Kom ístaðin fyri ICNAF.

NAFTA, *N*orth *A*merican *F*ree *T*rade *A*rea. Fríhandilsøkið, sum fevnir um USA, Kanada og Meksiko. Stovnað í 1992.

NASCO *N*orth *A*tlantic *S*almon *C*onservation *O*rganization. Felagsskapur stovnaður sambært millumtjóða avtalu í 1982. Endamálið er at útvega vísindaligt tilfar, sum hevur týdning fyri laksastovnarnar í Norðuratlantshavinum umframt at tryggja skynsama røkt av stovnunum við millumtjóða samstarvi.

NEAFC, *N*orth *E*ast *A*tlantic *F*isheries *C*ommission. Stovnað í 1980 við tí endamáli at konsultera og geva upplýsingar um støðuna hjá fiskastovnunum í landnyrðings-partinum av Atlantshavinum og um stýringstiltøk, sum tryggja vernd og skynsama troytan av hesum stovnum. Endamálið er eisini at koma við tilmælum um stovns-verndartiltøk fyri stovnar, sum eru í altjóða sjógvi í konvensjónsøkinum.

OECD, *O*rganization for *E*conomic *C*ooperation and *D*evelopement, felagskapurin fyri búskaparligum samstarvi og menning.

**OLT-lond** (donsk stytting fyri *O*versøiske *L*and og *T*erritorier), eru atlond hjá ES-londum handan hav, tvs. at tey hava eitt konstitusjónelt tilknýti til ES-lond. OLT-lond verða í handilspolitiskum høpi roknað sum ES-lond og hava fría marknaðaratgongd til ES (fiskur kann tó gerast ein samráðingarspurningur). Somuleiðis hevur arbeiðsmegi frítt at fara millum OLT-lond og høvuðslandið í ES. Dømi: Grønland (Danmark), St.Pierre og Miquelon (Frakland).

PO, produsentorganisasjón (produsentfelag), eru ein partur av marknaðarskipanini fyri fisk og fiskavørur í ES. Taka sær av marknaðarrøkt í fyrstahondsumsetninginum. PO'ir verða stovnaðar av samtøkum av fiski- ella útróðrarmonnum, vinnufeløgum ella øðrum felagsskapum hjá reiðarum ella manning, sum fáast við veiðu ella sølu av fiski og fiskavørum.

**Relativur stabilitetur** er meginreglan í felags fiskivinnupolitikkinum um, at limalond-unum skal verða tryggjaður ein fastur prosentpartur av heildarkvotunum. Er í høvuðs-heitum grundaður á søgulig veiðutøl.

**Rómarsáttmálin** er sáttmálin sum samstarvsfelagsskapirnir Evropeisku Kol- og Stál-felagsskapurin, Evropeiska Búskaparliga Felagsskapurin (EEC) og evropeiski kjarn-orkufelagsskapurin (Euratom), undirskrivaðu í 1957. Sáttmálin varð broyttur í 1986 (Eindarskjalið) og í 1993 (Maastricht-sáttmálin), (sí EF, ES).

**Samtykt.** Viðtøka í ES-ráðnum, sum er bindandi í øllum smálutum fyri tey, ið hon er vend ímóti (stjórnir, felagsskapir, einstaklingar) (á donskum: beslutning; á enskum: decision).

SMV, smá og meðalstór virki.

**Stjórnarráðstevnan.** Ráðstevna, sum sambært Maastricht-sáttmálanum skal haldast í 1996. Endamálið er at endurskoða partar av sáttmálanum. Millum tey mál, sum ætlanin er at taka upp, eru limatalið í ES-nevndini, atkvøðuvektirnar í ES-ráðnum og leikluturin hjá Evropatinginum, tá avgerðir skulu takast.

**Subsidaritets-prinsippið**, sum eisini verður rópt nærleikaprinsippið, merkir í ES-høpi, at politiskar avgerðir skulu takast á lægst møguliga umsitingarliga stigi, og at avgerðarrætturin bert skal liggja hjá ES, um ES megnar at loysa uppgávurnar betur enn limalondini ella regiónir í limalondunum.

TAC, *T*otal *A*llowable *C*atch, mest loyvda veiða (MLV).

**Tilmæli** er ikki bindandi (á donskum henstilling).

**Tollsamgonga.** Samgonga millum tvey ella fleiri lond, sum taka av allan innanhýsis toll og samstundis seta felags toll mótvegis øllum londum uttan fyri tollsamgonguna (dømi ES).

WTO, *W*orld *T*rade *O*rganization. Altjóða handilsfelagsskapurin settur á stovn sum ein partur av nýggja GATT-sáttmálanum, sum varð undirskrivaður í 1994.

ØMU, (donsk stytting fyri *Ø*konomisk *M*onetær *U*nion, sí Búskapar- og pengapolitiska samgongan.

# KAP.1 Arbeiði nevndarinnar

Í samgonguskjalinum millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Verkamannafylkingina og Sjálvstýrisflokkin, sum varð undirskrivað í september 1994, verður í partinum um Millumlanda og altjóða samvinnu m.a. sagt, at *...møguleikarnir fyri gagnligastu marknaðaratgongd til ES verða kannaðir.*

Landsstýrið avgjørdi á fundi 9.februar 1995 at seta nevnd við hjálparfólki at kanna henda spurning. Í nevndina vórðu valdir: Jóan Pauli Joensen, formaður, Tommy Petersen, Arne Poulsen, Óli Samró, Jákup í Gerðinum og Eyðun Johannesen.

Skrivstova nevndarinnar var mannað við Jóannes Madsen, fulltrúa í landsstýrinum og Jens Helga Toftum, fiskivinnufrøðingi á Fróðskaparsetrinum.

Eftir ein kunnandi fund 15.februar 1995 við Edmund Joensen, løgmann, og landsstýrismenninar Jóannes Eidesgaard, Sámal P. í Grund, Óla Jacobsen, Ivan Johannesen, Andreas Petersen skilti nevndin arbeiðssetningin soleiðis, at kanningararbeiðið skuldi fevna um *øll viðurskifti ES-Føroyar, sum hava týdning fyri støðutakan politikaranna til framtíðarsamvinnu partanna millum.*

Nevndin hevur havt 15 arbeiðsfundir. Í sambandi við kanningararbeiðið hava einstakir nevndarlimir verið í Álandi, Danmark og Noreg.

Frágreiðingin er skipað soleiðis, at í kap.2 eru niðurstøður og tilmæli nevndarinnar. Kap.3 tekur saman um kap.4. til kap.11.

Kap.4 lýsir teir avtaluformar, sum ES hevur við onnur lond. Kap.5 viðger stjórnarlig viðurskifti. Her verður m.a. nomið við samstarv millum lond og spurningar viðvíkjandi støðu okkara sum partur í einum ríkisfelagsskapi, og hvørja ávirkan eitt nærri tilknýti til ES fær á sjálvstýrisheimildir okkara.

Kap.6 snýr seg um fiskivinnu. Felags fiskivinnupolitikkurin hjá ES verður lýstur. Nomið verður við spurningin um, hvørjar avleiðingar tað fær fyri fiskivinnupolitikk og veiðurættindi okkara, um Føroyar fara upp í ES. Fiskivinnuparturin í EBS-sáttmálanum, verður eisini

umrøddur. Komið verður eisini heilt stutt inn á hvala- og fuglaveiðu.

Í kap.7 verður hugt at meginreglunum í landbúnaðarpolitikkinum hjá ES, og mett verður um, hvørjar avleiðingar tað fær fyri føroyskan landbúnaðarpolitikk, um Føroyar fara upp í ES. Orku- og oljupolitikkur við serligum denti á oljuvinnu verður umrøddur í kap.8. Kap.9 lýsir og viðger karmarnar í ES-lóggávuni viðvíkjandi ídnað, handli, tænastuvinnu, samskifti og heilsufrøðiligum viðurskiftum.

Kap.10 snýr seg um búskaparpolitikk í ES, meðan kap.11 er um arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Í kap.12 verða fíggjarligu og politisku karmarnir um útbúgving og gransking í ES umrøddir.

Aftast í frágreiðingini er listi yvir heimildir.

Arbeiðið hjá nevndini gjørdist drúgvari enn væntað. Verkfall og onnur viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum hava seinkað nevndararbeiðinum nakað. Hetta gjørdi sítt til, at ikki bar til at halda tíðarætlanina.

Við hesum verður tilmæli og frágreiðing nevndarinnar latin úr hondum.

Nevndin heldur, at frágreiðingin hevur almennan áhuga og at hon kann nýtast sum undirvísingartilfar. Fróðskaparsetur Føroya fyri Føroya Landsstýri kemur tí at geva frágreiðingina út.

Tórshavn, 30.august 1995

*Jóan Pauli Joensen* — *Tommy Petersen*

*Arne Poulsen* — *Óli Samró*

*Jákup í Gerðinum* — *Eyðun Johannesen*

/ *Jóannes Madsen*, skrivari
/ *Jens Helgi Toftum*, skrivari

# KAP.2 Niðurstøður og tilmæli nevndarinnar

## 2.1 Niðurstøður

**Fortreytirnar broytast**

Fortreytirnar í samvinnu okkara við umheimin broytast støðugt. Stóru búskaparligu og handilspolitisku broytingarnar í londunum uttan um okkum seta føroyskum vinnulívi nýggjar og størri avbjóðingar.

Hendan gongdin er lutvíst eitt úrslit av, at samansjóðingin í ES er víðkað til at fevna um fleiri samfelagsøki og lond, og lutvíst ein avleiðing av rákinum í altjóða búskapi og handli tey seinnu árini.

Tey lond, ið ikki eru limir í ES, hava fingið serligar avtalur, sum knýta tey nærri at samansjóðingini í ES. Londini í Mið- og Eystur-Evropa hava gjørt samvinnuavtalur, sum bera í sær, at tey koma nærri ES búskaparliga og politiskt. Hesar avtalur eru í flestu førum eitt stig fram ímóti limaskapi. Við EBS-sáttmálanum hava grannalond okkara, Ísland og Noreg, fingið nærri samvinnu við ES á nógvum týðandi økjum.

**Føroyar eftirbátur**

Føroyar hava valt at vera uttan fyri meginrákið í evropeiska samstarvinum. Vit eru ikki við í ES, EFTA ella EBS. Viðurskifti Føroya við ES eru ístaðin skipað í eini handilsavtalu og eini fiskiveiðuavtalu. Fyri onnur øki eru ongar avtalur partanna millum. Ein avleiðing av hesum er, at vit eru vorðin eftirbátur í handilspolitisku samansjóðingini í Evropa.

**Galdandi avtala ótíðarhóskandi**

Longu í 1991 metti EF-arbeiðsbólkurin, sum landsstýrið hevði sett at gera álit um viðurskifti okkara við ES, at núverandi handilsavtala kom at vera ov trongur karmur um samskifti okkara við ES. Samráðingarnar millum partarnar um at menna samstarvið innan fyri karmarnar av avtaluni, hava gingið striltið, og hava víst, at møguleikarnir fyri gagnligari marknaðaratgongd í galdandi avtalu eru avmarkaðir, og helst fulltroyttir. Nevndin metir ikki, at tað ber til at bøta um avtaluna frá 1992 á ein hátt, sum í longdini nøktar tørvin hjá vinnulívinum.

Høvuðssetningurin hjá nevndini hevur verið at kanna møguleikarnar fyri *gagnligastu marknaðaratgongd til ES*. At ynskja sær gagnligastu marknaðaratgongd til ES, uttan at hetta ber í sær grund-

leggjandi broytingar í viðurskiftum okkara við ES, minnir ikki sørt um at ynskja meira undanvind á súkklubreytunum.

**Víðfevndari avtala neyðug**

Ein frí marknaðaratgongd, har ongar toll- ella tekniskar forðingar eru, er neyðug fyri kappingarføri okkara á ES-marknaðinum. Men neyðugt er at gera sær greitt, at skal gagnligasta marknaðaratgongd fáast, er neyðugt við øðrum samstarvsshátti, sum er víðfevndari enn galdandi handilsavtala. Hetta ber m.a. í sær, at fyri vunnin rættindi mugu vit átaka okkum skyldur.

Nevndin heldur, at kappingarføri hjá føroyskari útflutningvinnu ikki bert snýr seg um tollviðurskifti. Neyðugt er, at samvinna okkara við ES verður viðgjørd í eini heild. Hjá einum samfelag, har meginparturin av framleiðsluni verður útfluttur, er sera umráðandi, at samvinnan fevnir um annað enn marknaðarsømdir í keyparalondunum. Kappingarføri snýr seg eisini um, hvussu vit eru við í øðrum altjóða samstarvi, eitt nú um arbeiðsmarknað, tænastur, samskifti, heilsufrøðilig viðurskifti, gransking og útbúgving. Hetta hevur eisini alstóran týdning fyri teir karmar, vinnulívið virkar innanfyri.

Nevndin hevur kannað ymiskar samstarvsformar, sum geva gagnligari marknaðaratgongd. Serliga hevur verið hugt at teimum avtalum, sum onnur smá- og pinkulond hava við ES. Talan er bæði um sjálvstøðug lond og lond, sum eru knýtt at einum limalandi við ávísum sjálvstýrisheimildum. Hesi lond hava vanliga fingið serskipanir ella undantøk í limaskapinum hjá høvuðslandinum.

Nevndin heldur tó ikki, at nøkur av hesum avtalum óbroytt kann brúkast sum leistur í samvinnu okkara við ES. Til tess eru búskaparligu og ríkisrættarligu fyritreytirnar ov ymiskar.

Í talvu 2.1 og 2.2 er eitt yvirlit yvir teir avtaluleistir, sum nevndin heldur kunnu koma uppá tal í samvinnu okkara við ES. Fyrimunir og vansar eru lýstir og viðmerkingar gjørdar.

*Talva 2.1: Serskipanir*

| *Avtaluleistur* | *Fyrimunir* | *Vansar* | *Ávirkan á sjálvstýrisheimildir okkara* | *Viðmerkingar* |
|---|---|---|---|---|
| EBS-avtala | * Greiður karmur um samstarv á nógvum týðandi økjum (arbeiðsmarknaður, gransking, útbúgving o.s.fr.).<br>* Lættir um marknaðaratgongdina fyri fisk og fiskaúrdrátt, m.a. tí at tekniskir standardir verða harmoniseraðir.<br>* Fiskivinnan fær undantak frá meginreglunum um, at kapitalur hevur frítt at fara og frælsi at seta virki á stovn. | * Neyvan betri tollsømdir fyri fisk og fiskavørur enn í galdandi handilsavtalu<br>* Loysir ikki trupulleikarnar við triðjalandsfiski.<br>* ES krevur helst veiðurættindi aftur fyri betri marknaðarsømdir. | * Neyvan ávirkan av týdningi. Tó møguleiki fyri, at vit mugu lata felagsstovnum heimildir og lata Danmark umboða okkum á summum økjum. | * EBS er bert fyri sjálvstøðug lond.<br>* Ein fyritreyt fyri at luttaka í EBS er EFTA-limaskapur. Torført at ímynda sær, at Danmark sum ES-land gerst limur í EFTA vegna Føroyar.<br>* EFTA/ES-samstarvið hevur nógvar felagsstovnar. Ivasamt um Danmark kann sita báðumegin borðið.<br>* Hetta ber tó til ríkis- og fólkarættarliga |
| Tollsamgonga | * Frí marknaðaratgongd.<br>* Loysir trupulleikarnar við triðjalandsfiski.<br>* Vørustandardir verða harmoniseraðir. | * Missa møguleikan fyri at keypa vørur fyri heimsmarknaðarprísir. Hetta kann føra við sær dýrari landbúnaðarvørur. | * Missa handilspolitiska sjálvræðið.<br>* Skerjir møguleikarnar fyri at reka egnan búskaparpolitikk. | * Einki triðjaland hevur fingið tollsamgongu-avtalu um fisk og fiskavørur (EBS og Turkaland).<br>* Torført bert at biðja um betri sømdir uttan at lata nakað afturfyri. |
| OLT-skipan | * Marknaðaratgongd.<br>* ES letur meira til OLT-lond, enn tað fær | * ES krevur helst veiðurættindi fyri marknaðaratgongd | * Neyvan ávirkan av týdningi. | * Helst torført at fáa ES at broyta og víðka OLT-skipanina.<br>* Helst torført hjá Føroyum at fáa OLT-støðu, m.a. tí at búskaparligu fortreytirnar eru nógv øðrvísi enn hjá verandi OLT-londum, og tí vit ikki eru handan hav.<br>* Ivasamt um vit vilja verða sett í bás sum OLT-land - t.e. eitt tilafturskomið land. |

*Talva 2.2: Limaskapsloysnir*

| *Avtaluleistur* | *Fyrimunir* | *Vansar* | *Ávirkan á sjálvstýrisheimildir okkara* | *Viðmerkingar* |
|---|---|---|---|---|
| Sjálvstøðugur limaskapur | * Fáa øll rættindi, íroknað fría marknaðaratgongd.<br>* Kunnu vænta at fáa støðu sum øki, ið ES letur styrk til vegna fjarstøðu, eintáttaðan vinnubygnað, vánaligan búskap. | * Mugu góðtaka tað lógarverk, sum verandi limalond hava samtykt.<br>* Átaka okkum allar skyldur.<br>* Fáa helst ikki fría marknaðaratgongd fyri øll vørusløg í eini tillagingartíð. | * Krevur, at Føroyar gerast fullveldi.<br>* Føroyar mugu lata heimildir til ES. | * Føroyar mugu fara uppí ES sum sjálvstøðugt land.<br>* Sera órealistiskt, m.a. tí ivasamt er, um ES hevur áhuga í, at eitt so lítið land sum Føroyar fær sjálvstøðugan limaskap.<br>* Hugsandi er, at ES fer at krevja betri veiðurættindi við Føroyar. |
| Limaskapur við undantøkum | * Fáa øll rættindi, íroknað fría marknaðaratgongd.<br>* Fáa undantøk fyri summi týðandi samfelagsøki.<br>* Kunnu vænta at fáa støðu sum øki, ið ES letur styrk til vegna fjarstøðu, eintáttaðan vinnubygnað, vánaligan búskap. | * Mugu í útgangsstøðu góðtaka tað lógarverk, sum verandi limalond hava samtykt.<br>* Helst torførar samráðingar um at fáa undantøk í fiskivinnuni.<br>* Fáa helst ikki fría marknaðaratgongd fyri øll vørusløg í eini tillagingartíð. | * Krevur, at ávísar heimildir verða latnar ES (og Danmark) | * Hendan loysnin ber í sær, at vit fara til samráðingar við serligum ynskjum um undantøk. Limaskapur er treytaður av nøktandi samráðingarúrsliti.<br>* Áland fekk (varandi) undantøk fyri týðandi samfelagsøki og vinnugreinar.<br>* Kanariuoyggjar fingu fyribils undantøk frá felags fiskivinnu- og landbúnaðarpolitikkinum.<br>* Hugsandi er, at ES fer at krevja betri veiðurættindi við Føroyar. |
| Innliman sum atland hjá Danmark | * Fáa øll rættindi, íroknað fría marknaðaratgongd.<br>* Modellið er klárt, tvs. vit boða ES frá, at vit vilja sleppa uppí. Verður í høvuðsheitum eitt avgreiðslumál í ES (sambært Rómarsáttmálanum, grein 227, 5d og 5a).<br>* Kunnu vænta at fáa støðu sum øki, ið ES letur styrk til vegna fjarstøðu, eintáttaðan vinnubygnað, vánaligan búskap. | * Mugu í útgangsstøðu góðtaka tað lógarverk, sum verandi limalond hava samtykt.<br>* Fáa helst ikki fría marknaðaratgongd fyri øll vørusløg í eini tillagingartíð. | * Krevur, at nógvar heimildir verða latnar ES (og Danmark) | * Hendan loysnin merkir, at Føroyar boða frá, at vit ynskja at gerast limur sum partur av danska ríkinum og góðtaka galdandi lógarverk í ES.<br>* Samráðingarspurningur millum Føroyar og Danmark um serskipanir, umsiting og hvussu vit vera umboðaði í ES-stovnunum.<br>* Hugsandi er, at ES fer at krevja betri veiðurættindi við Føroyar |

## 2.2 Tilmæli

Skal gagnligari marknaðaratgongd tryggjast á ein hátt, sum í longdini tænir útflutningsvinnuni og føroyskum áhugamálum annars, mælir nevndin til, at útgangsstøðið í samráðingum við ES verður annar av hesum møguleikum:

1. Serskipan
2. Limaskapur við undantøkum

### *ad 1: Serskipan*

Ein serskipan ber í sær, at vit í samvinnu okkara við ES miða eftir at fáa ein avtaluform, sum er víðfevndari enn galdandi handilsavtala, og at vit fyri vunnin rættindi eru sinnað at átaka okkum skyldur.

**Tollsamgonga og EBS sett saman**

Við serskipan hugsar nevndin sær, at stevnumiðið er ein samráðingarloysn, har partar av EBS-leistinum og tollsamgonga eru settir saman. Í stuttum merkir hetta, at vit øðrumegin fáa fyrimunirnar av tí víða samstarvinum í EBS og hinumegin fáa marknaðaratgongd frá tollsamgongu.

Nevndin heldur, at EBS-leisturin í síni heild gevur okkum fyrimunir. EBS-avtalan fevnir um samvinnu á nógvum týðandi økjum: Arbeiðsmarknaður, heilsufrøðilig viðurskifti, útbúgving og gransking, samskifti o.a.m. Slík samvinna hevur alstóran týdning fyri menningarmøguleikar og kappingarføri okkara.

Men viðvíkjandi fiski og fiskavørum gevur EBS-avtalan einsamøll á leið somu marknaðarsømdir í ES sum galdandi handilsavtala. Tí mælir nevndin til tollsamgongu fyri fisk og fiskavørur. Ein tollsamgonga gevur í útgangsstøðu føroyskum virkjum somu marknaðartreytir viðvíkjandi fiski, sum virkjum í ES. Samstundis loysir ein tollsamgonga trupulleikarnar við triðjalandsfiski á ES-marknaðinum.

**Fólkarættarlig avtala**

Ein serskipan verður vanliga roknað sum ein fólkarættarlig avtala. Tvs., at ásetingarnar í avtaluni bert binda *londini.* Borgarar og fyritøkur fáa ikki rættindi og skyldur, fyrrenn myndugleikarnir hava staðfest tað í landsins lóggávu.

Nevndin heldur, at ein samanseting av EBS-avtalu og tollsamgongu er tann loysnin, sum á nøktandi hátt tænir útflutningsvinnuni og føroyskum áhugamálum annars. Men nevndin ásannar samstundis,

at helst verður torført at koma á mál við einum slíkum ynski. Ivasamt er, um ES er sinnað at gera slíka avtalu.

### *Ad 2. Limaskapur við undantøkum*

Limaskapur við undantøkum er tann loysnin, ið gevur gagnligastu marknaðaratgongd. Samstundis tryggjar ein slík loysn okkum fyrimunir á øðrum økjum. M.a. tá talan er um arbeiðsmarknað, tænastur, samskifti, heilsufrøðilig viðurskifti, gransking og útbúgving.

**Yvirnasjónalt samstarv**

Samanborið við serskipanir, sum vanliga verða flokkaðar sum fólkarættarligar avtalur, er samstarvið í ES yvirnasjónalt. Hetta ber m.a. í sær, at ein millumtjóða avtala ella stovnur *beinleiðis* kann áleggja borgarum og fyritøkum í einum landi skyldur, uttan at tjóðartingið í viðkomandi landi fyrst skal samtykkja tað.

Uttan mun til, hvussu vit velja at fara upp í ES, mugu vit í útgangsstøðu góðtaka tað lógarverk og tær meginreglur, sum verandi limalond hava samtykt.

Velja Føroyar at fara upp í ES, mælir nevndin til, at hetta verður gjørt soleiðis, at Føroyar gerast *limur við undantøkum*. Tað vil siga ein samvinna við ES á leið eftir sama leisti, sum Áland fekk sum partur av finska ríkinum.

**Samráðingar-spurningar**

Ein skipan, har Føroyar fáa limaskap við undantøkum, ber í sær, at samráðingarnar í høvuðsheitum koma at snúgva seg um at fáa undantøk frá ES-lóggávuni á ávísum økjum.

Á vinnupolitiska økinum mælir nevndin til, at stórur dentur verður lagdur á at fáa undantøk innan fiskivinnu, oljuvinnu, landbúnað og hvalaveiðu.

**Fiskivinna**

Í fiskivinnumálum heldur nevndin, at samráðingarnar eiga at miða eftir loysnum, sum bera í sær,

- at søgulig veiðutøl og búskaparligi týdningurin av fiskivinnuni koma at viga tyngst, tá rættindi og skyldur skulu býtast,

- at tað veiðumynstur, sum hevur verið innanfyri karmarnar av galdandi fiskiveiðuavtalu millum Føroyar og ES, heldur fram

- at føroysk áhugamál í teimum veiðuavtalum, sum vit hava við lond uttanfyri ES (serliga Ísland og Russland), verða tryggjað,

- at forðað verður fyri kvotuhoppan, soleiðis at tær kvotur, vit fáa sambært meginregluni um relativan stabilitet, veruliga koma føroyskum fiski- og útróðrarmonnum til góða,

- at Føroyaleiðin verður skipað sum ein serligur kassi við á leið somu reglum og grundgevingum sum Hetlandskassin og Írski kassin. Hetta hevði m.a. ført við sær, at ein serlig veiðuloyvis-skipan hevði verið fyri leiðirnar við Føroyar,

- at meginreglan í felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES um 12 fj. strandaleiðir verður varðveitt,

- at fiskivinnan verður undantikin meginreglunum um frítt at seta á stovn virki og at kapitalur hevur frítt at fara. Endamálið er, at vit hava møguleika at seta krøv um, at bert persónar, sum hava havt fastan bústað í Føroyum eitt ávíst áramál, skulu hava loyvi at fara undir veiðu og tilvirking.

Somuleiðis heldur nevndin, at í samráðingunum eigur stórur dentur at leggjast á, at í áseting av MLV fyri fiskastovnarnar við Føroyar ikki bert verður grundað á tilmæli fiskifrøðinga, men at vinnan við sínum royndum og kunnleika verður tikin við uppá ráð á sama støði sum fiskifrøðingar og fær javnbjóðis medábyrgd í umsitingini av fiskatilfeinginum.

Við serligu búskaparligu støðu Føroya í huga heldur nevndin eisini, at útgangsstøðið hjá landsstýrinum í samráðingunum um veiðurætt-indi og kvotur eigur at verða, at vit avgjørt ikki lata ES-fiskiførum størri veiðurættindi enn søgulig veiðutøl geva grundarlag fyri.

**Oljuvinna**

Viðvíkjandi oljuvinnu mælir nevndin til, at Føroyar í eini tillagingar-tíð fáa undantak frá ásetingunum í oljudirektivinum. Hetta ber m.a. í sær, at loyvt verður at seta sum treyt í sambandi við møguliga tilluting av oljukonsessjónum, at føroyskar vørur og tænastur kunnu fáa framíhjárætt. Nevndin heldur, at hetta í ávísum førum er neyðugt fyri, at føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at vera við í eini møguligari oljuvinnu og tí virksemi, ið har av stendst.

**Landbúnaður**

Av tí at fyritreytirnar fyri landbúnaði eru øðrvísi í Føroyum enn í ES, heldur nevndin, at tað er umráðandi, at Føroyar í størst møguligan mun fáa undantøk frá landbúnaðarpolitikkinum hjá ES. Hetta kann verða gjørt eftir fjalladirektivinum hjá ES, har landbúnaðurin í bratt-lendi fær serligar sømdir, ella eftir sama leisti, sum tann serskipan

norðmenn, sviar og finnar fingu. Tann skipanin bar í sær, at londini framhaldandi kundu veita serligan stuðul til landbúnaðin. Hesar serskipanir eru tó undir ES-eftirliti, og eingin fígging fæst frá ES.

**Hvalaveiða og grindadráp**

Í sambandi við samráðingar um limaskap við undantøkum er greitt, at eitt av teimum torføru samráðingarmálunum verður hvalaveiða og grindadráp. Nevndin mælir til, at støða landsstýrisins í samráðingum verður, at umsiting og gagnnýtsla av hvali eigur at byggja á vísindaligt grundarlag. Grundreglan eigur at vera, at náttúrutilfeingið skal troytast á burðardyggan og skilagóðan hátt.

## 2.3 Viðmerkingar til tilmælið

Tað finnast ongar lættar loysnir, sum tryggja okkum gagnligastu marknaðaratgongd til ES og samstundis ganga ynskjum og áhugamálum føroyinga á møti í øllum lutum. Neyðugt er at gera sær greitt, at uttan mun til, um politiska samráðingarkósin verður *serskipan* ella *limaskapur við undantøkum*, so verður talan um truplar samráðingar. Hetta kemst m.a. av,

- at ríkisrættarliga støða okkara sum sjálvstýrandi partur í danska ríkinum ger, at samráðingarnar lutvíst koma at snúgva seg um viðurskiftini millum Føroyar/Danmark øðrumegin og ES hinumegin og lutvíst um viðurskiftini millum Danmark og Føroyar,

- at ein av fyritreytunum fyri, at tær loysnir, ið nevndin mælir til, skulu vinna frama, er, at Danmark sum limur í ES, vegna ríkisfelagsskapin nýtir alla orku at ávirka ES at ganga serligu ynskjum okkara á møti,

- at Føroyar hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Í ES høpi er fiskivinna politiskt ein sera viðkvom vinnugrein. Fiskivinnupolitiskar samráðingar eru truplar, m.a. tí at andsagnirnar millum ES-londini á hesum málsøki eru stórar. Tað er trupult hjá ES at fáa innanhýsis kabalina at ganga upp. Tí er mangan torført hjá nýggjum londum at fáa varandi undantøk frá meginreglunum í felags fiskivinnupolitikkinum,

- at ES hevur ongantíð gjørt tollsamgongu við triðjalond um fisk og fiskavørur,

* at fyri gagnligari marknaðarsømdir mugu vit helst lata ES rættindi - eitt nú veiðurættindi,

* at limaskapsloysnin hjá Álandi var

  - ein partur av finska samráðingarúrslitinum, sum aftur var ein liður í at fáa tey fýra EFTA-londini inn í ES. ES var sera áhugað í at fáa hesi lond sum limir. Útgangsstøðið hjá okkum er øðrvísi. Danmark er innanfyri ES, og vit valdu í 1974 at vera uttanfyri og verða tí í flestu viðurskiftum roknað sum vanligt triðjaland.

  - ein skipan, har undantøkini og serskipanirnar í høvuðsheitum vóru galdandi fyri vinnugreinir, sum hava stóran týdning fyri álendska búskapin, men sum ikki hótta nakra vinnu í ES stórvegis. Við fiskivinnu sum høvuðsvinnu eru líkindini fyri at fáa undantøk og serskipanir ikki líka góð sum hjá Álandi.

Hóast nevndin hevur tvey ymisk tilmæli, so heldur nevndin, at betri útlit eru fyri at røkka málinum um gagnligari marknaðaratgongd, um útgangstøðið í samráðingunum við ES verður, at Føroyar fáa limaskap við undantøkum. Hetta kemst av, at ein skipan, har EBS og tollsamgonga eru sett saman, er trupul at samráða seg fram til. Talan er ikki um fasta skipan, har onnur lond hava slóðað fyri, men um eina heilt nýggja serskipan. Harafturat er ivasamt, um ES yvirhøvur er sinnað at gera eina slíka serskipan fyri okkum.

# KAP.3 Samandráttur av frágreiðing

## Avtaluhættir hjá Evropeiska Samveldinum

ES hevur ymiskar tilknýtis- og avtaluformar við triðjalond, herundir smá- og pinkulond. Talan er bæði um sjálvstøðug lond og um lond, sum eru partar av einum størri limalandi. Nógv av hesum londum hava fingið serskipanir og undantøk í ES-limaskapinum hjá høvuðslandinum.

**Limaskapur**

Tá eitt sjálvstøðugt land gerst limur í ES, er útgangsstøðið, at landið má góðtaka tað lógarverk og skipanir, sum verandi ES-lond hava samtykt. Vanligt er tó, at nýggj lond fáa serligar skipanir í eini tilagingartíð. Somuleiðis er vanligt, at atlond hjá einum limalandi fáa undantøk ella serskipanir. Hetta er m.a. galdandi fyri Kanariuoyggjar, Madeira og Áland.

**Tollsamgonga**

Ein tollsamgonga ber í sær, at londini avtaka allar toll- og handilsforðingar og seta felags tollgjøld mótvegis triðjalondum.

Lond, sum onkursvegna eru knýtt at einum limalandi í ES, hava ofta tollsamgongu við ES. Talan kann vera um lond, sum geografiskt liggja inni í einum øðrum landi (t.d. Andorra, Monako, San Marino) ella lond, sum søguliga, ríkisrættarliga og handilsliga eru knýtt at einum størri landi (t.d. Ermarsundsoyggjar, Isle of Man, Áland).

Hesi atlond eru sera ymisk og tí ring at flokka. Vanliga mannagongdin hevur tí verið, at tá ES ger avtalu um tollsamgongu við hesi lond, er avtalan lagað til serligu viðurskiftini millum høvuðslandið og atlandið.

Í flestu førum er eingin trupulleiki hjá ES at lata fría marknaðaratgongd, tí vinnurnar í hesum londum hótta onga vinnu í ES.

Vert er at nevna, at í nýggjari tíð hevur einki triðjaland fingið tollsamgonguavtalu við ES um fisk og fiskavørur.

**EBS-samstarv**

EBS er samstarvið millum ES- og EFTA-londini. Avtalan fevnir ikki um landbúnaðarvørur og fisk. Heldur ikki um harmonisering av avgjøldum og avtøku av eftirlitinum við landamørk. EBS er ikki ein tollsamgonga og hevur tí ikki felags handilspolitikk. Sambært avtaluni hevur kapitalur og arbeiðsmegi frítt at fara millum luttakandi londini.

EBS er helst tann tættasti samstarvsformurin, sjálvstøðug lond kunnu fáa uttan at gerast limir í ES.

**Assosierings-avtala** ES hevur serskipanir við lond, ið ynskja limaskap, men sum ikki lúka treytirnar, sum ES setur fyri búskapi, fólkastýri, mannarættindum. Endamálið er at hjálpa londunum at gerast limir í ES. Dømi um slík lond eru Turkaland, Malta og Kypros. Londini fáa betri marknaðarsømdir á ES-marknaðinum, umframt at tey mugu laga sítt lógarverk til ES-lógir.

**Evropa-avtala** Evropa-avtala er heiti í avtalum sum ES vanliga ger við londini í Mið- og Eysturevropa, ið ynskja limaskap, men sum ikki lúka treytirnar, sum ES setur. Endamálið er at hjálpa londunum at gerast limir í ES. Dømi um slík lond eru Baltalond, Slovenia, Kekkia.

ES letur hesum londum fíggjarligan stuðul til samferðslu, telesamskifti, fíggingarvirksemi o.a.

**3.landsavtalur** Fyrr var grundreglan í teimum avtalum, sum ES gjørdi við triðjalond, *javnvág*, tvs., at tað, sum ES letur í rættindum, skal svara til tað, ES fær. Harafturat eru lutfalsliga fáar ásetingar um kappingarreglur, almennan studning o.a. Hesar avtalur verða vanliga róptar *1.ættarliðsavtalur*. Handilsavtalan og fiskiveiðuavtalan millum Føroyar og ES eru dømi um slíkar avtalur.

Í 1990-árunum hevur ES gjørt avtalur við triðjalond eftir einum øðrum leisti enn frammanundan - tær sonevndu *2.ættarliðsavtalurnar*. Hesar avtalur fevna um annað enn bert marknaðaratgongd. Eitt nú joint-ventures og samstarv innan gransking og útbúgving, umframt nærri reglur um kapping, almennan stuðul v.m. Heldur ikki er longur so avgerandi, at tær javnviga búskaparliga. Tað hevur størri týdning, at tær javnviga politiskt, tað vil t.d. siga, at limalond í ES fáa rættindi, sum tey meta høgt politiskt. Eitt nú veiðurættindi frá triðjalondum.

**Aðrir avtaluformar** ES hevur eisini serligar avtalur við atlond, har ES letur munandi meira, enn tað fær.

**OLT** Summi atlond hjá ES-londum handan hav hava status sum *OLT-lond*. Hendan skipan gevur teimum í høvuðsheitum fría marknaðaratgongd í ES, og at arbeiðsmegin hevur frítt at fara millum viðkomandi OLT-land og høvuðslandið. OLT-lond eru ikki partur av Evropa og verða vanliga roknað sum búskaparliga tilafturskomin.

**Grønland**

Tá Grønland fór úr ES í 1985, fekk landið OLT-støðu. Sambært teirri avtalu, sum varð undirskrivað um ES-fiskiskap í grønlendskum sjógvi, fær Grønland fíggjarligt gjald frá ES fyri veiðurættindi. Skipanin, sum Grønland hevur við ES, gevur Grønlandi betri sømdir fyri fisk á ES-marknaðinum enn hini OLT-londini. Allar fiskavørur av grønlendskum uppruna hava tollfrælsi í ES. Sambært handilsavtaluni er hetta frælsi tó treytað av, at fiskifør úr ES fáa *tilfredsstillende adgang til grønlandske farvande.*

**AVS**

Ein annar bólkur av londum, sum ES hevur serligar avtalur við, eru fyrrverandi hjálondini í Afrika, Vesturindia og Stillahavinum - *AVS-londini,* sum *Lomé-konvensjónirnar* fevna um. Hesi verða yvirhøvur roknaði sum búskaparliga tilafturskomin. Avtalurnar fevna um tollfrælsi og teknisk og fíggjarligt samstarv, og at ES veitir AVS-londunum stuðul.

## Stjórnarlig viðurskifti

Spurningurin um viðurskifti okkara við ES snýr seg ikki bert um at velja ella samráða seg fram til avtaluformar, sum tryggja føroyskum útflutningi gagnligastu sømdir á ES-marknaðinum. Velja vit avtaluformar, sum eru víðgongdari enn galdandi handilsavtala, er greitt, at spurningar um ríkisrættarligu støðu og sjálvstýrisheimildir okkara stinga seg upp.

Allir samstarvsformar, sum knýta okkum nærri at ES enn galdandi handilsavtala, føra við sær, at vit mugu lata sjálvsavgerðarrætt á ávísum samfelagsøkjum. Hetta kemst lutvíst av, at í summum førum liggur avgerðarrætturin hjá felagsstovnum (t.d. ES ella EBS), og lutvíst tí at bindandi millumtjóða handilssamvinna skerjir møguleikarnar hjá luttakaralondunum at reka sín egna óhefta politikk í vinnu-, fíggjar- og skattamálum.

Velja vit at fara upp í ES, ger ríkisrættarliga støða okkara, at tvinnir møguleikar eru í at velja. *Annar* er at boða ríkisstjórnini frá, at vit ynskja at koma uppí. Ríkisstjórnin fer síðani saman við Føroyum at samráðast við ES um hetta. Hvussu Føroyar verða umboðaðar í ES, er ein spurningur millum Føroyar og Danmark.

*Hin* er at loysa frá Danmark og søkja um limaskap sum sjálvstøðug tjóð við øllum skyldum og rættindum, eisini umboðan í ES-skipanini. Tó er sera ivasamt, um ES er áhugað í at fáa eitt lítið land sum Føroyar sum lim.

## Fiskivinnupolitikkurin hjá ES

ES-londini hava felags fiskivinnupolitikk. Hetta merkir, at londini hava latið felags stovnum í ES avgerðarrættin í nógvum týðandi fiskivinnumálum.

Høvuðstættirnir í fiskivinnupolitikkinum hjá ES eru:

*Fiskiveiðupolitikkurin* setur karmarnar fyri stovnsrøkt og veiðustýring í ES-havinum. Heildarkvotur verða ásettar fyri flestu fiskasløg. Heildarkvoturnar verða býttar út til limalondini eftir einum føstum býtislykli, sum tryggjar hvørjum landi sín fasta prosentpart. Limalondini avgera sjálvi, hvussu tey býta sína kvotu víðari til egnar fiski- og útróðarmenn. Harafturat nýta ES-londini tekniskar reguleringar og veiðuloyvisskipanir.

*Marknaðarpolitikkurin* er ein skipan við innanhýsis fríhandli við fiski og fiskavørum og felags tolli mótvegis triðjalondum. Til tess at forða fyri, at fríhandilin fær óhepnar avleiðingar og fyri at tryggja inntøkur fiski- og útróðrarmanna, er ein minstaprísskipan sett í verk. Ein onnur grundregla í marknaðarskipanini er eisini at verja fiskivinnuna í ES móti innflutningi av bíligum fiski.

*Bygnaðarpolitikkurin* í fiskivinnuni hevur til endamáls at tryggja skynsama menning av fiskivinnuni og at tryggja kor fiski- og útróðrarmanna. Hetta verður m.a. gjørt við at bøta um produktivitetin við atgerðum, sum birta upp undir bygnaðarbroytingar í veiðuflotunum og øðrum framleiðslutólum, at finna nýggjar fiskileiðir, at menna og tillaga veiðu, tilvirking og sølu til krøvini í marknaðinum.

**Miseydnaður fiskivinnupolitikkur**

Tey stýringsamboð, sum higartil hava verið nýtt í felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES, hava ikki megnað at tryggja skynsama stovnsrøkt og lønsemi í vinnuni. Hetta sæst m.a. av, at veiðuorkan hjá ES verður mett at vera eini 40 prosent ov stór, og at nógvir fiskastovnar er illa fyri.

Teir trupulleikar, sum standast av hesum, gerast ikki minni, tá havt verður í huga, at fiskivinnan ofta er savnað í landspørtum, har fiskivinna er lívsæðrin í vinnulívinum, og alternativir vinnumøguleikar eru fáir.

**Føroyar í ES**

Um Føroyar fara uppí ES, er torført frammanundan at meta um, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri føroyskan fiskivinnupolitikk og veiðurættindi. Svarið fæst bert í upptøkusamráðingum við ES.

Tó er greitt, at útgangsstøðið verður,

- at Føroyar mugu góðtaka tað lógarverk, sum verandi limalond hava samtykt á fiskivinnuøkinum,
- at avgerðarrætturin í fiskiveiðumálum og heimildin at regulera fiskiskapin við Føroyar í prinsippinum kemur at liggja hjá ES,
- at tað veiðumynstur, sum hevur verið innanfyri karmarnar av galdandi fiskiveiðusáttmála, í høvuðsheitum fer at halda fram,
- at ES yvirtekur samráðingarrættin um veiðurættindi frá triðjalondum og fer at umboða okkum í millumtjóða fiskivinnunevndum og -felagsskapum.

**EBS og fiskivinna**

EBS-sáttmálin áleggur ikki EFTA-londunum at seta í verk ES-lógarverk á fiskivinnuøkinum. Tað er bert innan ávís øki - almennur studningur, marknaðarføring og handil - at kravt verður, at EFTA skal fylgja ES-lóggávuni. Sáttmálin snýr seg í høvuðsheitum um liberalisering av handlinum við fiski og fiskavørum millum ES- og EFTA-londini (tó ikki fullkomnan fríhandil) og eitt nú reglur, sum skulu forða fyri kappingaravlaging í samband við almennan studning og marknaðarinntriv.

Veiðurættindi vóru tikin upp undir EBS-samráðingunum. Tey gjørdust tó ikki formliga partur av sjálvum EBS-sáttmálanum. Ístaðin geva sjálvstøðugar sínámillum fiskiveiðuavtalur ES-førum rúmari ræsur í íslendskum og norskum sjógvi sum kompensasjón fyri betri marknaðarsømdir í ES. EBS-sáttmálin hevur eisini ásetingar og undantøk, sum í rættuliga stóran mun skerja møguleikarnar hjá ES-borgarum at gera íløgur í íslendska og norska fiskivinnu.

## Hvala- og fuglaveiða

**Hvalaveiða**

Í habitatdirektivinum hjá ES er høvuðsreglan, at øll veiða eftir hvali (íroknað grindahvali) er bannað. Limalondini hava tó møguleika undir nærri ásettum treytum at loyva veiðu. Tá skulu limalondini geva eina frágreiðing um nýtsluna av undantaksregluni, og avgerðin kann verða eftirkannað av ES-ráðnum.

Við gongdini undir norsku upptøkusamráðingunum í huga er ikki væntandi, at vit fáa serskipanir og undantøk á hesum økjum. Hetta

er fyrst og fremst galdandi fyri vinnuliga hvalaveiðu, har sjónarmiðini hjá okkum er nógv øðrvísi enn ES-sjónarmið.

## Landbúnaður

Landbúnaðarpolitikkurin hjá ES hevur til endamáls at tryggja javnbjóðis kappingartreytir á einum felags marknað. Felags landbúnaðarpolitikkurin byggir á tríggjar meginreglur:

- felags marknað fyri landbúnaðarvørur
- verju av landbúnaðarvørum úr ES móti innflutningi úr triðjalondum.
- stuðulsskipanir

Eftir at landbúnaðarpolitikkurin varð endurskoðaður og broyttur í 1992, hevur serligur dentur verið lagdur á at minka um ovframleiðsluna. Hetta hevur serliga verið gjørt við at lækka minstuprísirnar og at broyta stuðulsskipanirnar, soleiðis at stuðulin í minni mun er framleiðslustimbrandi. Samstundis hava umhvørvismál fingið størri týdning, eins og størri dentur verður lagdur á at tryggja livikorini hjá landbúnaðinum í landspørtum, sum eru illa fyri.

**Marknaðarskipanir**

Høvuðsamboðið í landbúnaðarpolitikkinum hjá ES eru marknaðarskipanir, sum m.a. áseta framleiðslukvotur fyri hvørt einstakt limaland. Marknaðarskipanirnar tryggja framleiðarum minstaprísir, sum liggja omanfyri heimsmarknaðarprísir. Marknaðarskipanirnar fevna um allar týðandi vørur.

Ein felags skipan við innflutningsverju móti triðjalondum er sett í verk í ES. Innflutningsverjan byggir fyri tað mesta á broytilig innflutningsgjøld og/ella toll. Av innfluttum landbúnaðarvørum krevur ES eitt innflutningsgjald, sum í høvuðsheitum svarar til munin á prísunum á heimsmarknaðinum og prísin á innflutningi til ES.

**Bygnaðarpolitikkur**

Fyritreytirnar fyri landbúnaði eru sera ymiskar í limalondunum. Til tess at røkka endamálunum í felags landbúnaðarpolitikkinum í øllum limalondunum er neyðugt við øðrum tiltøkum enn marknaðarskipanini. Tí er ES í størri og størri mun farið at nýta bygnaðar- og økispolitisk tiltøk í landbúnaðinum.

**Kappingarreglur**

Kappingarreglurnar hjá ES eru eisini galdandi fyri framleiðslu og handil við landbúnaðarvørum. Vanliga kunnu limalondini ikki veita almennan stuðul, sum ikki er í samsvar við ásetingarnar í marknaðarskipanini, ella sum eru kappingaravlagandi.

**Ávirkan á Føroyar**

Eitt nærri føroyskt tilknýti til ES (tollsamgonga ella limaskapur) hevur við sær:

* Lógartillagingar mugu gerast, fyri at vit kunna verða partur av innmarknaðinum í ES. Hetta er serliga galdandi fyri tekniskar reglur um fóður, tøð, húsdjóraaling og plantu- og djórasanitér viðurskifti.

* Føroyar hava eftir fríhandilsavtaluni við ES bundið seg til at avtaka allan verjutoll á landbúnaðarvørur úr ES, tó undantikið mjólk og lambskjøt. ES-sáttmálanum loyvir tó áseting av innflutningsgjøldum (javningargjøldum) á landbúnaðarvørur úr ES, í tann mun hetta er neyðugt fyri at byrgja upp fyri útflutningsstuðlinum. Eitt tættari tilknýti til ES ber helst í sær, at vit missa møguleikan at áseta javningargjald á mjólk og mjólkarúrdráttir úr ES. Tørvurin á hesum gjaldi er tó ikki tann sami, um Føroyar t.d. gerast partur av innmarknaðinum hjá ES, tí mjólkarprísurin innan fyri ES er hægri enn prísurin á heimsmarknaðinum.

* At føroyskir innflytarar helst missa møguleikan at keypa landbúnaðarvørur til heimsmarknaðarprís. Hesir prísir liggja vanliga væl undir prísunum í ES - sjálvt eftir uppkravi av GATT-tolli. Hetta hevði aftur merkt hægri matvøruprísir í Føroyum.

* Studningsskipanin til landbúnaðin skal helst umskipast samsvarandi ES-reglunum, sum ikki loyva reinan rakstrarstuðul til landbúnaðin. Møguliga kann undantak fáast fyri Føroyar. Noreg, Svøríki og Finnland fingu undantøk fyri landbúnaðin norðan fyri 62. breiddarstigi. Annars kann ikki roknast við, at ES-reglurnar eru til hindurs fyri, at tann føroyski stuðulin til landbúnaðin kann verða varðveittur á sama støði, tá tann føroyski stuðulin sum heild liggur undir stuðlinum í ES.

* Føroyar missa møguleikan fyri marknaðareftirliti við landbúnaðarvørum, herundir livandi djórum. Hinvegin sleppa vit undan eftirliti í samband við útflutning til ES.

* Føroyar fáa sum limur í ES part í stuðlinum eftir marknaðarskipanunum, men støddin veldst um tær framleiðslukvotur,

sum verða tillutaðar Føroyum. Stuðulin til ta føroysku landbúnaðarframleiðsluna liggur sum heild eitt sindur undir stuðlinum í ES.

* Væntandi kunnu Føroyar eisini fáa part av stuðulsskipanunum eftir bygnaðarpolitikkinum. Nevnast kann, at í Noreg koma 85% av landbúnaðarøkinum undir heitið *Less Favoured Areas*.

* Spurningurin er somuleiðis, um føroyska skipanin við landsjørð er sambærlig við ES-rættin, herundir serliga reglurnar um fría stovningarrættin.

## Orku- og oljupolitikkur

ES-londini hava ikki felags politikk á orkuøkinum. Tó verður orka, herundir útvinning og framleiðsla av olju, ávirkað av øðrum pørtum av ES-samstarvinum, eitt nú generellu kappingarreglunum og teimum fýra frælsunum.

Í ES-samstarvinum verður miðað ímóti at seta á stovn innmarknað fyri orku.

Ein liður í hesum arbeiði er *oljudirektivið*. Endamálið við hesum direktivi er m.a. at tryggja, at øll tillluting av loyvum til kanningar og framleiðslu av olju fer fram á ein hátt, sum tryggjar øllum javnbjóðis kappingartreytir.

Útgangsstøðið er, at limalondini sjálvi avgera, hvørjar leiðir á landgrunninum skulu setast av til leiting eftir og framleiðslu av olju. Limalondini hava heimild at áseta treytirnar fyri oljuvirksemi. Slíkar treytir og krøv kunnu m.a. vera um trygdarskipanir, trygd og heilsu, trygd í samband við flutning, umhvørvisvernd og vernd av livandi tilfeingi, gripum av listarligum, søguligum ella fornfrøðiligum virði, trygd í samband við installasjónir, arbeiðaravernd, umsitingina av oljutilfeinginum, t.d. hvussu skjótt skal farast fram í útvinningi, og hvussu tað almenna skal tryggja sær skattainntøkur.

Hóast hetta ber í sær, at limalondini í høvuðsheitum varðveita ognarrættin til oljuríkdømið á sínum nærleiðum, so kunnu limalondini kortini ikki fara út um tær generellu avmarkingarnar í Rómarsáttmálanum fyri virksemi hjá almennum myndugleikum. Í hesum liggur m.a., at tá myndugleikarnir tilluta feløgum konsessjónir og áseta treytir, skal hetta fara fram á ein hátt, sum tryggjar

øllum feløgum somu viðferð uttan mun til, í hvørjum landi tey hava heimstað. Tað vil m.a. siga, at í samband við tilluting av oljurættindum er ikki loyvt at seta treytir um, at nasjónalar vørur og tænastuveitingar skulu hava framíhjárætt ella um, at virksemi skal hava heimstað í ella verða stýrt úr viðkomandi limalandi.

## Ídnaður, handil, tænastur, samskifti

**Ídnaður**

Ídnaðarpolitikkurin hjá ES er grundaður á fría kapping á marknaðarbúskaparligum grundarlagi. Eitt av fremstu endamálunum er at minka um almennan stuðul til vinnulívið (við ávísum undantøkum fyri smá og meðalstór virki).

Ásannandi at smáu og meðalstóru virkini eru ryggurin í vinnuliga framburðinum, og at tað er her, flestu arbeiðsplássini verða skapt, hevur ES ein serligan politikk fyri hesi virkini - tann sonevndi SMV-politikkurin, har smá og meðalstór virki í ES fáa serliga stuðul.

Í 1994 varð politikkinum fyri tey smáu og meðalstóru virkini broyttur. Samtykt varð ein ætlan fyri hesar fyritøkur og fyri handverksvinnuna, m.a. soleiðis at SMV skuldu skattast lagaligari, skuldu lættari kunna seljast og arvast, og at gjaldsfreistir skuldu haldast betri, eisini frá almennari síðu.

**Handil**

Handilspolitikkurin hjá ES í samband við vørur er grundaður á felags tollgjøld og felags handilsavtalur við triðjalond. ES tekur undir við grundreglunum í GATT.

Fríhandilsavtala varð gjørd millum EFTA og EF, sum síðani er víðkað við EBS-avtaluni (Sveis tó undantikið).

Eisini eru gjørdar assosieringsavtalur við Ungarn, Pólland, Kekkia og Slovakia. Sambært hesum avtalum verður ES og hesi londini fríhandilsøki aftaná 10 ár. Frá januar 1995 hava ídnaðarvørur frá hesum londunum frítt at fara til marknaðin í ES.

Handilsavtalan millum Føroyar og ES ber í sær, at eingin tollur verður lagdur á ídnaðarvørur úr Føroyum til ES.

**Tænastur**

Eins og vørur hava tænastur frítt at fara í ES. Týdningurin av fríum flutningi av tænastum eigur ikki at undirmetast, tí meira enn helmingurin av virðisøkingini í framkomnum samfeløgum stavar frá tænastuvinnu.

**Flutningur**

*Transevropeiska netverkið* er ein ætlan um útbygging og liberalisering innan flutning, orku og telesamskifti. Sambært ES-nevndini er henda ætlan ein av fremstu fyritreytunum fyri vøkstri, betri kappingarføri og arbeiðsplássum í ES.

1.januar 1993 varð flogferðslan í ES liberaliserað. Flogfeløg kunnu nú í høvuðsheitum flúgva frítt í øllum ES. Tó eru innanríkisrutur í limalondunum undir avmarkingum fram til 31.mars 1997.

Líknandi skipan er galdandi fyri flutning á veganetinum, og arbeitt verður við at fáa skipanir fyri jarnbreytir.

**Telesamskifti**

Eins og innan flutningsøkið er gongdin í ES innan telesamskifti merkt av liberalisering og harmonisering. Á ES-stigi er avgjørt, at frá 1.januar 1998 verður kapping innførd grundað á eina felags ES-skipan fyri alt teleøkið, galdandi bæði fyri teleinfrastrukturin og fyri teletænasturnar.

**Heilsufrøðilig viðurskifti**

Heilsufrøðiligu krøvini til framleiðslu og sølu av fiskavørum í ES eru fyrisett í fiskiídnaðardirektivinum. Viðvíkjandi krøvunum til triðjalond verður í direktivinum ásett, at triðjalondum skulu setast *í minsta lagi* somu krøv, sum eru galdandi fyri limalondini. Fyri at tryggja, at triðjalond lúka treytirnar, skulu serfrøðingar vitja viðkomandi lond fyri at gera kanningar.

ES-serfrøðingar hava verið í Føroyum, og ES-nevndin hevur staðfest, at føroyska lóggávan á hesum øki lýkur krøvini í direktivinum hjá ES, og at Heilsufrøðiliga Starvsstovan er før fyri at hava eftirlit við, at lógin verður hildin. Landsstýrið hevur somuleiðis veitt trygd fyri, at krøvini í ES-direktivinum verða hildin.

Fiskavørur úr fiski av fremmandum uppruna, sum verður hagreiddur í Føroyum, eru undir somu heilsufrøðiligu reglum sum fiskavørur úr fiski av føroyskum uppruna.

Virki í ES, sum framleiða fiskamjøl og fiskafóður, skulu verða góðkend sambært *Balai-direktivinum*. Virki í ES, sum hava fingið hesa góðkenning , kunnu frítt selja fiskamjøl og -fóður innan ES.

Virki í triðjalondum skulu eisini góðkennast sambært Balai-direktivinum. Harumframt skal framleiðslan kannast dagliga, og hvør sending skal góðkennast áðrenn avskiping.

## Búskaparpolitikkur í ES

Stjórnarleiðararnir í ES samtyktu í 1991 at skipa eina *búskaparliga og pengapolitiska samgongu.* Endamálið er, at myndugleikarnir í teimum evropeisku londunum reka sama búskaparpolitikk. Samgongan ber eisini í sær, at londini geva tilsøgn um, at gjaldoyrakursirnir skulu vera fastir. Ætlanin er síðani at skipa felags gjaldoyra. Harumframt skal felags pengapolitikkur førast í øllum ES. Miðað verður ímóti, at meginbankarnir í limalondunum fara saman í eina felags evropeiska meginbankaskipan, og at ein felags meginbanki, sum frá líður, verður settur at virka í ES.

**Støða Føroya**

Føroyar eru ein partur av danska gjaldoyraøkinum. Hetta merkir, at vit hava felags pengapolitikk og meginbanka við Danmark. Føroyskir peningastovnar eru javnsettir við danskar peningastovnar, tá tað snýr seg um penga- og likviditetspolitisku stýringsamboðini hjá danska tjóðbankanum. Valutalógin er í høvuðsheitum galdandi fyri Føroyar, og liberaliseringin av kapitalflutningi er við kunngerð sett at galda fyri Føroyar.

Danmark hevur fingið undantøk frá pørtum av búskapar- og pengapolitisku samgonguni. Hetta førir í fyrsta lagi við sær, at Danmark ikki verður partur av skipanini við felags gjaldoyra. Í øðrum lagi verður Danmark ikki bundið at øllum reglunum í búskapar- og pengapolitisku samgonguni. Í triðja lagi varðveitir danski tjóðbankin sínar heimildir í pengapolitiskum málum.

Vert er tó at nevna, at møguleikarnir hjá dønum at reka sín egna pengapolitikk longu frammanundan vóru skerdir, bæði av liberaliseringunum av kapitalflytingum í ES og sum ein avleiðing av altjóða rákinum tey seinnu árini.

Sum limur í ES, hevur Danmark bundið seg til at fylgja ES-lóggávuni á nógvum økjum. Ein rættuliga stórur partur av donsku vinnulívslóggávuni og lóggávan á teimum ymisku økjunum í fíggjarskipanini eru grundaðar á felags ES-reglur. Týðandi partar av hesi lóggávu eru tiknir við í tað lógarverk, sum føroyska heimastýrið hevur samtykt á málsøkjum, sum eru yvirtikin sum sermál.

Sum er hava Føroyar ávísar møguleikar at smíða lógir, sum geva egnum fyritøkum, borgarum ella fíggjarmarknaðum framíhjárætt. Ásetingarnar um frían kapitalflutning seta tó mørk fyri, í hvønn mun slík lóggáva kann varðveitast.

Hvussu støða Danmarkar í búskapar- og pengapolitisku samgonguni kemur at ávirka støðu Føroya, er ógreitt. Tó er greitt, at um Føroyar framhaldandi verða við í danska gjaldoyraøkinum og ríkisfelagsskapinum, mugu vit halda okkum til tær generellu reglurnar í búskapar- og pengapolitisku samgonguni, sum Danmark er bundið at fylgja.

## Arbeiðsmarknaður

**Arbeiðsmegin frítt at fara**

Arbeiðsmegin hevur frítt at fara um landamørk í ES. ES-borgarar hava rætt til sosiala trygd, uttan mun til í hvørjum landi teir eru staddir. Somuleiðis kunnu virki og sjálvstøðug vinnurekandi frítt átaka sær arbeiðsuppgávur í øðrum ES-londum.

**Føroyar onga avtalu**

Av tí at eingi skipaði viðurskifti og fastir karmar eru fyri arbeiðsmarknað, brúka føroyingar í flestu førum Danmark sum transittland. Skulu føroyskar fyritøkur verða kappingarførar, er umráðandi, at ein samvinnuavtala við ES í *fyrsta* lagi tryggjar, at føroysk arbeiðsmegi fær sama frælsi, sum ES-borgarar hava, í *øðrum* lagi at føroyingar fáa somu sosialu trygdina, sum ES-borgarar hava, og í *triðja* lagi at føroysk virki og sjálvstøðugt vinnurekandi fáa tað sama frælsi, sum virki og vinnurekandi í ES hava.

## Útbúgving og gransking

**Útbúgving**

Í ES eru útbúgvingarspurningar ikki eitt felagsmál, men ein nasjónal uppgáva. Hetta staðfestir Maastricht-sáttmálin. Hetta merkir kortini ikki, at ES ongan útbúgvingarpolitikk hevur. Yrkisútbúgvingar hava altíð verið við í Rómarsáttmálanum. Eini aðalrættindi í ES eru, at ES-borgarin hevur frítt at fara í øllum ES. Meginreglan hevur verið, at limalondini viðurkenna útbúgvingar hjá hvørjum øðrum.

**Gransking**

Endamálið við granskingar- og menningarsamstarvinum er at menna og bøta um kappingarførið hjá evropeiskum vinnulívi og ídnaði, at gera sítt til at loysa felags umhvørvisspurningarnar, at verða til reiðar at møta sosialum og heilsuligum avbjóðingum og økja um umskiftið av kunnleika og mobiliteti av granskarum millum limalondini. Granskingin er eisini mett at hava týdning fyri at skapa nýggj arbeiðspláss. Tey seinnu árini hevur serligur dentur verið lagdur á at styrkja teknologiska grundarlagið hjá smáum og meðalstórum fyritøkum, tí hesar vanliga geva arbeiði til nógvar hendur.

**Niðurstøða**

Føroyar hava onga avtalu um útbúgvingar- og granskingarsamstarv við ES. Tó ger støða okkara sum partur av danska ríkinum, at

føroyingar, sum lesa í Danmark verða, javnsettir við ES-borgarar. Føroyingar, sum eru undir útbúgving í Føroyum, fáa kortini ikki lut í teimum ES-stuðulsmøguleikum sum teir føroyingar, ið eru undir útbúgving í Danmark, fáa. Føroyingar, sum fara beinleiðis úr Føroyum til Bretlands at lesa, mugu gjalda somu lestraravgjøld sum triðjalond. Heldur ikki føroyskir lærarar og granskarar hava somu mobilitetsmøguleikar.

Sum er er einki til hindurs fyri, at føroyingar kunnu luttaka í einstøkum ES-granskingarprosjektum ella assosierast til einstøk rammuprosjekt um vit eru sinnaði fyri at gjalda fyri okkum sjálvi.

Viðvíkjandi útbúgving og gransking gevur ein EBS-avtala á leið somu rættindi og skyldur sum limaskapur. Hinvegin er spurningurin, um hetta er rættasti hátturin at nýta granskingarpening, heldur enn fyrst at menna okkara nasjónalu gransking. Tí tað er greitt, at spurningurin er ikki bert um, hvat vit kunnu fáa burturúr, men um vit duga at koma okkum uppí saman við øðrum. Uttan mun til hvat vit velja, er neyðugt at menna nasjónala føroyska gransking, so vit fáa eitt haldgott fakligt og fíggjarligt støði at byggja á.

# KAP.4 Avtaluhættir hjá Evropeiska Samveldinum

## 4.1 Inngangur

Til tess at fáa *gagnligastu* marknaðaratgongd er neyðugt at finna fram til tann avtaluhátt, sum letur *bestu* marknaðaratgongd. Neyðugt er innan hvønn einstakan avtaluhátt at lata ES rættindir fyri at fáa rættindir frá ES.

Fyrsta stigið hjá nevndini er tí at lýsa høvuðstættirnar í teimum avtalum, ið ES hevur við onnur lond.

Nevndini kunnugt finst eingin einstøk skrivlig kelda, ið lýsir og samanber avtaluhættir hjá ES. Nevndin setti sær tí sum mál sjálv at lýsa hesi viðurskifti. Grundarlagið undir lýsingini er ein viðgerð av ymiskum sáttmálum, ES hevur við onnur lond, og samrøður við lyklapersónar, sum hava serliga vitan um ES-avtalur. Frágreiðingin er tí at rokna sum lýsandi og kunnandi og ikki sum juridisk dokumentasjón.

Lagt verður fyri við at lýsa, hvussu ES bólkar lond, tað ger avtalur við. Síðani verður komið inn á teir leistar, ES ger avtalur eftir. Eisini verður gjørd ein samanbering av avtalum hjá ES við lond, sum Føroyar kunnu samanberast við.

## 4.2 Samstarvsøkini í ES

Niðanfyri er yvirlit yvir tey samstarvsøki í ES, sum eru nevnd í Maastricht-sáttmálanum:

* Innmarknaður
* Landbúnaðarpolitikkur
* Fiskivinnupolitikkur
* Kappingarspurningar
* Skattaharmonisering
* Búskaparlig og pengapolitisk samgonga
* Felags handilspolitikkur
* Marknaðareftirlit o.a.
* Sosialir spurningar
* Útbúgving og gransking
* Búskaparligt og sosialt samstarv
* Umhvørvismál

* Transevropeiska netið
* Ídnaðarpolitikkur
* Heilsurøkt
* Mentan
* Menningarhjálp
* Brúkaravernd

Tær avtalur, ES ger við onnur lond, fevna um ávís av nevndu økjum. Eitt samstarv á hesum økjum krevur vanliga, at lógarkarmarnir í avtalulondunum verða lagaðir til ES-lógirnar á viðkomandi samstarvsøkjum.

**Einki fiskivinnu-samstarv**

Nevndini kunnugt er fiskivinnusamstarv altíð undantikið teimum vanligu samstarvsøkjunum, ES ger avtalu um. Tá ES hevur gjørt avtalur við fiskivinnutjóðir, hava ístaðin verið førdar serligar samráðingar um veiðurættindi og fiskivinnu. EBS-avtalan førdi við sær, at EFTA-londini gjørdust partur av innmarknaðinum í ES, men tey fýra frælsini eru kortini ikki galdandi fyri fiskavørur og fiskivinnu. Veiðurættindi eru sum so ikki partur av EBS-avtaluni.

## 4.3 Landabólkar í ES-høpi

Avtalurnar, ið ES ger við onnur lond, eru sera umfatandi og rúgvismiklar við nógvum skjølum. ES hevur gjørt innanhýsis skipan, at 3.lond verða flokkað til tess at skipa samráðingar við londini eftir føstum innhaldsligum leisti.

Tað er tó helst óvist hvussu fast skipað hendan flokking er. Yvirlitið niðanfyri er tí at rokna sum ein eftirrasjónalisering av, hvussu ES hevur flokkað londini, tað hevur samráðst og gjørt avtalur við.

* **Ríkisrættarlig støða**
  sjálvstøðugt land ella partur av einum øðrum størri ríki (t.d. San Marino, Føroyar ella Áland)
* **Politisk støða**
  sjálvstøðugur politiskur avgerðarrættur í ávísum málum (t.d. innan toll- og skattaøki, fíggjarpolitikk, flóttafólk)
* **Geografisk og demografisk støða**
  Vesturevropa, Eysturevropa, Asia, Suðuramerika, oyggjasamfelag osfr. Fúrstadømi o.l., t.d. San Marino, Vatikanið, Monako.

* **Búskaparlig støða**
  ríkt ella fátækt land, við støði í tjóðarbúskaparligum lyklatølum (BTÚ, BTÚ pr. innbúgva, uttanlandsskuld osfr.) og frá fíggjarlógini (fíggjarlógarhall/-avlop, almenn skuld osfr.), sjálvstøðugur fíggjar-, penga-, valuta-, skattapolitikkur.
* **Vinnubygnaður**
  (tilafturskomið ella framkomið ídnaðarsamfelag, landbúnaðarsamfelag, fiskivinnusamfelag osfr.)

**Føroyar** Føroyar eru, sum eitt av teimum heilt fáu londunum í heiminum, als ikki í nøkrum bólki í yvirlitinum hjá ES. Tá Føroyar ikki verða flokkaðar sum eitt av londunum ES samstarvar við ella letur fyrimunir, er greitt, at Føroyar mugu fáa status sum eitt triðja land, ið sum útgangsstøði ikki verður latið nakrar fyrimunir uttan at gjalda afturfyri. Tað vil siga, at Føroyar í útgangsstøði verða roknaðar og viðfarnar sum eitt sjálvstøðugt og ríkt land.

## 4.4 Avtaluleistar hjá ES

ES hevur sínámillum avtalur um handil við hópin av londum - millum 100 og 200. Hesar avtalur fevna um nógv ymisk viðurskifti. Alt frá vanligum handli, tollviðurskiftum, búskaparligum samstarvi, passi, til avtalur um politiskt samstarv. Tá hesar avtalur verða gjørdar, nýtir ES fleiri leistar at seyma avtalurnar eftir.

**Javnvág** Tá ES ger avtalur við summi lond, verður miðað ímóti, at avtalurnar javnviga, t.v.s. at tað, sum ES letur í rættindum, skal svara til tað, ES fær. Hendan javnvág verður vanliga gjørd upp í búskapartølum, sum kunnu mátast (t.d. um ES letur tollfría marknaðaratgongd fyri ávísa vøru, sum annars skuldi goldið toll). Somuleiðis verða ikki-búskaparlig viðurskifti mett í virði (t.d. pass-samstarv, skúla-samstarv). EBS er dømi um eina javnvágavtalu.

**Ikki-javnvág** Summir avtaluleistar gera, at ES letur meira, enn ES fær. Í mongum førum ger ES avtalur beinleiðis við tí endamáli at stuðla tilafturskomnum londum. Talan kann vera um, at ES letur marknaðaratgongd og/ella ymiskan fíggjarligan styrk uttan at krevja stórvegis afturfyri.

## Talva 4.1: Yvirlit yvir teir avtaluleistar ES nýtir í dag

| Leistar | Støða | Frágreiðing | Lond | Treytir |
|---|---|---|---|---|
| ES-limaskapur | Sjálvstøðug stór lond, sum lúka krøv frá ES um fólkatal, búskap, mannarættindi, demokrati, vinnubygnað osfr. | Limalondini ganga við til at lata ein part av politiskum avgerðarrættinum til øll limalondini at avgera. Tvs. at tað einstaka landið letur ávísan avgerðarrætt frá sær og fær ávísan avgerðarrætt mótvegis hinum limalondunum. Limaskapur byggir á felagstreytir við so fáum varandi undantøkum sum møguligt. | Týskland, Frakland, Italia, Belgia, Niðurlond, Luksemborg, Bretland, Írland, Danmark, Spania, Portugal, Grikkaland, Svøríki, Finnland og Eysturríki | Felagstreytir |
| ES-limaskapur fyri atlond | Lond, sum onkursvegna eru knýtt at øðrum limalandi, men sum hava ávísan politiskan sjálvsavgerðarrætt | Atlond verða roknað sum limir við serligum undantøkum lagað eftir serligum viðurskiftum í teimum einstøku atlondunum.<br>Serlig tillagingarskipan varð gjørd fyri Kanariuoyggjar, tá Spania fór uppí ES. Kanariuoyggjar vórðu undantiknar tollsamgonguni og landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkinum. Sambært avtaluni skuldu Kanariuoyggjar so við og við gerast partur av ES.<br>Somuleiðis er serlig skipan galdandi fyri Áland, t.d. viðv. tollfríari sølu, skipaflutningi og ognar- og vinnuviðurskiftum. | Áland, Kanariuoyggjar, Madeira, Asoroyggjar | Felagstreytir við undantøkum |
| Tollsamgonga við atlond | Lond, sum onkursvegna eru knýtt at øðrum landi. Hesi kunnu vera sera ymisk í altjóða høpi. Geografiskt kunnu tey liggja inni í einum øðrum landi (t.d. Andorra, Monako, San Marino). Søguliga,ríkisrættarliga, mentunarliga, siðsøguliga og handilsliga kunnu tey verða knýtt at einum stórum limalandi (t.d. Ermarsundsoyggjar og Isle of Man). | Atlond eru nógv og sera ymisk. Tey eru ring at flokka. Tað er nærum ómøguligt hjá ES at gera standardavtalur við hesi lond.<br>Við støði í einum tollfelagsskapi verður gjørd avtala, sum hóskar til serligu viðurskiftini millum høvuðslandið og atlandið. Í flestu førum er eingin trupulleiki hjá ES at lata fría marknaðaratgongd, tí at vinnurnar í hesum londum hótta onga vinnu í ES.<br>Í nøkrum fáum førum hevur ES gjørt seravtalur við atlond, sum ikki byggja á tollsamgongu (t.d. Alto Adige, Lavigne og Val D'aosta). | Isle of Man, Ermarsundsoyggjar, San Marino, Andorra, Monako | Í flestu førum letur ES meira, enn tað fær, í teimum førum talan er um tollsamgongu við atlond |
| EBS-samstarv | Rík, sjálvstøðug lond, sum ES ynskir eitt tættari tilknýti til | EBS er tann tættasti samstarvsformurin, sjálvstøðug lond kunnu fáa uttan at gerast limir. Felags innmarknaðurin er galdandi fyri alt EBS-økið, tvs. 18 sjálvstøðug lond. EBS fevnir um ES, Noreg, Ísland og Liechtenstein. Avtalan varð gjørd við EFTA-londini, og kom í gildi 1.1.1993. Í Sveis atkvøddi ein meiriluti ímóti EBS. Í 1995 gjørdust Eysturríki, Finnland og Svøríki limir í ES. Í mei 1995 gjørdist Liechtenstein limur í EBS. | Noreg, Ísland, Liechtenstein | Tað, ES letur í rættindum, skal svara til tað, ES fær. T.d. vístu útrokningar, at EFTA-londini fingu fyrimun av marknaðaratgongd og ymiskum samstarvi. Tí varð neyðugt hjá EFTA-londunum at gjalda pening inn til ES í ein sonevndan "cohesion"grunn. |
| Assosierings-avtala | ES hevur serskipanir fyri lond, ið ynskja limaskap, men sum ikki lúka treytirnar fyri búskapi, demokratii, mannarættindum osfr. Endamálið er at hjálpa londunum at gerast limir í ES. | Síðani 1960-árini hevur Turkaland samráðst við ES um limaskap. Men landið hevur ikki lokið treytirnar fyri limaskapi. Í 1995 er samtykt, at ES skal fáa avtalu um tollsamgongu.<br><br>Somuleiðis hava Kypros og Malta søkt um limaskap og hava tí serliga lagaligar assosieringsavtalur. | Turkaland, Malta, Kypros | ES letur meira, enn tað fær. ES stuðlar londunum við marknaðaratgongd, meðan tey fyrireika seg til limaskap. ES hevur verið sera avgjørt í krøvum sínum um, at londini laga sítt lógarverk eftir lógarverkinum hjá ES. |
| Evropa-avtala | Nýggju londini í Eysturevropa, ið ynskja limaskap, men sum ikki lúka treytirnar fyri búskapi, demokratii, mannarættindum osfr. Endamálið er at hjálpa londunum at gerast limir í ES. | Londunum tørvar serliga stóran búskaparligan styrk til tess at lúka krøvini um limaskap. ES letur t.d. fíggjarligan stuðul til samferðslu, telesamskifti og fíggingarvirksemi. | Nýggju demokratisku londini í Eysturevropa (t.d. Baltalond, Slovenia, Kekkia) | Fáa fleiri rættindi, enn tey lata |

**Talva 4.1: (framhald): Yvirlit yvir avtaluleistar ES nýtir í dag**

| Leistar | Støða | Frágreiðing | Lond | Treytir |
|---|---|---|---|---|
| OLT-skipan | Atlond hjá ES-londum handan hav. Endamálið er at menna búskapin og sosiala støðið í londunum.<br><br>1. OLT-londini verða í samband við handil roknað sum vanlig ES-lond<br><br>2. Upprunavørur í OLT-londunum sleppa undan tolli á ES-marknaðinum<br><br>3. Arbeiðsmegin hevur frítt at fara millum eitt OLT-land og høvuðslandið. | OLT-støða gevur í høvuðsheitum fría marknaðaratgongd. Tó kunnu fiskur og fiskavørur gerast ein samráðingarspurningur. T.d. hevur Grønland fría marknaðaratgongd fyri allar fiskavørur av grønlendskum uppruna, m.a. tí teir lótu veiðurættindi afturfyri, men OLT-status er neyvan tað sama sum at lata veiðurættindi fyri marknaðaratgongd. Grønland fekk OLT-status, tá landið segði seg úr ES í 1985. Tey veiðurættindi, Grønland letur ES, svara til tað, ES rindar fyri veiðurættindi (umleið 275 mió. kr um árið).<br><br>Lond, sum hava OLT-støðu, verða ikki roknað sum ein partur av Evropa. Tey verða yvirhøvur roknað sum búskaparliga tilafturskomin. At londini liggja handan hav, nýtist ikki at merkja, at modellið ikki kann brúkast uppá t.d. Føroyar. Stóri ivaspurningurin er hinvegin um føroysku búskaparstøðuna, og um Føroyar kunnu ella vilja verða roknaðar sum eitt atland hjá einum limalandi. | (Sí skjal 4A við yvirliti yvir OLT-lond) | ES letur munandi meira, enn tað krevur |
| AVS-lond | Fyrrverandi hjálond hjá núverandi limalondum. AVS-londini verða yvirhøvur roknað sum búskaparliga tilafturskomin. | Lond, sum eitt limaland onkursvegna hevur ræði á, tvs. fyrrverandi hjálond, sum liggja í einum øðrum heimsparti | Umleið 100 lond og oyggjasamfeløg. T.d. Belize, Dominikana, Bahamaoyggjar. | Fáa nógv meira í rættindum, enn tey lata |
| Lomé-lond | Fyrrverandi hjálond í Afrika | Fleiri afrikansk strandalond fáa t.d. rættuliga stórar upphæddir frá ES fyri veiðurættindi. T.d. hevur Marokko fingið hundraðtals mió.ECU afturfyri, at eini 600 sponsk fiskifør eru sloppin í marokkanskan sjógv. | Afrikansk lond | Fáa nógv meira í rættindum, enn tey lata |
| 3.lond. 1.ættarliðs handilsavtalur | Avtalur, sum ES ger við rík ídnaðarlond. Avtalurnar snúgva seg næstan bert um marknaðaratgongd og sínámillum veiðurættindi. | Hetta er "gamli klassiski" leisturin, ið ES sjáldan nýtir longur. T.d. vóru tær gomlu avtalurnar við EFTA-londini 1. ættarliðsavtalur | Sveis, Japan, Kanada, USA og Føroyar | Tað, ES letur í rættindum, skal svara til tað, ES fær. Lutfalsliga fáar treytir um innlit, kappingaravlagandi studning o.a. |
| 3.lond. 2.ættarliðs handilsavtalur | Londini eru lutfalsliga stór og sjálvstøðug | Í 1990-árunum hevur ES gjørt avtalur við triðjalond eftir einum øðrum leisti enn frammanundan. Nú fevna avtalurnar um nógv annað enn marknaðaratgongd. T.d. um "venture"-samstarv, tvs. at ES setir hópin av peningi í grunn, sum feløg í ES og í tí landinum, avtalan er gjørd við, í felag kunnu nýta til verkætlanir í triðjalandinum. Avtalurnar fevna eisini um samstarv innan t.d. gransking og útbúgving. | Argentina | Ikki so avgerandi, um avtalurnar ganga búskaparliga upp. Tað hevur størri týdning, at tær javnviga politiskt, tvs. at limalond fáa ávís rættindi, sum tey meta høgt politiskt. T.d. hava ES-før, serliga sponsk og portugisisk, fingið veiðurættindi í argentinskum sjógvi í samband við eini 2.ættarliðsavtalu millum Argentina og ES. |

**Talva 4.2: Avtalur hjá ES við atlond og smá- og pinkulond, sum Føroyar kunnu samanberast við**

| | Atlond | | | | | | | | Sjálvstøðug smálond | | Sjálvstøðug pinkulond | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Føroyar | Grønland | Áland | Isle of Man | Ermarsunds-oyggjar | Kanariuoyggjar (5) | Madeira og Asoroyggjar (5) | Gibraltar | Malta | Kypros | Andorra | Monako | San Marino |
| Høvuðsland | Danmark | Danmark | Finnland | Bretland | Bretland | Spania | Portugal | Bretland | Mentunarliga knýtt at Suðuritalia | Mentunarliga knýtt at Grikkalandi (2) | Franski pres. og kat. bispurin í Urgel velja leiðslu | Geografiskt /mentunarliga knýtt at Fraklandi | Geografiskt inni í Italia |
| Ríkisrættarligt samband við høvuðslandið | Heimastýri | Heimastýri | Heimastýri | Heimastýri | Avgerðarrætt á summum økjum, 3 sjálvst. oyggjar og privat ogn | Regionalt autonomi (3) | Regionalt autonomi | Krúnkoloni við ávísum heimastýri | Fullveldi | Fullveldi | Fúrstadømi knýtt at Spania | Fullveldi | Fullveldi |
| Løggevandi ting? | ja | ja | ja | ja | ja | Lokalt valt ting | Lokalt valt ting | Ting | Ting | Ting | Ting, uttan løggevandi vald | Ting | Ting/ráð |
| Uttanríkisrættarlig støða | Danskt ábyrgdarøki | Danskt ábyrgdarøki | Finskt ábyrgdarøki | Bretland tekur sær av uttanríkismálum eftir egnum ynski | Bretland tekur sær av uttanríkismálum eftir egnum ynski | Spania | Portugal | Bretland | Egið | Egið | Spania | Frakland | Egið (í praksis Italia) |
| Ynski mótvegis ES | ? "gagnligastu marknaðaratgongd" | Fría marknaðaratgongd og gjald fyri veiðurættindi til ES | Limaskap við undantøkum | Tollsamgongu | Tollsamgongu | Limaskap við undantøkum, egið tolløki, egnan landbúnaðar- og fiski-vinnupolitikk | Onkrar serskipanir | ? | Limaskap | Limaskap | Tollsamgongu | Tollsamgongu | Tollsamgongu |

framhald....

**Talva 4.2 ( .... framhald): Avtalur hjá ES við atlond og hjálond, sum Føroyar kunnu samanberast við**

| | Atlond | | | | | | | | Sjálvstøðug smálond | | Sjálvstøðug pinkulond | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Føroyar | Grønland | Áland | Isle of Man | Ermarsundsoyggjar | Kanariuoyggjar (5) | Madeira og Asoroyggjar (5) | Gibraltar | Malta | Kypros | Andorra | Monako | San Marino |
| Avtaluhátt við ES | Handilsavtala | OLT-støðu | Limaskap við seravtalu/ undatøkum | Tollsamgongu | Tollsamgongu | Limaskap við undantøkum, er á veg inn í felags tolløki (1),(4) | Limaskap við fáum undantøkum | Limaland við seravtalu | Assosieringsavtalu | Assosieringsavtalu | Tollsamgongu | Tollsamgongu | Tollsamgongu |
| Egið tolløki? | Ja | ja | nei, finskt | bretskt | bretskt | ja/nei (1) | nei | bretskt | ja | ja | | franskt | |
| Høvuðsvinna | Fiskivinna | Fiskivinna | Ferðavinna og sjóflutningur | Fígging | Fígging | Ferðavinna | Ferðavinna, landbúnaður | Fígging | Ferðavinna | Ferðavinna, landbúnaður | Fígging | Fígging | Landbúnaður, ferðavinna |
| Fiskivinna týdning? | ja, høvuðsvinna | ja, høvuðsvinna | nei, ikki høvuðsvinna | nei | nei | ja, ikki høvuðsvinna | ja, ikki høvuðsvinna | nei | nei, ikki høvuðsvinna | nei, ikki høvuðsvinna | nei | nei | nei |
| Egið gjaldoyra? | nei (DK) | nei (DK) | nei (Finnland) | nei (UK) | nei (UK) | nei (Spania) | nei (Portugal) | nei (UK) | ja | ja | nei (Spania/-Frakland) | nei (Frakland) | nei (Italia) |

(1) Serlig skipan er gjørd fyri Kanariuoyggjar, ið ynsktu fríhavn í samband við umskiping av farmi og fiski, og ynsktu at vera uttan fyri landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkin. (2) Norðari partur hersettur av Turkalandi. (3) Kanariuoyggjar eru ein av sponsku regiónunum við serligum heimildum (aðrar eru t.d. Galecia, Katalonia). (4) Serlig stuðulsskipan fyri ávísar vørur, sum verða útfluttar til Asia. (5) Serligar stuðulsskipanir, m.a. stuðul til *at hjælpe disse lande til at indhente de strukturefterslæb, som de har i forhold til det gennemsnitlige økonomiske sociale niveau i EU ... bl.a. støtte afsætningen af de mest berørte ..*

## 4.5 Samanbering av frælsunum í ymiskum avtaluhættum

Talva 4.3 samanber, hvørji frælsi ES letur í ávikavist limaskapi, tollsamgongu, OLT-skipan, EBS-samstarvi og fríhandilsavtalu.

Talva 4.3 vísir, at tað eru týðandi munir á, um eitt land hevur fríhandilsavtalu við ES, um tað er í búskaparligum samstarvi við ES, ella um tað er limur í ES.

Vert er at leggja til merkis, at fríhandilsavtala eins og EBS avtala ikki geva fríhandil á fiski og fiskavørum.

**Talva 4.3: Samanbering av frælsunum í ymiskum avtaluhættum**

| | Lima-skapur | Toll-sam-gonga | OLT | EBS | Frí-handils-avtala |
|---|---|---|---|---|---|
| **Vørur** | | | | | |
| Fríhandil á fiskavørum | x | x | x | | |
| Tollfrælsi á ídnaðarvørum | x | x | x | x | x |
| Ongar tekniskar handilsforðingar | x | x | x | x | |
| Felags góðkenning av almennum stuðli | x | x | | x(4) | |
| Upprunareglurnar fyri 3.landsfisk detta burtur | x | (x)(3) | | | |
| Antidumping-møguleikin dettur burtur | x | | | x (1) | |
| **Kapitalur** | | | | | |
| Kapitalur hevur frítt at fara | x | | | x | x(2) |
| Felags avgjaldsskipan | x | | | | |
| Landsins gjaldoyra knýtt at EMS | x | | | | |
| **Tænastur** | | | | | |
| Flutningur frítt at fara (tok, flogfør, bilar) | x | | | x | |
| Fíggjartænastur frítt at fara | x | | | x | |
| Teletænastur frítt at fara | x | | | x | |
| **Persónar** | | | | | |
| Felags arbeiðsmarknaður | x | | | x | |
| Felags góðkenning av útbúgving-um | x | | | x | |
| Sínámillum sosial rættindi | x | | | x | |
| **Vinnulívspolitikkur** | | | | | |
| Felags kappingarreglur | x | (x) | | x | |
| Felag karmur um regionalan stuðulspolitikk | x | (x) | | x | |
| Felags handilspolitikk | x | x | | | |
| Felags orkupolitikk | x | | | | |
| Felags landbúnaðarpolitikk | x | | | | |
| Beinleiðis atgongd til stuðulsgrunnar í ES | x | | | | |
| Inngjald til ES | x | | | | |

(1) Málið er ikki endaliga avgreitt enn; (2) Í samband við Føroyar í praksis frítt; (3) Prinsipielt frítt í tollsamgongu, men óvist um ES er sinnað at slaka uppá upprunareglurnar; (4) EBS setir avmarkingar í samband við almennan stuðul.

# Skjal 4A: Yvirlit yvir OLT-lond

Talva 1: Bretsk OLT-lond

| Land | Fólkatal (1992) | Vídd (km2) (1992) | Fólka-tættleiki (íbúgvar /km2), 1992 | BTÚ, mió USD 1992 | BTÚ/-íbúgva USD, 1992 | Innflut-ningur mió USD, 1991 | Útflut-ningur mió USD, 1991 | Handils-javni 1991 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Anguilla | 9.000 | 91 | 98,9 | 66,3 | 6834 | 32,6 | 0,4 | -32,2 |
| Cayman-oyggjar | 30.000 | 264 | 113,64 | 836 | 30511 | 271 | 3,0 | -268 |
| Falklands-oyggjar | 2.000 | 12.173 | 86,96 | ikki tøkt | ikki tøkt | 13.867(1) | 17.692(1) | 3.829(1) |
| Syðru Sandwich oyggjar | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Br.Jomfrú-oyggjar | 13.000 | 150 | 86,67 | 185 | 10.882 | 135 | 3,3 | -131,7 |
| Montserrat | 12.000 | 102 | 117,65 | 63,3 | 5.967 | 35,2 | 1 | -34,2 |
| Pitcairn | 55 (2) | 35,5 (2) | 1,54 | - | - | - | - | - |
| St.Helena. | 7.000 | 308 | 22,73 | 15,3 | 2.804 | 10,2 | 0,2 | -10 |
| Bretski suðurkollur | - | - | - | - | - | - | - | |
| Bretsk lond í Indiska havinum | - | - | - | - | - | - | - | |
| Turks- og Cairos-oyggjar | 12.000 | 417 | 28,78 | 78,8 | 6.252 | 45 | 4 | -41 |
| Tilsamans | 85.000 | 13.540,5 | | | | | | |

(1) 1989, (2) 1993
Kelda: Danska Uttanríkismálaráðið

**Talva 2: Fronsk OLT-lond**

| Land | Fólkatal (1991) | Vídd (km2) (1991) | Fólka-tættleiki (íbúgvar /km2), 1991 | BTÚ, mió USD 1991 | BTÚ/-íbúgva USD, 1991 | Innflutningur mió. USD, 1991 | Útflutningur mió. USD, 1991 | Handilsjavni 1991 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mayore | 94.410 | 474 | 252 | 476 | 5.041 | 38,55 (1) | 4,42 (1) | -34,13 (1) |
| Ný-Kaledonia | 169.900 (1) | 19.103 | 8,89 | 2.223 (2) | 13.400 (2) | 839,89 (2) | 424,45 (1) | -414,45 (1) |
| Franskt Polynesia | 199.031 | 4.167 | 47,76 | 3.007 (1) | 15.270 (1) | 882 (1) | 106 (1) | -776 (1) |
| St. Pierre og Miquelon | 6.392 (1) | 242 | 26,4 | - | 3.200 | 47,5 | 15,77 | -31,73 |
| Suðurkollur | - | - | - | - | - | - | - | |
| Wallis og Fortuna | 13.705 (1) | 274 | 50 | - | 1.500 (3) | 13,04 (4) | 0,002 (4) | -13,038 (4) |
| Tilsamans | 438.438 | 24.160 | | | | | | |

(1) 1990, (2) 1989, (3) 1986, (4) 1985
Kelda: Danska Uttanríkismálaráðið

**Talva 3: Niðurlendsk OLT-lond**

| Land | Fólkatal (1992) | Vídd (km2) (1992) | Fólka-tættleiki (íbúgvar /km2), 1992 | BTÚ, mió USD 1992 | BTÚ/-íbúgva USD, 1992 | Innflut-ningur mió.USD 1992 | Útflut-ningur mió. USD, 1992 | Handilsjavni 1992 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aruba | 71.233 | 193 | 369 | 1.130,16 | 15.866 | 387,3 | 22,8 | -364,5 |
| Niðurl. Antillur | 191.311 | 800 | 239 | 1.497 (1) | 7.395 (1) | 2.093 (2) | 1.776 (2) | -317 (2) |
| Tilsamans | 262.544 | 993 | | | | | | |

(1) 1988, (2) 1990
Kelda: Danska Uttanríkismálaráðið

**Talva 4: Grønland**

| Land | Fólkatal (1993) | Vídd (km2) (1993) | Fólka-tættleiki (íbúgvar /km2), 1993 | BTÚ, mió USD 1991 | BTÚ/-íbúgva USD, 1991 | Innflut-ningur mió.USD 1992 | Útflut-ningur mió. USD, 1992 | Handilsjavni 1992 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Grønland | 55.117 | 2.175.600 | 0,025 | 919,32 | 16679 | 415,37 | 304,82 | -110,55 |

Kelda: Danska Uttanríkismálaráðið

# KAP.5 Stjórnarlig viðurskifti

## 5.1 Samstarv millum lond

Politiskt og búskaparligt samstarv millum lond fer fram bæði á altjóða og regiónalum støði. Dømi um altjóða samstarv eru felagsskapirnir ST, IWC og GATT/WTO. Luttøka í slíkum felagsskapum førir vanliga ikki við sær, at luttakaralondini í serliga stóran mun lata sjálvræði frá sær.

Búskaparligt samstarv og samansjóðing á regiónalum støði er avmarkað til ein bólk av londum, t.d. samstarvið í ES og fríhandilsøkið NAFTA. Regiónalt samstarv er vanliga meiri bindandi og skerjir politiska rásarúmið hjá luttakaralondunum í stýringini av nógvum innlendis viðurskiftum.

Vavið og innihaldið í regiónalum samstarvsformum er víst í mynd 5.1. Ovasta røðin vísir teir tríggjar bólkarnar, sum samstarvið vanliga verður flokkað í:

* Marknaðarsamstarv
* Búskaparpolitiskt samstarv og
* Politiskt samstarv.

Teigurin longst til vinstru vísir tey ymisku samstarvsøkini.

**Marknaðar-samstarv** Marknaðarsamstarv er í fyrsta umfari at skipa fríhandilsøki ella tollsamgongu. Hetta samstarv snýr seg í høvuðsheitum um vørur. Innmarknaður førir hinvegin við sær, at ongar toll- og handilsforðingar eru millum lond, at kapitalur, vørur, tænastur og arbeiðsmegi hava frítt at fara um landamørk, og at eingi almenn inntriv eru í londunum, sum verja áhugamálini hjá innlendis vinnulívi móti umheiminum.

**Búskaparligt samstarv** Um farið verður longur við at skipa felags stovnar og felags búskaparpolitikk, er talan um búskaparpolitiska samgongu. Slíkt samstarv kann fevna um felags fíggjar-, penga-, skatta- og valutapolitikk.

**Politiskt samstarv** Síðsta stigið er at samskipa uttanríkis-, verjupolitikkin osfr. Her er talan um politiska samgongu.

Tess longri verður farið til høgru í mynd 5.1, tess meiri sjálvræði verður flutt úr luttakaralondunum til felags stovnar.

| | Marknaðarsamstarv | | | | Búskaparpolitiskt samstarv | | Politiskt samstarv |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Frí-handilsøki | Tollsam-gonga | Felags markn-aður | Inn-markn-aður | Penga-politisk sam-gonga | Búskap-arlig sam-gonga | Politisk sam-gonga |
| Toll- og handilsforðingar burtur, egnan toll úteftir | ■ | ■ | ■ | ■ | ■ | ■ | ■ |
| Toll- og handilsforðingar burtur, felags toll úteftir | | ■ | ■ | ■ | ■ | ■ | ■ |
| Arbeiðsmegi, tænastur og kapitalur hava frítt at fara | | | ■ | ■ | ■ | ■ | ■ |
| Aðrar handilsforðingar verða tiknar burtur | | | | ■ | ■ | ■ | ■ |
| Fastir valutakursir og felags pengapolitikkur | | | | | ■ | ■ | ■ |
| Felags búskaparpolitikkur annars | | | | | | ■ | ■ |
| Felags uttanríkis-, verjupolitikkur o.a. | | | | | | | ■ |

*Mynd 5.1: Ymisk sløg av samstarvi millum lond*

## 5.2 Um Evropeiska Samveldið

### 5.2.1 Sáttmálin um Evropeiska Samveldið

Sáttmálin um Evropeiska samveldið ella Maastricht-sáttmálin er tað støðið undir ES-samstarvinum, sum tað er víðkað og broytt síðani í 1952 (sí søguligt yvirlit í skjali 5A).

Maastricht-sáttmálin er settur saman av *felags reglum* ("yvirtromin") og reglum fyri tey einstøku málsøkini - eisini rópt *súlurnar* (sí mynd 5.2).

**MAASTRICHT-SÁTTMÁLIN UM EVROPEISKA SAMVELDIÐ**

**Innleiðandi ásetingar um m.a.**
* Høvuðsstevnumiðini hjá ES
  - Burðardygg búskaparlig menning
  - Arbeiði til allar hendur og búskaparligur og sosialur javni
  - Styrktur samleiki í altjóða samfelagnum við felags uttanríkis- og trygdarpolitikki
  - Samstarv í løgmálum
  - Virðing fyri subsidaritetsprinsippinum
* Felags stovnar: Evropeiska Ráðið setur kósina
* Virðing fyri nasjónala samleikanum í limalondunum og megin-regluni um demokratiska stýring

| | | |
|---|---|---|
| EF-sáttmálin (endurskoðaði Rómarsáttmálin), m.a. ásetingar um búskapar- og penga-politisku samgongu og um stovnarnar í ES | Ásetingar um felags uttanríkis- og trygdarpolitikk | Ásetingar um samstarv í rættar- og innanríkis málum |

**Endaligar ásetingar um m.a.**
- Mannagongd, tá sáttmálin skal broytast
- Treytir og mannagongd, tá nýggj lond skulu takast upp sum limir

*Mynd 5.2: Yvirlit yvir høvuðstættirnir í Maastricht-sáttmálanum*

**Felags reglur**

Felags reglur eru settar saman av innleiðandi og endaligum ásetingum. Tær innleiðandi snúgva seg m.a. um stovnsetingina av ES, stevnumiðini hjá ES, Evropeiska Ráðið og subsidaritetsprinsippið. Endaligu ásetingarnar eru m.a. ásetingar um broytingar í sáttmálanum og upptøku av nýggjum limalondum.

**Súlurnar**

Tey einstøku málsøkini ella súlurnar eru: Evropeiski Felagsskapurin (EF), Evropeiski kol- og stálfelagsskapurin (EKSF), evropeiski kjarnorkufelagsskapurin (Euratom), ásetingar um felags uttanríkis- og trygdarpolitikk og ásetingar um samstarv í rættarligum viðurskiftum og innanríkismálum. Í mynd 5.2 eru EF, EKSF og Euratom lagdir saman.

EF er tað størsta einstaka samstarvsøkið. EF-sáttmálin ella Rómarsáttmálin hevur ásetingar um borgararætt í samveldinum, um at kapitalur, vørur, tænastur og arbeiðsmegi hava frítt at fara, tollsamgongu, felags handilspolitikk, felags landbúnaðar- og fiskivinnupolitikk, flutning, búskapar- og pengapolitiska samgongu, reglur um kapping og almennan stuðul, fiskalar ásetingar, sosialpolitikk, útbúgving og gransking, mentan, heilsumál, brúkaravernd, transevropeiska netið, ídnað, regiónalpolitikk, umhvørvi og menningarsamstarv.

EKSF fevnir um reglurnar fyri felags marknað fyri kol- og stálframleiðslu, meðan Euratom eru reglurnar um nýtslu av kjarnorku til sivil endamál.

Samstarvið um rættar- og innanríkismál snýr seg um løgreglu- og rættarsamstarv og samstarv um flóttafólka- og asylpolitikk.

### 5.2.2 Stovnarnir í ES

**Evropeiska ráðið**

Evropeiska ráðið - eisini rópt toppfundurin - er sett saman av stats- ella stjórnarleiðarunum í limalondunum, umframt forsetanum í ES-nevndini. Ráðið kemur saman tvær ferðir um árið. Høvuðsuppgávan hjá Evropeiska ráðnum er at seta politisku kósina í ES. Formliga kann Ráðið ikki taka avgerðir. Tó er komið fyri, at tað hevur tikið bindandi avgerðir, t.d. í Edinburgh í desember 1992 í samband við Maastricht-sáttmálan og støðu Danmarkar.

**ES-ráðið**

ES-ráðið - samveldisráðið ella bert Ráðið -, sum fyrr varð rópt ráðharraráðið, er ovasti løggevandi myndugleiki í ES. ES-ráðið er sett saman av umboðum fyri stjórnirnar í limalondunum. Hvørji

stjórnarumboð møta, veldst um hvørji mál eru til viðgerðar. Í landbúnaðarmálum møta landbúnaðarmálaráðharrarnir, í fiskivinnumálum fiskimálaráðharrarnir osfr. Uttanríkismálaráðharrarnir úr limalondunum taka vanliga avgerð í týðandi málum. Í summum førum er ES-ráðið sett saman av stats- ella stjórnarleiðararunum.

Tá ES-ráðið tekur avgerðir, kann mannagongdin vera ymisk: Einmæli, vanligur meiriluti, har hvørt land hevur eina atkvøðu, ella kvalifiseraður meiriluti, har atkvøðurnar eru vigaðar eftir fólkatalinum í limalondunum (sí talvu 5.1). Sambært ES-sáttmálanum skulu flestu avgerðir í ráðnum takast við kvalifiseraðum meiriluta. Í summum førum krevst tó einmæli, m.a. um broytingar í greinum í ES-sáttmálanum, tilmæli um pengapolitikkin í limalondunum, endalig áseting av ECU-kursinum, broyting av mannagongdum, avgerðir um uttanríkispolitikk og verjupolitikk.

**ES-nevndin** ES-nevndin er ovasti umsitingarligi (útinnandi) stovnur í ES. Teir 20 limirnir í nevndini verða valdir av stjórnunum í limalondunum. Tey størstu londini velja tveir limir í part. Hini hava ein. Í arbeiði sínum eru limirnir í nevndini óheftir, við tað at teir ikki taka avgerðir vegna heimlandið, men vegna ES. Limirnar býta uppgávur og ábyrgdarøki sínámillum, men taka avgerðir og leggja uppskot fram í felag.

**Aðalstýrini** Umsitingin hjá nevndini er sett saman av deildum við hvør sínum málsøki - tey sonevndu aðalstýrini ella generaldirektoratini (DG I-XXIII).

**Umsitingar-nevndir** Tann fasta umsitingin í ES verður stuðlað av umsitingarnevndum fyri tey einstøku málsøkini. Hesar nevndir eru settar saman av embætisfólki úr limalondunum, umboðum fyri arbeiðsgevarar og fakfeløg í limalondunum. Umsitingarnevndirnar eru við í lógarfyrireikandi arbeiðinum við sakkunnleika, samstundis sum áhugamálini verða røkt.

**Evropatingið** Evropatingið er samansett av 625 umboðum, sum eru vald við beinleiðis vali í limalondunum. Tinglimirnir eru býttir millum limalondini í mun til fólkatalið. Tinglimirnir skipa seg í politiskar bólkar tvørtur um landamørk. Teir størstu bólkarnir eru sosialistar og kristiligir demokratar. Evropatingið skal takast við uppá ráð, tá formaðurin fyri ES-nevndini verður útnevndur, og skal góðkenna samansetingina av allari ES-nevndini. Harumframt hevur Evropatingið útnevnt sín egna umboðsmann, sum skal viðgera klagur frá fólki ella fyritøkum í limalondunum, í samband við óreglusemi ella

vansketni hjá ES-stovnum. Evropatingið hevur eisini týðandi uppgávur í samband við at hava eftirlit við hinum stovnunum. Evropatingið skal góðkenna fíggjarætlanina hjá ES.

**Dómstólurin** ES-dómstólurin skal ansa eftir, at aðrir stovnar í ES, stovnar, fyritøkur og einstaklingar í limalondunum halda ES reglurnar. Dómstólurin, sum hevur 13 limir, hevur ikki bert dømandi vald við støði í ES-lóggávuni (lógskipanir og direktivir), men hevur eisini lógartulkandi vald. Í teimum førum, har ES-lóggávan ikki hevur verið heilt greið, hevur dómstólurin við úrskurðum sínum í stóran mun verið lógarsmiður.

| Land | ES-ráðið. Atkvøðubýtið í málum, sum krevja kvalifiseraðan meiriluta | Evropatingið | Búskaparliga og sosiala nevndin og Regiónnevndin. |
|---|---|---|---|
| Belgia | 5 | 25 | 12 |
| Danmark | 3 | 16 | 9 |
| Týskland | 10 | 99 | 24 |
| Grikkaland | 5 | 25 | 12 |
| Spania | 8 | 64 | 21 |
| Frakland | 10 | 87 | 24 |
| Írland | 3 | 15 | 9 |
| Italia | 10 | 87 | 24 |
| Luksemborg | 2 | 6 | 6 |
| Niðurlond | 5 | 31 | 12 |
| Portugal | 5 | 25 | 12 |
| Bretland | 10 | 87 | 24 |
| Svøríki | 4 | 22 | 12 |
| Finnland | 3 | 16 | 9 |
| Eysturríki | 4 | 21 | 12 |
| Tilsamans | 87 | 626 | 222 |

*Talva 5.1: Umboðan hjá limalondunum í nøkrum ES-stovnum*

**Aðrir stovnar** Av øðrum stovnum skulu tveir nevnast. Hesir hava tó formliga ikki serliga stórt vald. Annar er Búskaparliga og sosiala nevndin (Ecosoc), meðan hin er Regiónnevndin.

*Búskaparliga og sosiala nevndin* hevur hoyringarrætt í samband við innmarknaðin, arbeiðsumhvørvi, útbúgving, ídnað og umhvørvi. Nevndin verður sett av ES-ráðnum fyri fýra ár í senn og skal vera óheft av limalondunum og røkja áhugamálini hjá ES. Nevndin er sett saman av umboðum fyri vinnufeløg í limalondunum.

*Regiónnevndin* hevur sama tal av umboðum sum Búskaparliga og sosiala nevndini. Umboðini í nevndina verða útnevnd av ráðnum eftir uppskoti frá limalondunum fyri fýra ár í senn. Nevndin er sett saman av umboðum fyri regiónalar og lokalar myndugleikar, sum í starvi sínum skulu vera óheft av áhugamálunum hjá limalandinum ella regiónini. Regiónnevndin er hoyringarstovnur í samband við Regiónalgrunnin, útbúgving (yrkisútbúgvingar undantiknar), mentan, fólkaheilsu og transevropeiska netið.

**5.2.3 Politiskur avgerðarrættur í ES**

Ein av treytunum fyri, at ES-samstarvið skal virka eftir ætlan, er, at lógarsmíð og umsitingarvald á týðandi málsøkjum verður flutt frá limalondunum til felagsstovnar í ES (Ráðið, Nevndin og Evropatingið). Skulu "tey fýra frælsini" gerast veruleiki og innmarknaðurin fáast at virka, er neyðugt, at stórir partar av lóggávuvaldinum verða miðsavnaðir ella samskipaðir í felags stovnar.

Myndugleikin hjá ES at taka avgerðir er grundaður á ES-sáttmálan. Á summum økjum liggur myndugleikin hjá ES einsamøllum - tann sonevndi felags politikkurin. Á øðrum økjum er myndugleikin býttur millum ES og limalondini. Og aftur á øðrum økjum liggur avgerðarrætturin hjá myndugleikunum í limalondunum. Ta tíð evropeiska samstarvið hevur virkað, hevur gongdin yvirhøvur verið tann, at ES hevur víðkað sítt heimildarøki, og felags politikkur er vorðin galdandi á alsamt fleiri økjum.

**Felags politikkur**

*Felags politikkur* ber í sær, at tað einstaka limalandið ikki kann reka sín sjálvstøðuga politikk. Í mun til ES-fíggjarlógina er felags landbúnaðarpolitikkurin tann mest týðandi. Harafturat hevur ES felags fiskivinnupolitikk, felags handilspolitikk og tollsamgongu við felags tollgjøldum. Ætlanin er eisini at skipa eina búskapar- og pengapolitiska samgongu við felags rentu- og gjaldoyrapolitikki.

**Blandaður avgerðarrættur**

Tá politiski *avgerðarrætturin er blandaður*, merkir hetta, at summar avgerðir verða tiknar av ES, meðan aðrar verða tiknar av teimum einstøku limalondunum, sum hava sín egna politikk á hesum økjum. Hetta er m.a. galdandi fyri skattir og avgjøld, útbúgving, gransking og umhvørvi. Meginreglan um, at ES-lóggávan skal hava forrættindi, merkir, at tann politikkur, limalondini seta í verk og reka, skal verða innanfyri lógarkarmarnar hjá ES. Á summum økjum krevst, at limalondini skulu leggja sínar politisku ætlanir fyri ES-nevndina til góðkenningar.

**Nasjónalur avgerðar-rættur**

*Nasjónalur avgerðarrættur* fevnir um øll tey øki, har tað ikki greitt er tilskilað, at ES hevur heimild at taka avgerðir. Hóast hesa meginreglu, so hava tær generellu reglurnar og lógarverkið á øðrum økjum stóra ávirkan á, hvørjar avgerðir tey einstøku limalondini kunnu taka. Eitt dømi er, at Maastricht-sáttmálin sigur, at lógarverkið hjá ES ikki skal leggja seg út í reglur um ognarrætt í limalondunum. Men samstundis leggur ES greiðar avmarkingar á, hvussu ognarrætturin verður framdur í verki. Reglur eru fyri almenn innkeyp, kapping, almennan stuðul, forboð móti at gera mannamun á egnum og útlendskum fyritøkum, forboð móti almennum monopolum osfr. Annað dømi er skattaálíkning. Persónsskattur er nasjónalt málsøki. Meginreglan um, at kapitalur hevur frítt at fara, skerjir hinvegin munandi um politiska rásarúmið í teimum einstøku limalondunum. Tey kunnu ikki sjálvstøðugt avgera, hvussu skattur skal leggjast á kapitalinntøkur.

**Triðjalond og ES**

Tað sum er umrøtt omanfyri, er galdandi fyri lond, sum eru limir í ES. Men lógarverkið og meginreglurnar hjá ES hava eisini stóra ávirkan á innihaldið í teimum avtalum, ES ger við triðjalond. Lond, sum hava tætt samstarv við ES, uttan at gerast limir, hava, alt eftir hvussu djúptøkt samstarvið er, verið noydd at laga seg til meginreglurnar í ES-lógarverkinum ella beinleiðis at yvirtaka partar av lógarverkinum í ES.

## 5.3 Avtaluformar og sjálvræði

Hvussu ávirka teir ymisku samstarvsformarnir sjálvsavgerðarrættin hjá Føroyum ?

Í hesum umfari skal ikki farast út í æsir við at sundurgreina, hvussu teir ymisku samstarvsformarnir ávirka sjálvræðið hjá luttakaralondunum. Í talvu 5.2 eru tó víst nøkur úrvald samfelagsøki, og hvussu samstarvsformarnir ávirka sjálvræðið hjá luttakaralondunum. Fyrsti teigur vinstrumegin vísir tey ymisku samstarvsøkini, meðan ovasta røðin vísir tær ymisku samstarvsformarnar - frá limaskapi til handilsavtalu við ES. Vavið á tillagingini veldst alt um, hvussu tætt tilknýtið verður.

| | *ES-limaskapur* | *EBS-avtala* | *Tollsamgonga* | *Handilsavtala sum ES-FR* |
|---|---|---|---|---|
| Landbúnaðar- og fiskivinnu-mál | ES-kompetansa | Nasjónal kompetansa | ES-kompetansa viðv. toll-spurningum | Nasjónal kompetansa |
| Oljuvinnumál | Eingin felags poli-tikkur, men mugu fylgja olju-direktivinum | Eingin felags poli-tikkur, men mugu fylgja olju-direktivinum | Nasjónal kompe-tansa. Ávirkar bert olju sum vøru | Nasjónal kompe-tansa. Ávirkar bert olju sum vøru |
| Kappingar-spurningar | ES-kompetansa | Felags kompetansa. ES-tillaging | Nasjónal kompe-tansa - men binda seg til ávísar reglur | Nasjónal kompe-tansa, men bindur seg til ávísar reglur |
| Fíggjar- og búskaparmál | Nasjónal kompe-tansa, men mugu halda seg innan ES-karmar | Nasjónal kompe-tansa | Nasjónal kompe-tansa | Nasjónal kompe-tansa |
| Toll og skatta-mál | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompe-tansa |
| Gjaldoyra-politikkur | Nasjónal kompetansa, ætlan um ES-kompetansu | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompetansa | ES onga ávirkan sum er, tó verða vit ávirkaði um DK fer við |
| Handils-politikkur | ES-kompetansa | Nasjónal kompetansa | ES-kompetansa í tollspurningum | Nasjónal kompe-tansa. |
| Almannamál | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompe-tansa |
| Útbúgving. Mentan | Nasjónal kompe-tansa. Skipað sam-starv | Nasjónal kompe-tansa, men skipað samstarv | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompe-tansa |
| Gransking | Nasjónal kompetansa, men skipað samstarv | Nasjónal kompetansa, men skipað samstarv | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompe-tansa |
| Umhvørvismál | ES-kompetansa | Nasjónal kompe-tansa. EFTA-londini mugu tó fylgja somu vøru-standardum sum ES | Nasjónal kompetansa | Nasjónal kompe-tansa |

*Talva 5.2: Ymiskir samstarvsformar og ávirkan teirra á politiska sjálvræðið hjá luttakaralondunum*

### 5.3.1 Ríkisrættarliga støða Føroya

Sum ríkisrættarliga støðan hjá Føroyum er, verða tað Føroyar saman við Danmark, sum verða avtaluparturin mótvegis ES. Danmark hevur formliga ræðið á uttanríkisviðurskiftunum fyri alt ríkið.

**EBS-avtala**

Á einum skala, har samskifti við ES spennir frá eini handilsavtalu, um tollsamgongu- og EBS-avtalu til limaskap, er tað greitt, at tá vit koma fram til EBS-avtaluleistin, er einasti møguleikin hjá okkum at fara um donsku stjórnina, tí ein EBS-avtala verður bert gjørd við sjálvstøðug lond.

**ES-limaskapur**

Í samband við møguligan føroyskan limaskap eru tað í fyrstu syftu tveir spurningar at fáa greiðu á: (1) Kunnu Føroyar gerast *limur* í ES? og (2) kunnu Føroyar gerast *partur* av ES?

**Kunnu vit gerast *limur* í ES?**

Við verandi ríkisrættarligu støðu okkara er svarið uppá fyrra spurningin eitt greitt *nei*. Føroyar eru í núverandi støðu ein partur av danska ríkinum, og ES hevur bert sjálvstøðug lond sum limir. Hetta merkir, at Føroyar bert kunnu fáa limaskap, um landið gerst fullveldi. Sjálvt um tað skuldi hent, so hevði tað verið ivasamt, um Føroyar høvdu kunnað vunnið fullan limaskap við øllum teimum rættindum og skyldum, sum hesin ber í sær, eitt nú umboðan í øllum liðum í ES, av teirri einføldu orsøk, at ES treyðugt vil integrera smátjóðir í teirra skipan.

**Kunnu vit gerast *partur* av ES?**

Svarið uppá seinna spurningin er *ja*. Tað stóð Føroyum í boði at fara upp í EF saman við Danmark í 1972. EF-sáttmálin grein 227, stk. 1 segði, at sáttmálin var galdandi fyri kongaríkið Danmark (Føroyar íroknaðar). Í somu grein stk. 5 a var tó tikið tað fyrivarni, at sáttmálin bert var galdandi fyri Føroyar, um danska stjórnin áðrenn 31. desember 1975 gav boð um, at sáttmálin eisini fevndi um Føroyar. Danmark og Føroyar avtalaðu, at boðini bert skuldu gevast, um Føroyar heittu á donsku stjórnina um at gera tað. Hesi boð komu ongantíð, tí løgtingið samtykti í 1974, at Føroyar skuldu standa uttanfyri. Grein 227 kom tískil at standa óbroytt, tá Maastricht-sáttmálanum varð undirskrivaður í 1992. Tá kom at standa í stk. 5. a: *Denne traktat finder ikke anvendelse på Færøerne.* Komið afturat er stk. 5d um Áland, ið er orðað á sama hátt sum stk. 5a um Føroyar í 1972.

Hetta vísir, at tað er møguligt hjá einum verandi ella komandi limalandi at koma við eini áheitan til ES, um at loyva einum sjálvstýrandi parti av limalandinum at koma upp í ES. Limalandið sum

so tekur við ES-lóggávuni við møguligum undantøkum fyri sjálvstýrandi partar av ríkinum.

### 5.3.2 Sjálvræði og millumlandamál

Tað er greitt, at sum partur av ES koma Føroyar at fáa minni ávirkan á egna lóggávu. Sum partur av ES mugu vit lata vald frá okkum til felags ES-stovnar.

Spurningurin, um Føroyar sum partur í ES koma at verða nærri bundnar at Danmark, so at vald á egnum viðurskiftum verður afturborið til Danmarkar, og nógv av tí, sum vunnið var við heimastýrislógini frá 1948, verður mist, er torførari at svara. Tað verður í stóran mun ein samráðingarspurningur millum Føroyar og Danmark.

Kortini vilja vit á uttanríkisøkinum formliga lata vald og ávirkanarmøguleikar aftur til danskar myndugleikar, tí í verandi ríkisrættarligu støðu eru tað teir, sum koma at umboða okkum í innanhýsis ES-samráðingum um nýggja ES-lóggávu.

Sambært grundlógini er tað kongur (stjórnin), ið virkar ríkisins vegna í millumlandamálum. Henda regla var eisini, áðrenn grundlógin varð broytt í 1953.

**Heimastýrislógin**

Við støði í heimastýrislógini hevur skipanin verið, at danska uttanríkismálaráðið stendur fyri samráðingunum um rammusáttmálar á øllum økjum. Uttanríkismálaráðið eigur samráðingarleiðaran, meðan umboð heimastýrisins hava ábyrgdina av innihaldinum í samráðingunum útvega tilfar og vita støðuna hjá føroysku myndugleikunum.

Árligu ella leypandi útfyllingini av fiskiveiðu- og handilsavtalum standa Føroyar sjálvar fyri. Í samráðingum við onnur lond enn Norðurlond er tó altíð umboð frá uttanríkismálaráðnum við, meðan føroyingar samráðast einsamallir við Norðurlond.

Um Føroyar gerast partur av ES, fer heimildin at samráðast um fiskivinnu- og handilsavtalur til ES-nevndina, har limalondini (í okkara føri Danmark) eftir ávísum reglum verða tikin upp í samráðingarnar. Hinvegin er einki til hindurs fyri, at Danmark og Føroyar við støði í tí lógargrundarlagi, sum skipar viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, halda fram við teirri siðvenju, sum hevur hevur verið nýtt higartil í uttanríkismálum. ~~Hetta merkir m.a.,~~

~~at uttanlandsnevndin (fyrrverandi marknaðarnevndin) og løgtingið fáa sama virkislut sum higartil.~~

### 5.3.3 Umboðan í ES

ES er sett saman av limalondum. Tí eru tað limalondini, sum fáa umboðan í ES-stovnum. ES hevur ongan felags politikk fyri lokalt sjálvstýri ella lokala og regiónala umsiting. Hetta hoyrir undir limalondini.

Fara Føroyar upp í ES sum partur av danska ríkinum sambært grein 227 í Rómarsáttmálanum, er spurningurin, hvussu Føroyar skulu umboðast í skipanini, eitt mál millum Danmark og Føroyar. Sum dømi kunnu vit hyggja at, hvussu tað var, tá Grønland var limur í ES, og hvussu Áland hevur fingið skipað síni viðurskifti við ES.

**Grønland**

Grønland hevði eitt umboð í ES-tinginum, ið Danmark læt teimum av sínum 16 umboðum. Grønland røkti síni áhugamál gjøgnum danska Grønlandsmálaráðið og seinni gjøgnum Danmarkarkontór heimastýrisins. Skipanin var ein *ad hoc* skipan, ið gav grønlendska embætisverkinum atgongd til umsitingarligar sernevndir í Danmark, ið viðgjørdu ES-mál. Eisini vóru grønlendskir politikarar og embætismenn við í donskum sendinevndum í ES, tá mál av grønlendskum áhuga vóru umrødd. Onkuntíð var grønlendskur fólkatingsmaður limur í marknaðarnevnd Fólkatingsins, men hetta var ein avtala millum flokkarnar á fólkatingi.

**Áland**

Áland er eitt annað dømi um sjálvstýrisøki í limalandi, ið er vorðið partur í ES við ávísum undantøkum frá ES-meginreglunum. Skipanin er eitt úrslit av samráðingum millum Áland og Finnland. Hóast álendingar ikki eru beinleiðis umboðaðir í ES, so tykjast teir sum heild nøgdir við polititisku og umsitingarligu umboðanina.

Annars er skipanin tann,

- at álendski ríkisdagslimurin er limur í *Stora Utskottet* í finska ríkisdegnum, sum kann samanberast við Uttanlandsnevnd Løgtingsins og Evropanevnd Fólkatingsins,
- at *Lantråden*, ið svarar til okkara løgmann, kann vera á fundi í finska statsráðnum, tá ES-spurningar eru fyri,
- at forstjórin í *Landsskapsstyrelsen*, ið svarar til landsstýrið kann vera á fundi í ES-nevnd mannað við finsku departementsstjórunum,
- at hvørt fakmálaráð tilnevnir ein embætismann at hava serliga umsjón við álendskum áhugamálum í ES, og

- at ein álendskur embætismaður - *ministerråd* - frá 1. juni 1995 verður settur við føstu umboðsstovuna hjá Finnlandi í ES at taka sær av álendskum áhugamálum. Hesin kann - eftir avtalu við finsku ríkismyndugleikarnar - umboða Áland í ES-skipanini einsamallur ella saman við finska umboðnum.

**5.3.4 Samandráttur**

Um Føroyar vilja fara upp í ES, eru í høvuðsheitum tvær leiðir at ganga. *Onnur* er at boða ríkisstjórnini frá, at vit ynskja at koma uppí. Ríkisstjórnin fer síðani saman við Føroyum at samráðast við ES um hetta. Hvussu Føroyar koma at verða umboðaðar í ES, er ein spurningur, sum Føroyar og Danmark mugu koma ásamt um, tí Føroyar kunnu bert umboðast gjøgnum Danmark ella við at fáa tillutað part í donsku umboðanini.

*Hin* er at loysa frá Danmark og søkja um limaskap sum sjálvstøðug tjóð við øllum skyldum og rættindum, eisini umboðan í ES-skipanini. Spurningurin er, um eitt lítið land sum Føroyar er áhugavert hjá ES at fáa sum lim. Tað kundi hugsast, at spurningurin kundi verið loystur við, at Føroyar fingu møti- og talirætt í øllum ES-stovnum, men ikki atkvøðurætt, men tað sampakkar ikki við ES-skipanina annars, og ivasamt, er um Føroyar høvdu ynskt eina slíka skipan.

# Skjal 5A: ES - søguligt yvirlit

1951 Evropeiski kol- og stálfelagsskapurin (EKSF) verður skipaður. Belgia, Frakland, Italia, Luksemborg, Niðurlond og Vestur-Týskaland skriva undir avtaluna, sum ber í sær, at tey í felag stýra kol- og stálframleiðsluni í Evropa.

1957 EKSF- londini gera sáttmála um Evropeiska búskaparliga felagsskapin (EEC) í tí sonevnda Rómarsáttmálanum. Samstundis verður avtalan um evropeiska kjarnorkufelagsskapin, Euratom, undirskrivað.

Endamálið við Rómarsáttmálanum er at fáa í lag eina tollsamgongu og felags marknað uttan toll- og handilsforðingar. Til tess at røkka hesum skal ein felags handils-, landbúnaðar- og flutningspolitikkur setast í verk. Miðast skuldi ímóti, at arbeiðsmegi, vørur, tænastur og kapitalur skuldu hava frítt at fara um landamørk.

1958 Rómarsáttmálin kemur í gildi.

1962 ES samtykkir felags landbúnaðarpolitikk.

1966 Fyrsta uppskotið um felags fiskivinnupolitikk verður lagt fram.

1967 Bretland, Írland og Danmark søkja um limaskap í ES.

Føroyar gerast limur í EFTA.

1968 Tollsamgongan í ES er komin at virka, við tað at allur tollur millum limalondini er tikin burtur. Mótvegis triðjalondum er felags tollgjøld.

Felags arbeiðsmarknaður, har arbeiðsmegi hevur frítt at fara, verður skipaður.

1970 Í juni verður farið undir upptøkusamráðingar við Bretland, Danmark, Írland og Noreg.

ES-londini fara undir at skipa felags uttanríkispolitikk, og politiska samstarvið í Evropa verður sett á stovn (EPS). Hetta var eitt samstarv millum lond um samskifti viðvíkjandi upplýsingum o.ø. og at hava felags støðu í altjóða málum.

Fyrsti felags fiskivinnupolitikkurin í ES verður samtyktur.

1972 Tey seks limalondini fara undir gjaldoyrasamstarv (slanguna).

Í januar verður upptøkusáttmáli undirskrivaður millum tey seks ES-londini og Bretland, Danmark, Írland og Noreg. Írland heldur fólkaatkvøðu um at fara uppí ES, og ein meiriluti sigur ja til limaskap. Bretska Undirhúsið avger, at Bretland skal fara uppí ES. Fólkaatkvøðan í Noreg endar við, at 53,5% siga nei til ES-limaskap. Í Danmark sigur fólkið ja til limaskap.

ES undirskrivar fríhandilsavtalu við tey EFTA-lond, sum ikki fara uppí ES (Ísland, Eysturríki, Portugal, Svøríki og Sveis).

1973 Sáttmálin um upptøku av Danmark, Írlandi og Bretlandi sum limir í ES kemur í gildi 1.januar. ES fevnir nú um 9 lond.

Føroyar fara úr EFTA saman við Danmark.

ES undirskrivar fríhandilsavtalu við Noreg.

1974 ES fær eygleiðarastøðu í ST.

Føroya Løgting samtykkir, at Føroyar skulu vera uttan fyri ES.

Handilsskipanin ~~Fríhandilsavtala~~ millum Føroyar og ES kemur í gildi.

1975 ES-ráðið samtykkir at stovna Evropeiska grunnin fyri regiónalari menning.

Fyrsta Lomé-konvensjónin verður undirskrivað millum ES og 47 menningarlond (AVS-londini).

Fólkaatkvøða í Bretlandi vísir, at tveir triðingar av fólkinum halda, at Bretland framhaldandi skal vera limur í EEC.

1976 Uppskot um ein nýggjan felags fiskivinnupolitikk verður lagt fram.

Ráðharraráðið mælir til, at Grikkaland verður knýtt at ES og fær eina tillagingartíð.

1977 Løgtingið samtykkir fiskiveiðusáttmálan við ES 4.mars. Sáttmálin verður undirskrivaður 15.mars, men kemur ikki formliga í gildi fyrrenn í mars 1981, tá hann verður góðkendur í ES.

Spania søkir formliga um limaskap í ES.

1978 Stjórnarleiðararnir í ES semjast um at stovna EMS í eini roynd at fáa tryggari gjaldoyrisviðurskifti í Evropa.

Farið verður undir upptøkusamráðingar við Portugal.

1979 EMS kemur í gildi. ES fær egna evropeiska pengingaeind, ECU. "Slangusamstarvið" endar.

Farið verður undir upptøkusamráðingar við Spania.

Fyrsta beinleiðis valið til Evropatingið verður hildið. Teir 518 limirnir í Tinginum verða beinleiðis valdir fyri eitt fimm ára tíðarskeið eftir valreglunum í teimum ymisku londunum. Miðal vallutøkan er 61%.

ES-dómstólurin ger úrskurð um, at ES í prinsippinum skal hava eksklusivan myndugleika at regulera fiskiskapin í ES-sjógvi.

Í oktober verður onnur AVS-EEC avtalan undirskrivað í Lomé.

1981 Grikkaland gerst limur í ES.

Onnur Lomé-konvensjónin kemur í gildi.

Fiskiveiðusáttmálin millum Føroyar og ES kemur formliga í gildi.

1982 ES-tingið ger í juli fundarsamtykt um stevnumiðini fyri broytingum í Rómarsáttmálanum og útinningini av Evropeiska Samveldinum.

1983 Eftir drúgvar og fløktar samráðingar samtykkir ES felags fiskivinnupolitikkin. Størsti trupulleikin undir samráðingunum var býti av fiskikvotum.

1984 Semja um at broyta landbúnaðarpolitikkin.

1985 ES-toppfundurin í Milano samtykkir Hvítbókina, sum ES-nevndin hevur lagt fram. Í Hvítbókini er m.a. ein ætlan um, hvussu Innmarknaðurin í ES skal setast í verk áðrenn árslok í 1992.

1986 1.januar gerast Spania og Portugal limir í ES, sum nú telur 12 lond.

1987 Evropeiska eindarskjalið verður ratifiserað. Hetta førir við sær, at Rómarsáttmálin verður broyttur. Stevnumiðið um at fáa Innmarknaðin at virka innan 31.12.92 er ein partur av eindarskjalinum. Skjalið førir eisini við sær, at í atkvøðugreiðslum krevst bert kvalifiseraður meiriluti fyri at samtykkja mál. Reglan um einmæli er tó framvegis galdandi fyri mál, sum verða mett at hava grundleggjandi týdning.

1989 Eftir áheitan frá ES-nevndini verður í mars farið undir samráðingar um ~~nýggja~~ handilsavtalu millum Føroyar og ES.

1991 ES-nevndin leggur fram frágreiðing um støðuna í og útlitini fyri felags fiskivinnupolitikkin.

Handilsavtalan millum Føroyar og ES verður undirskrivað í juni.

1992 Handilsavtalan millum Føroyar og ES kemur í gildi 1.juni.

Fiskivinnupolitikkur í ES verður endurskoðaður. Ongar grundleggjandi broytingar henda.

ES og EFTA undirskriva sáttmálan, sum leggur lunnar undir Evropeiska Búskaparliga Samstarvið, EBS. EFTA-londini gerast partur av Innmarknaðinum í ES (fiskivinna og landbúnaður undantikin).

Danir siga nei til Maastricht-sáttmálan við fólkaatkvøðu í juni.

Danska stjórnin leggur í oktober fram eina "hvítbók" um Danmark og Maastricht-sáttmálan. Nakrar vikur seinni semjast sjey av flokkunum um eitt memorandum *Danmark i Europa* ella *nasjónala neyðsemjan* sum grundarlag fyri tingingum millum Danmark og hini limalondini.

Evropeiska Ráðið heldur fund í desember í Edinburgh. Tey 12 londini semjast um leiklut Danmarkar í tí víðari samstarvinum og donsku krøvini um meira "opinleika og nærleika" í Samveldinum.

EMS-samstarvið skrædnar.

1993 Í mei tekur ein meiriluti av donsku veljarunum undir við Maastricht-sáttmálanum og teimum nærri ásetingunum, sum galda fyri Danmark í Edinburgh-semjuni.

Sáttmálin um Evropeiska Samveldið (Maastricht-sáttmálin) kemur í gildi 1.november.

Farið verður undir limaskapssamráðingar við Noreg, Svøríki, Eysturríki og Finnland í apríl.

Á fólkaatkvøðu í november sigur ein meiriluti av norska fólkinum nei til, at Noreg fer uppí ES.

1994 Svøríki, Finnland og Eysturríki gerast limir í ES, sum nú telur 15 limir.

# Skjal 5B: Um støðu Álands í ES

**Stýrisskipan Álands**

Áland hevur síðani 1921 havt eitt slag av heimastýri í finska ríkinum. Grundarlagið undir hesum ynski var ikki at gerast sjálvstøðug tjóð, men at varðveita álendingar sum svenskan fólkabólk. Fyrst í hesi øld var ynski álendinga at gerast partur av Svøríki.

Eftir fyrra heimsbardaga avgjørdi altjóða samfelagið, at Áland skuldi gerast partur av finska ríkinum, men at tey í avtalu og eini serligari sjálvstýrisskipan innan finska ríkið skuldu tryggjast mentunarligt frælsi sum svenskur fólkabólkur.

Galdandi sjálvstýrisskipan Álands í finska ríkinum er ásett við finskari ríkislóg, sum kom í gildi 1.januar 1993. Hóast formurin er øðrvísi, so minnir hendan lógin innihaldsliga nógv um føroysku heimastýrisskipanina. Lóggávuvaldið er býtt millum álendska *lagtinget* og finska ríkisdagin, næstan á sama hátt sum millum Løgtingið og Fólkatingið.

Ein munur er tó, at Áland í minni mun enn Føroyar hevur valt at átaka sær lóggávuvald og hevur latið ríkismyndugleikarnar taka sær av størri parti av umsitingini á Álandi.

Hetta merkir, at *Landsskapsstyrelsen* (stjórn) og *Lagtinget* hava átikið sær færri umsitingarligar og lóggevandi skyldur enn føroyska heimastýrið. Her kann m.a. nevnast, at Áland saman við Finnlandi kann gera handilsavtalur, men hevur kortini ikki brúkt hendan møguleika. Áland hevur heldur ikki átikið sær at skipa sín egna fiskivinnupolitikk ella gera fiskivinnuavtalur við onnur lond, men hevur latið ríkismyndugleikarnar tikið sær av hesum.

Harumframt er Áland ikki sjálvstøðugt toll- og skattaøki, tvs. at skatta- og tolllóggávan er ríkismál og fylgir finskum lógum. Lóggávan og umsitingin av partafelagsskráseting, skipaskráseting o.ø. eru somuleiðis finsk málsøki.

**Skipan Álands í ES**

Støða Álands mótvegis ES er tengd at støðuni hjá Álandi í finska ríkinum. Uttanríkismál eru ríkismál, og tað er sostatt finska stjórnin, sum tekur sær av álendskum uttanríkismálum. Sjálvstýrislógin ásetur tó, at hetta skal fara fram í neyvum samstarvi við heimastýrið.

Hendan serliga skipan hjá Álandi endurspeglast bæði í EBS-sáttmálanum, har Áland var við sum partur av finska ríkinum, og í ES-sáttmálanum og upptøkusáttmálunum hjá Finnlandi.

Í finska upptøkusáttmálanum verður í grein 28 sagt, at í grein 227, stk.5 í ES-sáttmálanum skal nýggjur setningur setast inn um, at sáttmálin ikki er galdandi fyri Áland. Tó kann finska stjórnin saman við ratifikasjónini av upptøkusáttmálanum boða frá, at ES-sáttmálin

eisini skal verða galdandi fyri Áland. Hetta merkir í fyrsta lagi, at Áland kemur at hava serskipan eftir avtalu millum Finnland og Áland, og í øðrum lagi, at tað framhaldandi verður stjórn Finnlands, sum tekur sær av samskiftinum við umheimin, íroknað umboðan í og samskifti við ES.

Gongdin í ES-málinum hevur verið, at finska stjórnin og heimastýrið á Álandi samdust um, at stjórnin vegna ríkið skuldi søkja um limaskap í ES. Somuleiðis var semja um, at fólkaatkvøða skuldi verða í báðum ríkispørtunum um úrslitið av upptøku-samráðingunum. Áland var umboðað í finsku samráðingarnevndini, sum undir samráðingunum talaði søk álendinga um undantøk o.a.

**Fólkaatkvøða um limaskap**

Finnland og Áland høvdu fólkaatkvøðu hvør sær. Finnland atkvøddi fyrst. Av tí at tað er finski parturin av ríkinum, sum hevði heimildir at binda seg úteftir, hevði eitt nei í Finnlandi gjørt, at ein fólkaatkvøða í Álandi hevði onga meining. Áland kundi ikki einsamalt gerast limur í ES. Báðir ríkispartarnir atkvøddu ja. Áland við 73,6 prosentum fyri. Síðani samtyktu finski ríkisdagurin og álendska løgtingið at ratifisera limaskapssáttmálan fyri alt ríkið.

**Undantøk fyri Áland**

Áland er í dag partur av finska limaskapinum í ES. Við heimild í grein 227 í ES-sáttmálanum og eini serligari finskari yvirlýsing um Áland er Áland við í ES undir somu treytum sum Finnland, tó við teimum undantøkum sum eru ásett í protokoll 2 í upptøku-sáttmálunum.

*Protokoll 2 om Åland*
*Med hänsyn till Ålands särställning enligt folkrätten skall de fördrag som ligger till grund för Europeiska unionen omfatta Åland med följande undantag:*

*Artikel 1*
*Bestämmelserna i Romfördraget skall inte hindra att de bestämmelser om Åland tillämpas som är i kraft den 1 januari 1994 och som gäller*

- *inskränkningar, på icke-diskriminerande grund, i rätten för fysiska personar som inte har hembygdsrätt på Åland samt för juridiska personer att förvärva och inneha fast egendom på Åland utan tilstånd av Ålands behöriga myndigheter,*
- *inskränkningar, på icke-diskriminerande grund, i etableringsrätten och i rätten att tillhandahålla tjänster för fysiska personer som inte har hembygds-rätt på Åland eller för juridiska personer utan tillstånd av de behöriga myndigheterna på Åland.*

*Artikel 2*

a) *Ålands territorium - som skall anses vara ett tredje land enligt artikel 3.1 tredje strecksatsen i rådets direktiv 77/388/EEG, i direktivets lydelse efter ändringar, och ett sådant nationellt område som inte omfattes av de direktiv om punktskatteharmonisering som avses i artikel 2 i rådets direktiv*

*92/12/EEG - skall inte omfattas av EG-bestämmelser om harmonisering av medlemsstaternas lagstiftning om omsättningsskatt, punktskatt och annan indirekt skatt. Detta undantag skall inte återverka på gemenskapens egna intäkter.*

*Denna punkt skall inte gälla de bestämmelser om skatt på kapital som finns i rådets direktiv 69/335/EEG, i direktivets lydelse efter ändringar.*

*b) Detta undantag syftar till att bevara en livskraftig åländsk ekonomi och skall inte återverka negativt på unionsintressena eller unionens gemensamma politik. Om kommissionen skulle finna att det inte är motiverat att behälla de bestämmelser som finns i punkt a, särskilt med tanke på sund konkurrens och egna intäkter, skall kommissionen förelägga rådet ändamålsenliga förslag som rådet skall besluta om i enlighet med tillämpliga bestämmelser i Romfördraget.*

*Artikel 3*
*Finland skall se till att alla fysiska och juridiska personer i medlemsstaterna likabehandlas på Åland."*

ES hevur sostatt fingið ein nýggjan lim - finska lýðveldið, sum fevnir um Finnland og Áland. Finska lýðveldið hevur 3 atkvøður í Evropeiska Ráðnum, 16 limir í Evropatinginum, 1 kommisser, og er annars umboðað í føstum nevndum eftir nærri ásettum reglum. Áland hevur ikki sjálvstøðuga umboðan í ES.

Finnland og Áland hava tá samráðst seg fram til eitt innanhýsis býti av umboðum í ES-skipanini.

Áland ynskti sær umboð í Evropatingið, men longu frá byrjan var greitt, at hetta bert læt seg gera, um eitt umboð var tikið burtur av finsku umboðanini. Hesum noktaði finska stjórnin, og lítið bendir á, at hetta verður broytt. Álendingar hava tó tikið málið uppaftur innanríkis.

Finska stjórnin hevur hinvegin játtað, at álendska løgtingið kann útnevna eitt av teimum nýggju umboðunum í Regionalnevndina hjá ES. Hendan nevnd er sett saman av umboðum fyri regiónalar og lokalar myndugleikar í limalondunum. Nevndin er ráðgevandi og hevur rætt at úttala seg og koma við tilmælum í øllum málum, sum hava beinleiðis týdning fyri økispolitikkin í ES.

Áland tilnevnir og lønir egnum embætismanni, sum talar søk Álands við føstu finsku umboðanini í ES. Formliga ber hann heiti *ministerråd* og er undir finska sendiharranum við ES í Brússel. Álendski embætismaðurin hevur sjálvstøðugan rætt at føra fram álendskar spurningar í ES-umsitingini eftir avtalu við finska sendiharran.

Innanhýsis í finska ríkinum hava ríkispartarnir gjørt av, at bæði politiska og umsitingarliga leiðsla Álands verður umboðað á hægsta stigi í finsku skipanini.

Áland eigur eitt umboð í finska ríkisdegnum. Hetta umboð hevur rætt at møta á fundum í *stora utskottet*, tá mál av álendskum áhuga eru fyri. Hendan nevnd svarar á leið til ES-nevndina hjá danska fólkatinginum.

*Lantråden*, sum svarar til okkara løgmann, kann luttaka á stjórnarfundum, tá ES mál eru til viðgerðar, og annar í ráðharranevndum, tá ES-mál eru fyri har.

Forstjórin í álendska *landsskapsstyrelsen*, sum svarar til landsstýrisumsiting okkara, kann somuleiðis luttaka á fundum í eini serligari ES-nevnd, sum er mannað við stjórunum fyri ráðharrastovurnar í umsitingini. Hetta er hægsta embætisstig í ES málum í finsku umsitingini.

Harafturat er embætismaður í øllum teimum finsku ráðharrastovunum, sum hevur sum uppgávu at samskifta við avvarðandi umsiting í Álandi um ES-spurningar.

Samanumtikið kann sigast um umboðan Álands, at hon er eitt úrslit av samráðingum millum ríkispartarnar um støðu Álands í ES og við delegasjón frá finsku stjórnini til heimastýrið í Álandi.

# KAP. 6 Fiskivinna

## 6 .1 Fiskivinnupolitikkurin í ES

### 6.1.1 Inngangur

ES-londini hava felags fiskivinnupolitikk. Hóast limalondini framvegis hava myndugleika á summum økjum, so merkir felags fiskivinnupolitikkurin, at limalondini hava latið felags stovnum í ES avgerðarrættin í nógvum týðandi fiskivinnuspurningum.

Felags fiskivinnupolitikkurin í ES fevnir um tríggjar høvuðstættir:

* Fiskiveiðupolitikkin
* Marknaðarpolitikkin
* Bygnaðarpolitikkin

Niðanfyri verða hesir tættir lýstir nærri. Høvuðsdentur verður lagdur á meginreglurnar, tað vil m.a. siga tað, sum er útgangsstøðið hjá ES í upptøkusamráðingum. Síðani verður komið inn á royndirnar við felags fiskivinnupolitikkinum.

### 6.1.2 Løgfrøðiliga støðið

Rómarsáttmálin, sum legði lunnar undir tað, sum í dag er ES, sigur, at limalondini skulu hava felags landbúnaðarpolitikk. Felags fiskivinnupolitikkurin er ein partur av landbúnaðarpolitikkinum.

Tær nærri ásetingarnar í fiskivinnupolitikkinum eru at finna í fimm grundlógskipanum, sum snúgva seg um stovnsrøkt, tekniskar reglur, eftirlit, marknaðarskipan og bygnaðarpolitikk.

### 6.1.3 Myndugleiki

Býtið av myndugleika í fiskivinnumálum millum ES og limalondini er hetta:

*Evropasamveldið:*

- Samráðingar við triðjalond um veiðurættindi, áseting av MLV og kvotum fyri felagsstovnar o.a.
- Áseting og tilluting av kvotum til limalondini
- Tekniskar reguleringar: Meskastødd, minstamát, hjáveiða o.a. Stonging av leiðum, friðing av gýtingarleiðum o.a.
- Eftirlit: veiðudagbók, veiðufráboðan o.a.

- Marknaðarskipanin
- Karmarnir um tilluting av bygnaðarstuðli til limalondini

*Limalondini:*

- Innanhýsis býti av tillutaðari kvotu frá ES
- Nasjónalar fiskiloyvisskipanir
- Reguleringar av lokalum fiskastovnum
- Bráðneyðug tiltøk fyri at verja fiskastovnar innan fyri 200 fj.
- Strangari reguleringar fyri egnar fiski- og útróðrarmenn í egnum havøki ella øðrum fiskileiðum enn tær, sum ES ásetir
- Eftirlit við egnum fiskiførum, fiskiførum úr øðrum limalondum og triðjalondum á egnum fiskileiðum
- Kvotueftirlit fyri egin fiskifør í ES-sjógvi
- Stuðulsveitingar til fiskivinnuna innan fyri karmar Rómarsáttmálans

### 6.1.4 ES-Dómstólurin og fiskivinnan

Mótsett nasjónalum dómstólum hevur ES-Dómstólurin stóra ávirkan á gongdina í fiskivinnupolitikkinum. Uppgávan hjá dómstólinum er generelt at velja ta tulking av felagsskapsrættinum, sum á effektivasta hátt ger, at stevnumiðini í Rómarsáttmálanum verða rokkin, og at tættari samband fæst millum limalondini.

Í fiskivinnuspurningum hevur dómstólurin tikið fleiri týðandi avgerðir. Eitt dømi er, at dómstólurin í 1979 staðfesti, at stýringsmyndugleikin í fiskiveiðumálum liggur hjá ES. Annað dømi er úrskurðurin í tí sonevnda kvotuhoppanarmálunum. Hesi mál snúðu seg um, hvørjar treytir eitt limaland kann seta fyri skráseting og rakstri av fiskiførum. Málið varð tikið upp, eftir at sponsk útgerðarfeløg høvdu keypt bretsk fiskifør, mannað tey við sponskum fiskimonnum og fiskað av bretskum kvotum. Royndir breta at støðga hesi mannagongd við strangari reglur um manningar-, ognarviðurskifti o.a., helt dómstólurin vera í stríð við meginreglurnar um, at kapitalur skal hava frítt at fara um landamørk í ES.

### 6.1.5 Fiskiveiðupolitikkurin

#### Gildi og endamál

Støðið undir verandi fiskiveiðupolitikki í ES varð lagt eftir fløktar samráðingar í tíðarskeiðnum 1976-83. ES-londini samtyktu í 1983 karmarnar um tann fiskiveiðupolitikk, sum framvegis er grundar-

lagið fyri fiskiveiðustýringini í ES. Politikkurin varð endurskoðaður í 1992, men uttan at grundleggjandi broytingar vórðu gjørdar. Fiskiveiðustýringin í dag fevnir framvegis um teir fýra høvuðstættirnar:

- atgongd til fiskileiðir
- fiskikvotur
- tekniskar veiðureguleringar
- eftirlitsskipanir

Felags fiskiveiðupolitikkurin fevnir um troytan av livandi tilfeingi í sjónum og havbúnað. Hann er galdandi fyri tey sjóøki sum liggja innan fyri rættardømið hjá limalondunum og veiðumøguleikarnar hjá ES í triðjalands sjógvi.

Endamálið við felags fiskvinnupolitikkinum er at verja og varðveita livandi tilfeingið í sjónum og at troyta og gagnnýta tað burðardygt á skilabesta hátt, búskaparliga og samfelagsliga. Dentur skal leggjast á sambandið millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum. Somuleiðis skal dentur leggjast á áhugamál fiski- og útróðrarmanna, eins og tørv brúkaranna.

**Atgongd til fiskileiðir**
Longu í 1970 varð ásett, at ES-borgarar skuldu hava javnbjóðis rætt til fiskileiðirnar í ES-sjógvi. Hendan grundreglan er seinni staðfest bæði í lógarverki og úrskurðum hjá dómstólinum. Men hetta merkir tó ikki, at øll hava frítt at fara á fiskileiðunum hjá ES.

Í *fyrsta* lagi tí, at frí atgongd ikki merkir, at limalondini kunnu fiska frítt allastaðni. Av fiskastovnum, sum eru MLV-reguleraðir og kvotur býttar út á limalondini, kunnu fiskifør bert fiska, um flaggstaturin hevur fingið tillutaða kvotu av viðkomandi fiskaslagi. Sostatt kunnu fiskifør úr limalondum, sum ikki hava fingið kvotur, bert fiska eftir ókvoteraðum fiskasløgum ella stovnum, har MLV ikki er býtt út til limalondini. Í dag er MLV/kvotur ásettar fyri nærum allar fiskastovnar av vinnuligum áhuga.

Í *øðrum lagi* eru nøkur undantøk í ES-lóggávuni, ið avmarka møguleikarnar á ávísum leiðum í ES-sjógvi: Strandaleiðirnar 12 fj. úr landi, kassar (við serligari fiskiloyvisskipan), umframt ein felags fiskiloyvisskipan.

**Strandaleiðir** Í samband við, at Bretland, Írland og Danmark komu uppí ES í 1973, varð ásett eitt undantak frá meginregluni um, at ES-fiskifør høvdu

frítt at fara í ES-sjógvi. Limalondini fingu í eitt 10-ára-skeið heimild at regulera fiskiskapin innan fyri 12 fjórðingar. Í januar 1983 varð skipanin longd til at galda til 1992. Tá fiskiveiðupolitikkurin varð endurskoðaður í 1992, varð avgjørt, at skipanin skuldi halda fram til 2002. Avmarkingarnar á hesum leiðum hava til endamáls at verja útróðurin. Skipanin er serliga ætlað landspørtum, sum hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu.

**Kassar**

Í fiskiveiðupolitikkinum hjá ES er ein kassaskipan. Endamálið er lutvíst at verja fiskistovnarnar móti ávísum fiskiskapi og lutvíst at halda ymisk sløg av reiðskapi atskild. Eitt dømi er kassin í Írska havinum, har sponsk og portugisisk fiskifør ikki sleppa at royna fyrrenn eftir 1996. Annað dømi er Hetlandskassin, sum avmarkar talið á skipum omanfyri ávísa støðd á leiðunum við Hetland og Orknoyggjar. Endamálið við Hetlandskassanum er at regulera fiskiskapin eftir botnfiskasløgum, sum hava serliga týdning fyri økið, og sum eru lívfrøðiliga viðbrekin. Fyri fiskifør omanfyri 26 m krevst serligt fiskiloyvi til at royna í Hetlandskassanum. Skipanin fevnir í dag um 128 fiskiloyvi (UK 62, Frakland 52, Týskland 12 og Belgia 2).

Sambært fiskiveiðulógskipanini eru bæði strandaleiðirnar og kassarnir fyribilsskipanir. Áðrenn árslok í 2001 skal ES-nevndin koma við eini frágreiðing um støðuna í fiskivinnuni, har serligur dentur skal leggjast á búskaparligu og samfelagsligu støðuna í økjum, har fiskivinna er høvuðsvinna. Við støði í hesi frágreiðing skal ES-ráðið í 2002 taka støðu til, hvørjar tillagingar eru neyðugar, serliga við atliti at Hetlandskassanum og skipanini við strandaleiðum.

Sjónarmiðið hjá flestu limalondum er, at tað er torført at ímynda sær eina skipan uttan slíkar strandaleiðir. Írland og UK hava skotið upp, at ES longu nú eigur at gera av, at 12 fj. verður ein generell meginregla. Danmark hevur sínumegin mælt til, at ein serlig skipan verður fyri leiðirnar innan fyri 12 fj., har útróðurin fær sersømdir við tiltøkum, sum byggja á reguleringshættir, sum t.d. skipastødd, reiðskap o.a.

**Felags fiskiloyvisskipan**

ES-nevndin hevur í nøkur ár arbeitt við at seta í verk eina felags fiskiloyvisskipan í eini roynd at fáa betri tamarhald á veiðuorkuni. ES-ráðið samtykti í desember 1992, at ein felags fiskiloyvisskipan skuldi setast í verk í seinasta lagi 1.januar 1995.

**Felags kvotuskipanin**
Ein partur av uppskotinum um felags fiskivinnupolitikk, sum ES-nevndin legði fram í 1976, var ein kvotuskipan fyri fiskatilfeingið hjá ES. Tað var serliga býtið av kvotum, sum var orsøkin til tær fløktu samráðingarnar tey seks árini 1976-83. Men í 1980 samtykti ES-ráðið í 1980 tær meginreglur, kvotubýtið millum limalondini skuldi grundast á:

* Søgulig veiðutøl (1973-78)
* Tann týdning fiskivinnan hevur fyri lond/landspartar
* Mist veiðurættindi vegna fiskimarksútflytingar hjá 3.londum

**Relativur stabilitetur**

Endamálið við kvotubýtinum er at tryggja limalondunum *relativt stabil* veiðurættindi. Grundreglan um relativan stabilitet merkir, at hvørt limaland fær ein fastan prosentpart av ES-heildarkvotuni sambært tí býtislyklinum, sum ES-londini á fyrsta sinni komu ásamt um í 1983.

ES-ráðið ásetir hvørt ár mest loyvdu veiðu (MLV) fyri teir fiskastovnar í ES-sjógvi, sum hava vinnuligan týdning. MLV verður ásett eftir uppskoti frá ES-nevndini. Grundarlagið fyri til MLV eru tilmæli frá millumtjóða havrannsóknarráðnum ICES. Tá uppskotið um kvotur verður evnað til, ráðførir nevndin seg við fakligan kunnleika og við umboð fyri vinnuna. MLV verður ásett fyri hvønn einstakan fiskastovn. ES-heildarkvotan verður síðani býtt millum limalondini eftir býtislyklinum frá 1983. Í teimum einstøku londunum er tað upp til myndugleikarnar har at avgera, hvat verður gjørt við tillutaðu kvotuna, hvussu hon verður býtt millum egnar fiskimenn osfr.

Felags kvotuskipanin í ES hevur samanumtikið havt stórar trupulleikar. Tað hevur verið torført at fingið skipanina at virka eftir ætlan, serliga tí at støðan hjá fiskastovnum hevur verið og er so vánalig. Trýstið á kvotuskipanina gerst heldur ikki minni av, at veiðuflotin í ES sambært ES-nevndini er eini 40 prosent ov stórur.

**Nasjónalar veiðureguleringar**
Sum nevnt, er myndugleikin í kvotumálum í ES í tveimum: *Samveldið* ásetir MLV fyri fiskastovnar í ES-sjógvi og býtir av MLV millum limalondini sambært tí fasta %-vísa býtislyklinum. *Limalondini* avgera sjálvi, hvussu tillutaðar heildarkvotur verða býttar innlendis. Fyri at lýsa hetta nærri skulu Danmark og Bretland nýtast sum dømi.

**Donsk fiskiveiðustýring**

Í prinsippinum er tað Fólkatingið, sum stingur út í kortið í fiskiveiðureguleringum í Danmark, men fiskimálaráðharrin hevur heimild at seta í gildi nýggjar reglur uttan fyrst at ráðføra seg við Fólkatingið. Í lógarverkinum er kortini ásett, at fiskimálaráðharrin skal ráðføra seg við vinnufeløgini, tá kunngerðir o.a. verða evnaðar til.

Í danskari fiskiveiðustýring verða fleiri sløg av reguleringshættum nýttir. Heildarkvoturnar, sum Danmark fær tillutaðar sambært býtislyklinum í ES, verða býttar í kvartalskvotur, har fiskiskapurin hjá tí einstaka farinum verður reguleraður við "veiðuratiónum" fyri eina viku, 14 dagar ella mánað. Í onkrum fiskiskapi fáa førini tillutaða somu "veiðuratión" uttan mun til skipastødd, meðan kvoturnar aðrastaðni verða ásettar eftir longdini á fiskifarinum. Danska skipanin er sostatt eitt slag av egnum, óumsetiligum kvotum, har kvotur verða tillutaðar fiskiførum fyri styttri tíðarskeið í senn. Verður kvotan ikki fiskað í hesum tíðarskeiði, missir fiskifarið kvotuna.

Í Danmark krevst fiskiloyvi. Harumframt koma danskir fiskimenn undir felags teknisku reguleringarnar í ES.

**Bretsk fiskiveiðustýring**

Í Bretlandi hava produsentfeløgini ella PO'irnar ein týðandi leiklut í *the sectoral quota system*. Hendan skipan er grundvøllurin í bretskari veiðustýring. Eini 90 prosent av kvotunum fara um skipanina. Skipanin virkar soleiðis, at Fiskimálaráðið eftir umsókn tillutar produsentfeløgunum kvotur. Kvoturnar verða vanliga ásettar sum prosentpartar av samlaðu bretsku kvotuni, grundað á virksemi hjá limunum í produsentfeløgunum undanfarna ár. Teir fiski- og útróðrarmenn, sum standa uttanfyri produsentfeløgini, fáa kvotu tillutaða uppá gamla mátan, tvs. beinleiðis frá fiskimálaráðnum sum viku- ella mánaðarkvotur.

**Hetland sum dømi**

Eins og í flestu øðrum ES-londum vórðu bretsku kvoturnar fyrr tillutaðar hetlendskum fiskiførum sum viku- ella mánaðarkvotur. Av tí at kvoturnar upprunaliga vóru umsitnar av fiskimálaráðnum í London, varð tað sambært formanninum í hetlendska fiskimannafelagnum John Goodlad ofta ikki hugsað so nógv um serligar regiónalar umstøður og frábrigdi (flotasamanseting, veiðumynstur o.s.fr). Skipanin var tí tung og tvørlig. Tað bar t.d. ikki til at broyta skipakvotur vegna uttanífrá komandi umstøður (veður og vindur, marknaðar- og søluviðurskifti). Tí varð hildið neyðugt at finna alternativar skipanir. Úrslitið varð, at bretskir myndugleikar í 1984, sum eina royndarskipan, lótu *The Shetland Fish Producer Organization*

*Ltd* umsita hetlandsku hýsukvotuna. Royndarskipanin var væleydnað, og vinnan tók væl undir við henni. Hetta gjørdi, at aðrar PO'ir í Bretland fingu áhuga fyri skipanini. Úrslitið varð, at myndugleikarnir so við og við víðkaðu skipanina til eisini at fevna um onnur fiskasløg og landspartar. Til dømis umsat hetlendska produsentfelagið í 1986 toska-, hvítings-, upsa-, silda- og makrelkvoturnar umframt hýsukvotuna. Í 1990 vóru sum nevnt meira enn 90 prosent av bretsku kvotunum undir skipanini.

**Støðan hjá fiskastovnunum**

**Ovfisking**

Talva 1 vísir støðuna hjá MLV-reguleraðu fiskastovnum í ES-sjógvi. Av yvirlitinum sæst, at í 1990 vóru 46 av teimum 65 stovnunum, sum neyvur kunnleiki var um, fult troyttir ella hart troyttir.

| Fiskaslag | Áðrenn 1983 | | | | | 1990 | | | | | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | L | T | H | O | V | L | T | H | O | V | |
| Sild | | 2 | 5 | | | | 6 | 1 | | | 7 |
| Brislingur | 1 | | 1 | | 2 | 1 | | | 1 | 2 | 4 |
| Ansjós | | | | | 2 | | | | | 2 | 4 |
| Laksur | | | 1 | | | | | | 1 | | 2 |
| Toskur | | 3 | 5 | | | | | 6 | 2 | | 8 |
| Hýsa | | | 4 | | | | | 3 | 1 | | 4 |
| Upsi | | 2 | | | 1 | | | 2 | | 1 | 3 |
| Lýrur | | | | | | 3 | | | | 3 | 6 |
| Hvítingsbróður | | | 1 | | | | | 1 | | | 1 |
| Svartkjaftur | 1 | | | | 1 | 1 | | | | 1 | 2 |
| Hvítingur | | | 5 | | | | | 5 | | 2 | 7 |
| Lýsingur | | | 2 | | | | | 2 | | | 2 |
| Rossamakrelur | 1 | | 1 | | | 1 | | 1 | | | 2 |
| Makrelur | 1 | | 1 | | | | 1 | 1 | | | 2 |
| Reyðsprøka | | 3 | 5 | | | | 1 | 7 | | | 8 |
| Tunga | | 7 | 1 | | 1 | | 1 | 7 | | 1 | 9 |
| Stórikjaftur | | | | | 3 | | 3 | | | | 3 |
| Havtaska | | | | | 3 | | | 3 | | | 3 |
| Krabbadýr | | | | | 6 | 1 | 2 | 3 | | | 6 |
| Tilsamans | 4 | 17 | 32 | 0 | 24 | 4 | 15 | 41 | 5 | 12 | 77 |

L: Lítið troyttir; T: Fult troyttir, H: Hart troyttir; O: Ovfiskaðir; V: Ókent. Heimild: ES-nevndin 1991

*Talva 6.1: Tal av fiskastovnum og "nýtslustig" áðrenn 1983 og í 1990*

Tað eru serliga toska- og hýsustovnarnir í Norðsjónum, sum eru illa fyri. Støðan er alsamt versnað síðani 1983. Í 1990 varð hon mett at vera so álvarslig, at tað var ivasamt, um hesir báðir stovnar, umframt nógvir av flatfiskastovnunum, yvirhøvur komu fyri seg aftur. Støðan hjá pelagisku fiskastovnunum varð yvirhøvur mett at vera betri enn hjá botnfiskastovnunum.

Tann ringa støðan hjá fiskastovnunum í ES-sjógvi hevur eisini ført við sær, at grundgevingarnar fyri sjálvum kvotubýtinum eru broyttar. Hetta kemur m.a. til sjóndar í nýggjastu Lógskipanini. Í fortaluni verður m.a. sagt um relativa stabilitetin, at tá ringa støðan hjá fiskastovnunum verður havd í huga, skal í kvotubýtinum leggjast dentur á serliga tørvin hjá landspørtum, sum hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Tað, at stovnarnir eru illa fyri, verður sostatt góðtikið sum grund fyri at broyta tann relativa stabilitetin fiskivinnuøkjum til fyrimunar.

**Kvotuhoppan**

Ein spurningur, sum hevur staðið frammarlaga í fiskivinnupolitikkinum hjá ES tey seinnu árini, er tað, sum á enskum verður rópt *quota hopping*.

Spania og Portugal vórðu hildin uttanfyri felags kvotuskipanina (t.e. relativa stabilitetin) og hava sum er at kalla eingi fiskirættindi í ES-sjógvi. ES hevur tí síðani 1986 lagt stóra orku í at fáa fiskiveiðuavtalur við triðjalond, sum serliga eru ætlaðar sponskum fiskimonnum. Her hevur í høvuðsheitum verið talan um, at ES hevur keypt kvotur aðrastaðni, serliga í Afrika og í Suðuramerika.

Ein annar máti hjá sponskum fiskimonnum at fáa sær fiskirættindi hevur verið við "kvotuhoppan". Tvs. seta seg niður í øðrum ES-londum og fiska av teirra kvotum. Hetta hevur antin verið gjørt við at stovnseta feløg í viðkomandi landi og at skráseta sponsk fiskifør í landinum ella við at keypa fiskifør, sum longu standa í skrásetingini.

Við tað at flestu ES-lond hava rættuliga strangar reglur fyri, hvør sleppur at fiska nasjónalar kvotur, hevur tað í høvuðsheitum verið Bretland og Írland, sum hava verið vertir fyri *brass plate companies,* við tað at tey hava ikki slíkar reglur. Hesi lond hava loyvt skráseting av skipum í sína skipaskráseting sambært eini lóg frá 1894, sum ikki setir serliga strong krøv til tjóðskap í samband við skipaskráseting. Tískil hava hesi fiskifør lógliga kunna fiskað av bretskum kvotum. Fram til umleið 1983 fór kvotuhopping í høvuðsheitum fram á tann

hátt, at sponsk feløg settu seg niður í Bretlandi og skrásettu fiskifør síni har. Eftir 1983 hevur verið vanligari, at sponsk feløg hava keypt fiskifør, sum longu er skrásett í bretsku skipaskrásetingini.

Bretskir myndugleikar royndu at støðga kvotuhoppanini við at herða reglurnar fyri manning, rakstri og ognarviðurskiftum í skipaskrásetingini og í fiskiloyvisskipanini.

Men bretsku atgerðirnar endaðu í Evropa-dómstólinum. Spaniumenn vildu vera við, at tær vóru í stríð við meginreglurnar í ES-samstarvinum. Málini, sum dómstólurin skuldi taka støðu til, snúðu seg um ávikavist manning av fiskiførum, rakstur av fiskiførum og rakstur og ognarviðurskifti í samband við fiskifør. Málini vóru tikin upp við støði í ásetingunum í Rómarsáttmálanum um diskriminering vegna nasjónalitet (grein 7), um rættin at seta virksemi á stovn (grein 52), um at mannamunur ikki skal gerast á fyritøkum í ES (grein 58), og um at kapitalur skal hava frítt at fara (grein 221).

Í úrskurðum sínum staðfestir Dómstólurin m.a., at sambært verandi skipan við nasjónalum kvotum kunnu limalondini áseta treytir, sum skulu tryggja, at fiskifarið hevur .... *reel økonomisk tilknytning* ... til limalandið .... *for så vidt som tilknytningen kun vedrører forbindelsen mellem fiskeriet fra fartøjet og den befolkning, der er afhængig af fiskeriet og de dertil knyttede industrier.*

Men ES-dómstólurin sigur samstundis, at limalondunum ikki er loyvt við støði í tjóðskapi at seta diskriminerandi treytir fyri, hvør kann manna og eiga fiskifør.

Úrskurðirnir í málinum merkja, at felags kvotuskipanin ikki longur er nøkur trygd fyri, at limalondini kunnu varðveita sín part av fiskatilfeinginum hjá ES, sum meginreglan um relativan stabilitet leggur upp til. Kvoturnar verða framvegis tillutaðar teimum einstøku londunum, men í dag er eingin trygd fyri, at tað eru fiski- og útróðrarmenn í viðkomandi limalandi, sum einsamallir sleppa at fiska kvoturnar. Ella sum ES-nevndin sigur í miðvegis frágreiðing síni frá 1991: *Domstolens domme betyder i realiteten, at de nationale kvoter kan befiskes af andre medlemsstaters statsborgere i kraft af etableringsretten, hvilket forudsætter, at deres fartøjer er registreret på samme betingelser som dem, der gælder for nationale fartøjer.*

**Tekniskar reguleringar**

Í stýringini av fiskiskapinum í ES-sjógvi verða hesar teknisku reguleringar nýttar: Stongdar leiðir, avmarkað túralongd, ásetingar um fiskireiðskap og minstamát á fiski. Tað vil siga at á hesum øki minna reglurnar nógv um skipanirnar á Føroyaleiðini. Tó eru undantøk. Eitt tað mest týðandi snýr seg um útblaking av fiski. Meðan vit í Føroyum hava sett forboð fyri at blaka undirmátsfisk útaftur, hevur ES ásett við lóg, at hesin fiskur skal blakast út aftur (genudsætning). Somuleiðis er álagt at blaka fisk útaftur, tá kvotan er uppi.

Meðan føroyingar hava lutfalsliga smidligar skipanir, tá tað snýr seg um at hava eftirlit við fiskileiðum, at stongja leiðir við stórari íblanding av ungfiski og aðrar tekniskar reguleringar, er tilsvarandi skipan í ES trupul og tíðarkrevjandi. Ein av høvuðsorsøkunum er tung umsitingarlig mannagongd.

**Fiskiveiðueftirlit í ES**

Ábyrgdin fyri fiskiveiðueftirlit í ES er tvíbýtt. Limalondini hava veiðueftirlit á heimaleiðum og -havnum. *Strandalandið* heldur eftirlit við, at tær teknisku ásetingarnar verða hildnar, veiðudagbókum, veiðueftirlit umborð á fiskiførum, eftirlit við landingum o.s.fr. *Flaggstaturin* heldur eftirlit við heildarkvotunum hjá viðkomandi landi og hevur skyldu at støðga fiskiskapinum, tá heildarkvotan er fiskað. ES-nevndin hevur sínumegin heimild til eitt nú at støðga fiskiskapinum, um veiðutøl frá limalandinum vísa, at kvotan er uppi. ES hevur harumframt eitt lið av eftirlitsfólki, sum skulu ansa eftir, at eftirlitið í limalondunum virkar.

**Eftirlitið vánaligt**

Misnøgdin við veiðueftirlitið og hvussu tað virkar, hevur verið stór. ES-nevndin sigur m.a. í niðurstøðum sínum frá 1991, at tær verandi eftirlitsskipanir hava munað lítið, og at atgerðirnar frá limalondunum hava verið at kalla ongar, tá reglur ikki hava verið hildnar. Orsøkirnar til hetta sigur nevndin verða vantandi samskipan millum nasjónalt og yvirnasjónalt støði, vantandi eftirlit við teknisku reguleringum, vánaligt eftirlit við landingum, ov lítil orka til eftirlit á sjónum, vánaligt samskifti um landingartøl millum limalondini og ES, umframt avmarkaðar heimildir hjá eftirlitsfólkunum hjá ES. Hetta var orsøkin til at, ein nýggj lógskipan um eftirlit varð sett í verk í 1993. Endamálið var at herða eftirlitið. Tær nýggju ásetingarnar hava m.a. eina ætlan um, hvussu eftirlit um fylgisvein skal setast í verk. Annars eru nýggjar reglur um veiðudagbók og landingar-, umskipingar- og flutningsskjøl.

Lógskipanin um eftirlit, sum varð sett í gildi í 1993, merkir, at eftirlitið í størri mun verður skipað sum ein heild og kemur eisini at fevna um marknaðar- og bygnaðartáttin í felags fiskivinnupolitikkinum. Broytingarnar hava fyrst og fremst sum endamál at fáa betri skráseting av veiðu. M.a. hevur ES-nevndin nú beinleiðis atgongd til databasur í limalondunum.

**Fiskiveiðuavtalur við triðjalond**
Myndugleikin í samband við avtalur við triðjalond um fiskiskap í ES-sjógvi og um fiskiskap hjá ES-londum í triðjalandssjógvi liggur hjá ES og ikki teimum einstøku limalondunum.

Í søguligum baksýni var grundreglan í teimum fiskiveiðuavtalum, sum ES gjørdi við triðjalond, at tað, sum ES letur í rættindum, skal svara til tað, ES fær - antin roknað í tonsum ella í virði. Fyri veiðurættindi aðrastaðni læt ES vanliga veiðurættindi í egnum sjógvi, betri marknaðarsømdir ella fíggjarligt gjald.

Tær avtalur, sum ES hevur gjørt við triðjalond í 1990-árunum, eru skornar eftir einum øðrum leisti. Meðan fyrsta ættarliðið av avtalum høvdu *javnvág* sum meginreglu, verður dentur nú lagdur á onnur viðurskifti. Umframt veiðurættindi og marknaðaratgongd fevna avtalurnar vanliga um joint ventures og verkætlanir í 3.londum, umframt gransking, útbúgving o.a.

Eini 20 prosent av veiðuni hjá ES-førum stava frá triðjalandssjógvi. Tær avtalur, sum eru karmarnir um hendan fiskiskap, kunnu flokkast í fýra høvuðsbólkar.

- sínámillum rammuavtalur
- avtalur við fíggjarligum gjaldi
- marknaðaravtalur
- 2.ættarliðsavtalur

**Sínámillum rammuavtalur**

Sínámillum rammuavtalur um veiðurættindi eru vanligar við lond sum liggja upp at ES-sjógvi: Føroyar, Noreg og Svøríki. Allar hesar avtalur komu í gildi í 1981 og áseta, hvussu mannagongdin skal vera í samráðingum og veiðu. Kvotur og aðrar reglur verða vanliga ásettar við samráðingum einaferð um árið. Avtalurnar geva pørtunum veiðurættindi hjá hvørjum øðrum. Meginreglan í býtinum er, at javnvág skal vera, antin í nøgd ella virði. Fiskiførini skulu hava veiðuloyvi og skulu halda seg til tær reglurnar, sum galda á leiðun-

um hjá mótpartinum. Allir hesir sáttmálarnir galda í tíggju ár og kunnu endurnýggjast fyri seks ár í senn.

**Avtalur við fíggjarligum gjaldi**

Avtalur við gjaldi hava verið vanligasti avtaluformur hjá ES við lond, fyrst og fremst í Afrika. Felags fyri hesar avtalur er, at londini sjálvi hava ynski um at menna egna fiskivinnu. Allar avtalurnar hava ásetingar um, at ES bindur seg til at veita tekniska og vísindaliga hjálp. Tær flestu avtalurnar siga eisini, at ES-fiskifør skulu landa partar av veiðuni í vertslandinum, og at fiskimenn úr vertslandinum skulu vera við skipunum. Harumframt eru krøv um upplæring, útbúgvingarstuðul o.a. Avtalurnar siga, at ES-før skulu hava veiðuloyvi. Afturat veiðuloyvinum er tengd ein avgjaldsskipan, sum er ymisk frá landi til land og frá fiskiskapi til fiskiskap.

**Marknaðar-avtalur**

Marknaðaravtalur geva Evropeiska Samveldinum veiðurættindi frá einum landi, móti at viðkomandi land fær betri marknaðarsømdir á ES-marknaðinum og/ella fíggjarligt gjald. Í hesum bólki finna vit tær avtalur, sum ES hevur ella hevur havt við Grønland, USA og Kanada. Harumframt kunnu fiskiveiðuavtalurnar við Noreg og Ísland í ein vissan mun roknast uppí henda bólk. Hóast veiðurættindi formliga ikki eru ein partur av EBS-sáttmálanum, so var spurningurin um marknaðaratgongd umvegis tengdur at veiðurættindum í EBS-samráðingunum.

**Grønland**

Avtalan, sum ES hevur við *Grønland*, er serlig, bæði tí hon er galdandi lutfalsliga leingi og vegna treytirnar í avtaluni. Hetta kemst m.a. av, at Grønland hevur verið ein partur av ES. Grønland hevur harumframt OLT-støðu og er áhugavert hjá ES (rávøra, mentan, trygdarpolitiskt o.a.). Sambært avtaluni fáa fiskifør úr ES veiðurættindi í grønlendskum sjógvi, móti at ES veitir fíggjarligt gjald. Grønlendskar fiskavørur hava fult tollfrælsi á ES-marknaðinum.

**USA**

Avtalan millum ES og *USA* er skorin eftir sama leisti, sum hinar avtalurnar USA hevur gjørt við onnur lond. ES-fiskifør fáa veiðuloyvi og lata eitt gjald fyri at sleppa at fiska ein part av avlopinum í amerikanskum sjógvi. Hesin partur verður ásettur av USA. Í framhaldi av upprunaligu avtaluni eru veiðurættindini hjá ES-førum í amerikanskum sjógvi eisini tengd at betri tollsømdum hjá amerikanskum fiskavørum á ES-marknaðinum.

**Kanada**

Tær tvær fiskiveiðuavtalurnar, sum ES hevur havt við *Kanada*, minna nógv um ta amerikansku. Veiðurættindi vóru tengd at marknaðaratgongd. Tann fyrra avtalan varð ikki endurnýggjað, tá hon fór úr

gildi í 1987. Hin seinna, sum er ein rammuavtala, er framvegis í gildi, men av tí at ES-londini ikki hava verið sinnaði at ganga undir NAFO-reglur í fiskiskapinum, hava viðurskiftini millum Kanada og ES verið kaldlig tey seinnu árini. Hetta hevur ført við sær, at ES-før eingi rættindi hava fingið í kanadiskum sjógvi.

**2.ættaliðs-avtalur**

Í 1990-árunum hevur ES gjørt fiskiveiðuavtalur við triðjalond eftir einum øðrum leisti enn undanfarin ár. Nú fevna avtalurnar vanliga um nógv annað enn veiðurættindi og marknaðaratgongd. Eitt nú um joint ventures, tvs. at ES setir pengar í grunnar, sum feløg í ES og í tí landinum, sum er hin parturin í avtalunum, í felag kunnu søkja um. Harumframt er gransking, útbúgving o.a. vanliga ein partur av slíkum avtalum.

Í samband við 2.ættarliðsavtalur er eisini vert at nevna, at tað ikki er so avgerandi, um avtalurnar javnviga, roknað í tonsum ella krónum. Tað vísir seg at hava størri týdning, at tær javnviga politiskt, tvs. at limalond fáa ávís rættindi, sum tey meta høgt politiskt. Eitt nú hava sponsk og portugisisk fiskifør fingið veiðurættindi í argentinskum sjógvi sambært eini slíkari avtalu.

**Fiskiveiðupolitikkurin: Samandráttur og útlit**
Samanumtikið hevur tann fiskiveiðupolitikkur, sum hevur verið førdur í ES síðani 1983, ikki megnað at forða fyri ovfisking og kreppu í fiskivinnuni.

Støðan hjá nógvum fiskastovnum er hættislig. Ein avleiðing av hesum er, at landingarnar eru nógv minkaðar, og at inntøkur fiski- og útróðrarmanna eru lægri, enn tær annars høvdu verið.

Orsøkirnar til hesa skeivu gongdina eru nógvar. M.a. hevur verið víst á, at fiskiveiðustýringin og stovnsrøktin í alt ov stóran mun hevur snúð seg um áseting av MLV, og hvussu MLV skal býtast út á tey einstøku londini. Ein avleiðing av hesum hevur verið, at nærum einki eftirlit hevur verið við veiðuorkuni. Hetta hevur elvt til eina støðuga kapprenning um at útgera og effektivisera fiskifør.

Ein onnur orsøk er, at atgerðir í hinum báðum tættunum í fiskivinnupolitikkinum - marknaðar- og bygnaðarpolitikkinum - beinleiðis hava undirgravað endamálið við fiskiveiðupolitikkinum. Eitt nú hevur prísískoyti verið latið til undirmátsfisk. Somuleiðis er torført at finna skilagóðar grundgevingar fyri at veita stuðul til nýggj

fiskifør, tá tað er staðfest, at veiðuorkan í ES verður mett at vera eini 40 prosent størri enn, tað grunnarnir kunnu bera.

Ein triðja orsøk er, at skipanin í síni heild er tekniskt og politiskt sera fløkt og krevur stóra umsiting og eftirlit. Somuleiðis hevur tann politiski viljin til at broyta og bøta um skipanina oftani skortað.

Í miðvegis frágreiðing síni ásannar ES-nevndin, at fiskiveiðupolitikkurin er miseydnaður og tekur tær nógvu atfinningarnar til eftirtektar. Nevndin heldur, at fram til ár 2002 eiga verandi stýringaramboð at bøtast, og at hetta serliga skal gerast við strangari reguleringum av atgongdini til fiskastovnarnar. Tað vil í høvuðsheitum siga, at betri tamarhald skal fáast á veiðuorkuni, og sum frá líður, skerja hana munandi.

### 6.1.6 Marknaðarskipanin fyri fisk og fiskavørur

**Endamál**
Endamálið við felags marknaðarskipanini fyri fisk og fiskivørur er "*... at sikre en gennemsigtig og homogen samhandel, at styrke producenternes solidariske bestræbelser på at få et øget udbytte af deres produktion, at sikre en fri vareomsætning og at afstemme konkurrenceindsatsen udadtil efter de begrænsninger, der er fastsat for handelen inden for EF.*"

Til tess at røkka hesum málum verða fýra stýringsamboð nýtt:

- felags handilsnormar
- produsentfeløg (stytt PO)
- felags prísskipan
- skipan fyri samhandilin við triðjalond

**Felags handilsnormar**
Handilsnormarnir fyriskriva, hvussu fiskur og fiskavørur skulu flokkast eftir dygd, stødd, vekt, pakking og merking. Hetta er einasti obligatoriski parturin av marknaðarskipanini. Handilsnormarnir hava týdning fyri marknaðarskipanina á tvinnar hættir: Fyri tað fyrsta er neyðugt at hava ávís fyrisett mát sum grundarlag fyri felags prísssskipanini (sí seinni). Til tess at tryggja øllum somu viðferð og forða fyri avskeikling av marknaðinum er neyðugt, at prísásetingin og marknaðarinntrivini byggja á neyvar lýsingar av ymiskum vørubólkum, fyrisett mát osfr. Harnæst skulu handilsnormarnir birta upp undir betri góðsku á fiski og fiskaúrdrátti. Fiskur, ið ikki lýkur

handilsnormarnar, skal ikki seljast í ES. Limalondini skulu hava eftirlit við, at normarnir verða hildnir og skulu revsa brot.

**Produsentfeløg**
Produsentfeløgini, ella PO'ir, eru ein týðandi partur av felags marknaðarskipanini. Uppgávurnar hjá PO'unum eru serliga knýttar at sølu av fiski í fyrsta liði. PO'irnir eru organisatoriski grundvøllurin í marknaðarskipanini hjá ES á lokalum støði. Virksemið hjá feløgunum skal birta upp undir, at fiskamarknaðirnir ikki syndrast og gerast óstøðugir, og at inntøkur fiskimanna verða tryggjaðar. Hetta verður fyri tað *fyrsta* gjørt við tí leikluti, PO'irnar hava í prísskipanini fyri fisk, serliga í tí sonevndu afturtøkuskipanini (sí seinni). Fyri tað *annað* skulu PO'irnar tryggja, at veiða og søla fer fram á skynsaman hátt, m.a. soleiðis at framboðið á marknaðinum lagar seg eftir eftirspurninginum.

PO'ir verða stovnaðar av samtøkum av fiski- ella útróðrarmonnum, vinnufeløgum ella øðrum felagsskapum hjá reiðarum ella manning, sum fáast við veiðu ella sølu av fiski og fiskavørum.

Fyri at kunna verða roknað sum PO skal felagið verða góðkent av almennum myndugleikum. Fyri at fáa góðkenning skal felagið lúka ávísar treytir. Millum annað skal høvuðsvirksemið hjá felagnum fevna um fisk, krabba- ella skeljadjór. Felagið skal harumframt skjalprógva eitt ávíst fíggjaligt virksemi. ES-nevndin hevur tí ásett eitt minstamark fyri veiðu, fyri at felagið skal kunna metast sum PO.

PO'irnar eru ikki ein obligatoriskur partur av marknaðarskipanini. ES eggjar fiski- og útróðrarmonnum at seta PO'ir á stovn, men áleggur teimum tað ikki. Hinvegin hevur ES ein vissan áhuga í, at fiski- og útróðrarmenn skipa seg í slík feløg. Hetta kemur m.a. til sjóndar, við at limalondini kunnu veita fíggjarligan styrk til stovnseting av PO'um, sum tey síðani fáa endurgoldið úr ES.

**Virksemi hjá PO'unum**

Í 1989 vóru 147 góðkendar PO'ir í ES. Hesar stóðu fyri tilsamans 60% av fyrstahondsumsetninginum á ES-marknaðinum. Meginparturin av PO'unum fingust við feskar fiskavørur. Tær høvdu 38.551 limir á 14.247 fiskiførum. Tað vil siga, at virksemið hjá feløgunum fevndi um góðar 190.000 fiski- og útróðrarmenn. Hetta svarar til eini 80% av fiski- og útróðrarmonnunum í ES.

Tað eru stórir munir millum londini, bæði tá talan er um, hvussu nógvar PO'ir eru, og hvussu stórur partur av fyrstahondsumsetning-

inum fer um PO'ir. T.d. hevði Belgia bert eina, meðan Spania hevði 37 góðkendar PO'ir. Eisini tá tað snýr seg um virksemið hjá feløgunum, eru munir. Í øllum londunum fáast feløgini við sølu av fiski í fyrstu hond og umsiting av prísskipanini. Men summi feløg, eitt nú tey fronsku, eru høvuðseigarar í fyritøkum (frystihúsum, fiskavirkjum osfr.). Í Bretlandi taka PO'irnar aktivt lut í fiskiveiðustýringini. Tann bretski parturin av ES-kvotunum verður býttur millum PO'irnar, sum síðani taka sær av býtinum út til limirnar. Skipanin fevndi í 1990 um 90% av bretsku fiskikvotunum. Tær donsku PO'irnar hava ikki sama stóra leiklutin í fiskiveiðustýringini, men taka sær í høvuðsheitum av umsitingini av prísskipanini og marknaðarrøkt í fyrsta liði.

**Prísskipanin fyri fisk og fiskavørur**
Felags prísskipanin í ES er galdandi fyri fisk seldur í fyrstu hond. Marknaðarlógskipanin hevur ongar reglur um víðari sølu av fiski og fiskavørum. Í ES-londunum verður meginparturin av fiskinum seldur um uppboðssølur, sum eru ein av grundvøllunum í marknaðarskipanini. Hóast hetta so leggur felags prísskipanin seg út í ta fríu prísgerðina. Hetta verður lutvíst gjørt við at stýra handlinum við triðjalond (sí niðanfyri) og lutvíst við afturtøkuskipanini. Afturtøkuskipanin kemur inn í myndina, tá marknaðarprísur fer niður um eitt frammanundan ásett støði. Tá verður fiskur tikin burtur av marknaðinum við stuðli frá ES. Hugsanin er, at minni framboð av fiski hevur við sær, at prísirnir aftur hækka. Reglurnar fyri marknaðarinntriv eru ymiskar fyri ymisk fiskasløg og fiskavørur. Eitt nú eru serstakar reglur fyri frystan fisk, tunfisk og laks.

**Leiðbeinandi prísir**

Áðrenn fiskiárið byrjar, ásetir ES-ráðið leiðbeinandi prísir fyri flestu fiskasløgini í ES-sjógvi. Hesir prísir eru galdandi fyri alt ES-økið. Leiðbeinandi prísir verða ásettir við støði í marknaðarprísunum á umboðandi marknaðum ella umboðandi ES-havnum undanfarnu trý árini. Umboðandi marknaðir ella havnir eru tey støð, har munandi nøgdir av fiskinum verða seldar. Tá leiðbeinandi prísir verða ásettir, verður eisini hugt at útlitunum fyri fiskiskapi og eftirspurningi, umframt inntøkuviðurskiftum fiskimanna og áhugamálum brúkaranna.

Afturtøkuskipanin hevur sum endamál at tryggja fiskimonnum javnar og støðugar prísir. Um marknaðarprísirnir fara niður um ein frammanundan ásettan minstaprís, verður fiskurin tikin aftur av marknaðinum. Fyri hendan fisk veitir ES fiski- og útróðrarmonnum endurgjald. Talan er um tvey sløg av afturtøkuprísum:

**ES-afturtøku-prísir** *ES-afturtøkuprísir* verða ásettir við støði í teimum leiðbeinandi prísunum. Eina ferð um árið roknar ES-nevndin út afturtøkuprísirnar fyri tey fiskasløg, sum eru nevnd í Marknaðarlógskipanini. Alt eftir "vøruslagi" (skilmarkaði sambært felags handilsnormunum) skulu ES-afturtøkuprísirnir vera minst 70% og hægst 90% av leiðbeinandi prísi fyri viðkomandi fiskaslag. Marknaðarlógskipanini heimilar tó landingarstøðum, sum liggja langt burturi frá teimum stóru marknaðunum ella brúkaradeplunum í ES, at brúka lægri afturtøkuprísir.

**PO-afturtøku-prísir** Hjá PO'unum ber til at hava sínar egnu afturtøkuprísir. Tær kunnu í prinsippinum frítt áseta egnar prísir, sum víkja frá ES-afturtøkuprísunum - eisini fyri fiskasløg sum ikki eru nevnd í Marknaðarlógskipanini. Tað, sum kortini skerjir hetta frælsi hjá PO'unum, eru reglurnar um endurgjald úr ES-grunnum í sambandi við afturtøku.

Fíggjarligt endurgjald verður bert latið, um tær vørur, sum verða tiknar aftur, ikki enda aftur á marknaðinum á ein hátt, sum ávirkar vanliga umsetningin. Fiskur, ið verður tikin aftur, fer antin til mjøl, verður tilvirkaður, soleiðis at hann kann seljast í øðrum marknaðarsegmentum ella verður lagdur á goymslu.

Skipanin við endurgjaldi er degressiv. Stuðulsupphæddirnar minka, tá afturtiknar nøgdir vaksa. Fer afturtikin nøgd uppum 14% av umsetninginum av viðkomandi fiskaslagi, verður fíggjarligt endurgjald ikki veitt.

Tað er bert sum limir í einari PO, at fiski- og útróðarmenn kunnu vera við í afturtøkuskipanini. Teir fáa endurgjald fyri tann fíggjarliga miss, teir hava av at taka fisk aftur av marknaðinum. Men teir hava eisini eina medábyrgd í at fíggja marknaðarinntrivini. Medábyrgdin er m.a., at fiskimenn sjálvir gjalda limagjald til PO'ina og eru á henda hátt við til at fíggja afturtøkuskipanina. Endamálið er at eggja limunum til at laga veiðuna eftir eftirspurninginum.

**Samhandilin við triðjalond**
Afturtøkuskipanin varð sett í verk fyri at ávirka prísgerðina innanhýsis í ES við at royna at stýra tilgongdini frá egnum fiski- og útróðarmonnum. Hetta er tó ikki nógmikið fyri at stabilisera ES-marknaðin. ES-londini eru sum kunnugt ikki sjálvbjargin við fiski og eru nettoinnflytarar av fiski og fiskavørum. ES tørvar hendan fiskin og kann illa vera innflutningin fyriuttan. Men hetta merkir samstundis, at fiskimenn í ES eru í kapping við innfluttan fisk. Tí hevur marknaðarskipanin eisini ásetingar fyri samhandilin við triðjalond.

Útgangsstøðið fyri reguleringum av innflutningi av fiski til ES-marknaðin eru tey felags tollgjøldini. Men tey felags tollgjøldini geva ikki røttu myndina av innflutningstreytunum, tí fleiri undantøk eru frá tollgjøldunum, bæði sum autonomar tollsuspensjónir og sum serligir handilssáttmálar við triðjalond.

ES kann harumframt brúka fleiri aðrar atgerðir móti innflutningi úr triðjalondum, tá hesin innflutningur hóttir stabilitetin á marknaðinum. M.a. áseta minstaprísir á innflutningi, innflutningsforboð, anti-dumping-atgerðir ella kvotur. Her kann tó ikki farast út um karmarnar í GATT.

Ein tollskipan er vanliga ikki nóg smidlig til at regulera innflutningin innanfyri styttri tíðarskeið, hóast møguleikin fyri at seta tollásetingar úr gildi er til staðar. Til tess at røkja hesa uppgávuna ásetir ES hvørt ár *referansuprísir* fyri tey flestu fiskasløg, sum ES innflytur. Hetta er eitt slag av minstaprísum fyri innfluttan fisk. Í teimum førum, har ES hevur ásett afturtøkuprísir fyri eitt fiskaslag ella fiskavøru, verður referansuprísurin vanliga tann sami. Hendan skipan ger tað møguligt hjá ES at koma uppí og stabilisera marknaðin, serliga tá stórar nøgdir av fiski verða innfluttar til prísir, sum liggja niðanfyri prísleguna á innmarknaðinum. Undir slíkum umstøðum kann ES annaðhvørt seta autonomu tollsuspensjónina fyri viðkomandi vøru úr gildi ella krevja, at innflutningsprísur verður tann sami sum referansuprísurin. Um so er, at tað í eitt tíðarskeið verður innfluttur fiskur til prísir, sum liggja niðanfyri referansuprísin, kann ES leggja avgjald á innflutningin, soleiðis at marknaðarprísurin verður tann sami sum referansuprísurin.

**Marknaðarskipanin: Samandráttur og útlit**

Endamálið við felags marknaðarskipanini fyri fisk og fiskavørur í ES er at tryggja fiskimonnum javnar inntøkur og at tryggja, at tann fiskur, sum kemur á marknaðin, er av góðari dygd. Marknaðarskipanin fevnir um fýra høvuðstættir: Felags handilsnormar, felags prísskipan, produsentfeløg umframt reglur fyri samhandilin við triðjalond.

Hóast høvuðsendamálið við marknaðarskipanini er at tryggja, at fyritreytirnar fyri fríari prísgerð eru til staðar, soleiðis at ikki er neyðugt við marknaðarinntrivum, hevur ES kortini ásannað, at fyritreytirnar fyri, at ein marknaður við fríari kapping skal geva frægastu úrslit, ikki eru til staðar í fiskivinnuni. Í marknaðarskipanini eru tí mekanismur, sum fara at virka, tá gongdin á marknaðinum fær óhepnar avleiðingar fyri fiski- og útróðarmenn.

Marknaðarskipanin skal sostatt taka sær av einum serligum slagi av marknaðaravskeikling: Príslækkingar tí at ov nógvur fiskur er á marknaðinum. Tá hetta er støðan, ber tað til at minka um tilgongdina av fiski og fiskavørum. Sostatt verður ikki beinleiðis lagt út í prísgerðina, men roynt verður at ávirka prísin umvegis við at stýra framboðnum á marknaðinum.

Tey seinnu árini, tá ið trot hevur verið á fiski, hevur afturtøkuskipanin virkað meira preventivt og í minni mun sum verulig marknaðarinntriv. Tey fiskasløg, sum vera tikin aftur, eru fyri tað mesta pelagisk fiskasløg, har tað partar av árinum er stór tilgongd og truplar søluumstøður (eitt nú sild). Afturtøkuskipanin verður lutvíst fíggjað av fíggjarætlanini fyri fiskivinnuna hjá ES. Tær upphæddir, sum verða brúktar til afturtøku, eru ein lutfalsliga lítil partur av fíggjarætlanini (undir 5 prosent). Eisini um vit samanbera við veiðuvirðið hjá ES, er eisini talan sum smáar upphæddir, sum eru farnar til at fíggja afturtøku av fiski.

Í miðvegis frágreiðingini hjá ES-nevndini frá 1991 um felags fiskivinnupolitikkin og støðuna og útlitini hjá fiskivinnuni í ES verður ógvuliga lítið sagt um marknaðarpolitikkin. Eyguni verða í høvuðsheitum vend móti fiskiveiðu- og bygnaðarpolitikkinum. Av týdningi fyri marknaðarpolitikkin kann tó nevnast, at ES-nevndin heldur, at ein tættari samskipan av teimum trimum høvuðstættunum í tí felags fiskivinnupolitikkinum er átrokandi neyðug. Í umrøðuni av broytingum í marknaðarskipanini nevnir ES-nevndin t.d. leiklutin hjá PO'unum í fiskiveiðustýringini, tó uttan at hetta verður útgreinað.

Nógvar av teimum broytingum, sum ES-nevndin skeyt upp í frágreiðing síni, vórðu tiknar við í síðstu Marknaðarlógskipanina frá 1992. Eitt nú vórðu reglurnar um leiklutin hjá PO'unum í fiskiveiðustýringini gjørdar greiðari. Men samanumtikið var ikki talan um grundleggjandi broytingar, men bert stillingar og dagføringar av galdandi reglum.

### 6.1.7 Bygnaðarpolitikkurin í fiskivinnuni

**Søguligt baksýni**

Rómarsáttmálin ásetir, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES eisini skal hava eitt bygnaðarpolitiskt endamál. Í grein 39, sum er endamálsgreinin hjá fiskivinnupolitikkinum, verður m.a sagt, at fiskivinnupolitikkurin skal birta upp undir størri produktivitet og skal tryggja

fiskimonnum rímilig kor. Í fyrsta felags fiskivinnupolitikkinum frá 1970 vóru tey bygnaðarpolitisku endamálini tikin við í egna lógskipan. Upprunin til bygnaðarpolitikkin vóru teir trupulleikar, sum stóðust av felags marknaðarskipanini fyri fisk. Marknaðarskipanin førdi m.a. við sær, at ES fekk innanhýsis fríhandil við fiski og fiskavørum. Fyrimunirnir og vansarnir av fríhandlinum vóru ikki javnt býttir millum londini. Óttin fyri at vera fyri vanbýti og at tapa í kappingini var serliga stórur í teimum suðurevropeisku londunum, har fiskivinnan í høvuðsheitum var útróður og ikki serliga effektiv samanborið við vinnuna í teimum norðurevropeisku londunum. Bygnaðartiltøkini høvdu tí eitt kompensatoriskt endamál og vóru í stóran mun ein liður í at nútímansgera vinnuna í Fraklandi og Italia.

Men tað stóra umskiftið, sum hendi, tá fiskimørkini vórðu flutt út í 1970-árunum, gjørdi, at bygnaðarpolitikkurin fekk enn størri týdning og nýggjar uppgávur. Í tí fiskivinnupolitikki, sum ES-londini komu á samt um í 1983, hevði bygnaðarpolitikkurin sum høvuðsendamál at laga veiðuflotan eftir fiskatilfeinginum. Gongdin síðani tá hevur greitt víst, at tørvurin á einum bygnaðarpolitikki við hesum endamáli hevur verið mest átrokandi. Hetta komst serliga av, at Spania og Portugal komu upp í ES í 1986. Trupulleikarnir við ov stórari veiðuorku vuksu. Í 1986 varð bygnaðarpolitikkurin tí endurskoðaður og útbygdur. Seinni eru hendar onkrar justeringar, eitt nú í 1990, tá bygnaðarpolitikkurin eisini kom at fevna um tey minstu førini. Hesi høvdu ikki verið við frammanundan.

**Endamál**

Endamálið við bygnaðarpolitikkinum í fiskivinnuni hjá ES er at tryggja skynsama menning av fiskivinnuni og kor fiski- og útróðrarmanna. Hetta verður m.a. gjørt við at vaksa um produktivitetin við atgerðum sum birta upp undir bygnaðarbroytingar í veiðuflotunum og øðrum framleiðslutólum, at finna nýggjar fiskileiðir, at menna og laga veiðu, tilvirking og sølu eftir krøvunum í marknaðinum.

**Almennur studningur í limalondunum**

Reglurnar um almennan stuðul hava til endamáls at tryggja somu kappingartreytir fyri alt ES-økið. Limalondini kunnu ikki veita egnum vinnulívi serligar kappingarsømdir við almennum stuðli, sum er av slíkum slag, at kappingin verður avlagað.

Høvuðsreglurnar um almennan stuðul eru at finna í Rómarsáttmálanum. Burtursæð frá teimum undantøkum, sum sáttmálin heimilar,

er almennur stuðul, sum avlagar kappingina, ikki loyvdur, um so er, at stuðulin ávirkar handilin millum ES-londini.

ES-nevndin ásetir nærri reglur fyri, hvørji sløg av almennum stuðli eru loyvd.

**ES-studningur til bygnaðartiltøk í fiskivinnuni**
Umframt tær stuðulsskipanir, sum eru í limalondunum, eru fleiri skipanir settar í verk innan fyri bygnaðargrunnarnar í ES. Í samband við fiskivinnu er tað tann stuðul, sum verður veittur bygnaðar-, marknaðar- og tillagingartiltøkum, sum hevur størstan týdning. Stuðul til bygnaðartiltøk í fiskivinnuni hava síðani januar 1994 verið fíggjaði úr einum serligum menningargrunni fyri fiskivinnuna (á donskum *det finansielle instrument til udvikling af fiskeriet, FIUF*). Talva 6.2 vísir leiðbeinandi stuðulsupphæddir úr menningargrunninum fyri fiskivinnuna 1994-1999.

| Land | PESCA | Menningargrunnurin fyri fiskivinnu |
|---|---|---|
| Belgia | 2 | 21,6 |
| Danmark | 16,4 | 135,51 |
| Týskland | 23 | 65,77 |
| Grikkaland | 27,1 | 0 |
| Spania | 41,5 | 105,58 |
| Frakland | 27,9 | 170,69 |
| Írland | 3,7 | 0 |
| Italia | 33,7 | 118,63 |
| Niðurlond | 10,7 | 41,21 |
| Luksemborg | 0 | 0 |
| Portugal | 25,6 | 0 |
| Bretland | 33,9 | 78,3 |
| Tilsamans | 245 | 737,29 |

*Talva 6.2: Leiðbeinandi býtið av stuðli til bygnaðartiltøk í fiskivinnuni til limalondini (mió. ecu; 1 ecu er uml. 7 dkr))*

**Endamálið við stuðlinum**

Sambært galdandi reglum er endamálið við stuðulsveitingum úr grunninum:

- at fáa varandi og burðardygga javnvág millum tilfeingi og veiðuorku

- at bøta um kappingarføri og menna lønandi fyritøkur í fiskivinnuni
- at bøta um tilgongdina og tilvirkingina av fiski- og havbúnaðarvørum

Til tess at røkka hesum málum kann grunnurin veita stuðul til hesi tiltøk:

- at taka fiskifør úr vinnu (upphøgging, søla til 3.lond ella í aðra vinnu enn fiskiskap í ES-sjógvi)
- joint ventures millum fyritøkur í limalondum ella við fyritøkur í 3.londum
- bygging og nútímansgerð av fiskiførum
- íløgur í havbúnað
- vernd av strandaleiðum
- fiskivinnuhavnir (t.d. goymslu- ella frystihús)
- virking og sølu av fiski- og havbúnaðarvørum

**Treytir fyri stuðli**

Treytin fyri at fáa stuðul úr fiskivinnugrunnunum hjá ES er, at limalandið sendir ES-nevndini eina nasjónala vinnuætlan og umsókn um stuðul. Ætlanin og umsóknin skulu fevna um eitt seks ára tíðarskeið. Í verandi bygnaðarpolitikki er tað fyrsta tíðarskeiðið galdandi frá 1.januar 1994 til 31.desember 1999. Vinnuætlanin skal evnast til eftir nærri ásettum reglum. Ætlanin skal m.a. siga, hvat endamálið við bygnaðartiltøkunum er, og hvussu limalandið ætlar sær at røkka endamálinum. Ein onnur treyt er, at endamálið við ætlanini er í samsvar við felags fiskivinnupolitikkin í ES.

Treytin fyri at fáa stuðul úr menningargrunninum fyri fiskivinnuna er, at limalandið eisini leggur til. Her kann talan vera um stuðul, sum svarar til úr 5% upp til 50% av íløgukostnaðinum. Harumframt eru krøv um, at tann, sum søkir stuðul, hevur privata eginfígging.

**Langtíðar menningarætlanir fyri fiskiflotan**

Ein týðandi táttur í vinnuætlanunum er, at limalondini skulu gera eina langtíðar menningarætlan fyri fiskiflotan. Fyri tíðarskeiðið 1993-96 hevur ES-nevndin ásett leiðbeinandi reglur, sum limalondini skulu halda seg til í sínum menningarætlanum.

Fyri at minka um ta alt ov stóru veiðuorkuna í ES varð í 1986 farið undir eina ætlan, sum hevði ítøkilig mál fyri, hvussu nógv veiðuflotin í hvørjum einstøkum limalandi skuldi skerjast (mátað í BRT og maskinorku). Frá 1986 til 1991 fór meginparturin av fiskivinnustuðlinum til ætlanir, sum høvdu sum endamál at tillaga veiðuorkuna.

Hóast tað í ein vissan mun eydnaðist at minka um flotan, so er kortini ivasamt, um talan var um ein reellan niðurskurð í veiðuorkuni.

Reglurnar fyri tiltøk og krøv í bygnaðarpolitikkinum eru stigvíst skerptar. Galdandi ætlan miðar ímóti, at niðurskurðurin í veiðuorku verður býttur út á skipabólkar. Eitt nú er útgangsstøðið fyri tíðarskeiðið fram til 31.desember 1996, at hvørt limaland skal minka um trolaraflotan, sum roynir eftir botnfiski við 20 prosentum og 15 prosentum fyri før, sum royna eftir flatfiski.

**Aðrar stuðulsskipanir**

Umframt stuðulsmøguleikar úr menningargrunninum fyri fiskivinnuna hevur ES-nevndin sett í verk PESCA, sum hevur til endamál at birta upp undir bygnaðarbroytingar í fiskivinnuni og at lætta um sosialu og búskaparligu avleiðingarnar av kreppuni í vinnuni. Stuðulin skal harumframt nýtast til at fjøltátta vinnulívið í kreppuraktum regiónum við arbeiðsskapandi tiltøkum. Talva 6.2 frammanfyri vísir leiðbeinandi stuðulsupphæddir úr PESCA fyri tíðarskeiðið 1994-1999.

### 6.1.8 Fiskivinnupolitikkurin hjá ES: Samandráttur og útlit

ES-londini hava felags fiskivinnupolitikk. Hetta merkir, at londini hava latið felags stovnum í ES avgerðarrættin í nógvum týðandi fiskivinnumálum.

Høvuðstættirnir í fiskivinnupolitikkinum hjá ES eru:

- *Fiskiveiðupolitikkurin* setur karmarnar fyri stovnsrøkt og fiskiveiðustýring í ES-havinum. Endamálið er at røkja og verja fiskastovnarnar og tryggja skynsama gagnnýtslu á burðardyggari búskaparligari og samfelagsligari grund. Tørvurin og áhugamálini hjá fiski- og útróðrarmonnum og brúkarunum skulu havast í huga. Fyri at røkka hesum málum verða heildarkvotur ásettar fyri øll fiskasløg, sum hava vinnuligan týdning. Heildarkvoturnar verða býttar út til limalondini eftir einum føstum býtislykli, sum tryggjar hvørjum landi sín fasta prosentpart. Limalondini avgera sjálvi, hvussu tey býta sína kvotu víðari til egnar fiski- og útróðarmenn. Harafturat nýta ES-londini tekniskar reguleringar og veiðuloyvisskipanir.

- *Marknaðarpolitikkurin* er ein skipan við innanhýsis fríhandli við fiski og fiskavørum og felags tolli mótvegis triðjalondum. Til tess at forða fyri, at fríhandilin fær óhepnar avleiðingar og at

tryggja inntøkur fiski- og útróðrarmanna, er ein skipan við prísregulering sett í verk. Ein onnur grundregla í marknaðarskipanini er eisini at verja fiskivinnuna í ES móti innflutningi av bíligum fiski og fiskavørum.

- *Bygnaðarpolitikkurin* í fiskivinnuni hevur til endamáls at tryggja skynsama menning av fiskivinnuni og at tryggja kor fiski- og útróðrarmanna. Hetta verður m.a. gjørt við at vaksa um produktivitetin við atgerðum, sum birta upp undir bygnaðarbroytingar í veiðuflotunum og øðrum framleiðslutólum, at finna nýggjar fiskileiðir, at menna og laga veiðu, tilvirking og sølu eftir krøvunumn í marknaðinum.

**Miseydnaður fiskivinnupolitikkur**

Tey stýringsamboð, sum higartil hava verið nýtt, hava ikki megnað at tryggja skynsama stovnsrøkt og lønsemi í vinnuni. Støðan í vinnuni er vánalig, m.a. sum ein avleiðing av ovíløgum og støðugt vaksandi troti á fiski. Flotin verður mettur at vera eini 40 prosent ov stórur. Støðan gerst ikki betri av, at kapprenningin eftir tí avmarkaða tilfeinginum mangan førir við sær, at fiskiskapurin fer fram á ein hátt, sum eftir einum búskaparligum sjónarmiði ikki er optimalur.

Teir trupulleikar, sum standast av hesum, gerast ikki minni, tá havt verður í huga, at fiskivinnan ofta er savnað í landspørtum, har fiskiskapur er lívsæðrin í vinnulívinum, og alternativir vinnumøguleikar er fáir.

Orsøkirnar til ta skeivu gongdina eru nógvar. M.a. hevur verið víst á hesi viðurskifti:

- Førdur hevur verið ein fiskiveiðupolitikkur, har høvuðsdenturin hevur verið lagdur á at áseta og býta MLV. Av tí at kalla einki eftirlit hevur verið við veiðuorkuni, hevur hetta ført við sær eina støðuga kapprenning um at útgera og effektivisera fiskifør. Harumframt hevur útblakingin verið stór.

- Førdur hevur verið ein politikkur, har fyrilitini fyri serligum umstøðum og frábrigdum hava verið lítil. Hetta er ein trupulleiki í t.d. blandaðum fiskiskapi.

- Skipanin við røkt av fiskastovnum hevur verið ógvuliga fløkt og krevur stórt eftirlit, sum kortini ikki hevur megnað at tryggja, at reglurnar hava verið fylgdar. Ein orsøkin til hetta er, at tað hevur skortað uppá politiskan vilja at finna loysnir.

- Førdur hevur verið ein fiskiveiðupolitikkur, sum ikki í nóg stóran mun hevur havt fyrilit fyri búskaparligum eginleikum, men sum næstan bert hevur havt lívfrøðilig stevnumið.

- Í tí førda politikkinum hevur ikki í nóg stóran mun verið havt fyrilit fyri samfelagsligum eginleikum og umstøðum. Tvs., at tey politisku amboðini, sum skulu til fyri at skipa tær neyðugu bygnaðarbroytingarnar og samstundis tryggja framtíðina hjá vinnuni, hava ikki verið til staðar.

- Tiltøkini í felags fiskivinnupolitikkinum hava verið spjødd út á serskilt øki: Fiskiveiðu-, marknaðar- og bygnaðarpolitikkin. Í tí praktiska politikkinum hevur lítil samanhangur verið millum hesi øki. T.d. hevur prísískoyti verið latið undirmátsfiski, hóast veiðureglurnar siga, at slíkur fiskur ikki skal førast til lands. Úrslitið hevur t.d. verið, at stórar nøgdir av undirmátshýsu hava verið landaðar serliga í Skotlandi og eru komnar undir minstaprísskipanina og hava fingið prísískoyti. Somuleiðis hava stuðulstiltøkini í bygnaðarpolitikkinum undirgravað endamálið við veiðustýringini. Tað er t.d. torført at finna skilagóðar grundgevingar fyri at veita stuðul til nýggj fiskifør, uttan at tilsvarandi veiðuorka ella størri orka fer úr flotanum, í eini tíð har ES-nevndin hevur staðfest, at veiðuorkan er eini 40 prosent ov stór.

**Útlit**

Tá felags fiskivinnupolitikkurin varð endurskoðaður í 1992, varð roynt at bøta um nógvar av umrøddu vansum í 10-ára skeiðnum 1992-2002. ES-nevndin heldur í miðvegis frágreiðing síni, at fyri at varðveita fiskivinnuna og í longdini at tryggja henni lívskor, er í fyrsta umfari neyðugt at fáa betri samsvar millum veiðuorku og fiskastovnar. Í øðrum umfari er málið at varðveita eina javna og skynsama umsiting av fiskatilfeinginum. Hetta skal serliga gerast við at seta í verk eina betri skipan, sum regulerar atgongdina til fiskileiðirnar, m.a. við at í størri mun brúka búskaparlig insitament. Somuleiðis verður miðað ímóti, at vinnan í størri mun verður tikin við uppá ráð og fær størri medábyrgd í umsitingini av fiskatilfeinginum.

## 6.2 Fiskivinnupolitikkurin hjá ES í Føroyum. Meting av avleiðingunum fyri føroyskan fiskivinnupolitikk og veiðurættindi, um Føroyar gerast partur av ES

### 6.2.1 Inngangur

Um Føroyar gerast partur av Evropeiska Samveldinum, er spurningurin um, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri føroyskan fiskivinnupolitikk og føroysk veiðurættindi:

- Varðveita vit yvirvaldsrættin til fiskatilfeingið í føroyskum sjógvi?

- Sleppa fiskifør úr ES ótálmað at royna á Føroyaleiðini?

- Fara Føroyar, sum partur av ES at fáa veiðurættindi, sum tryggja føroysk áhugamál?

- Kunnu ES-borgarar frítt gera íløgur í føroyska fiskivinnu og fiska av føroyskum kvotum?

- Ber til at fáa varandi undantøk frá grundreglunum í fiskivinnupolitikkinum hjá ES?

Slíkir spurningar eru torførir at viðgera. Ítøkilig og haldgóð svar fáast bert í samráðingum. Umrøðan niðanfyri er tí fyrst og fremst grundað á tað lógarverk og grundreglur, sum verandi limalond hava samtykt í fiskivinnumálum, og sum nýggj lond mugu góðtaka, tá tey gerast limir í ES. Harumframt verður eisini hugt at teimum ser- og tillagingarskipanum nýggj limalond vanliga fáa á fiskivinnuøkinum. Eitt nú fingu Spania og Portugal serligar tillagingarskipanir, tá tey gjørdust limir í ES í 1986. Noreg samráddi seg eisini fram til ser- og tillagingarskipanir.

Í sambandi við at sammeta við nevndu lond er tó neyðugt at hava í huga,

- at ríkisrættarligu, búskaparligu og samfelagsligu fyritreytir okkara eru nógv øðrvísi enn tær hjá Noreg og iberisku londunum,

- at støðan hjá Spania og Portugal mótvegis táverandi ES var sera ólík støðuni hjá norðmonnum, tá teir fóru undir upptøkusamráðingar. Eitt nú hevði Spania ein risastóran fiskiflota, og ES var ógvuliga avgjørt í at nokta sponskum fiskiførum atgongd til ES-sjógv. Støðan hjá Noreg var júst tann øvuta. Stovnarnir í norskum sjógvi vóru yvirhøvur væl fyri, tað hevði gingið støðugt framá hjá vinnuni osfr. Avleiðingin av sponskum limaskapi var, at tilfeingistrotið hjá ES vaks. Norskur limaskapur hevði havt mótsettu avleiðingar.

**6.2.2 Fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og ES higartil**

Føroyar og ES undirskrivaðu í mars 1977 sínámillum fiskiveiðusáttmála. Hóast sáttmálin ikki formliga kom í gildi fyrrenn í mars 1981, tá ES samtykti hann, so hevur sáttmálin øll árini verið karmurin um árligu samráðingarnar um fiskikvotur og aðrar veiðureglur. Rammusáttmálin, sum í fyrsta umfari var galdandi í 10 ár, varð longdur við seks árum í 1991.

Støðið í árligu fiskiveiðuavtalunum er munandi lækkað, síðani rammusáttmálin varð undirskrivaður. Longu tá farið varð inn í 1980-árini, var javnvágin minkað niður í góða helvt, roknað í toskavirði.

**Veiðan hjá ES** Veiðan hjá ES-londunum í føroyskum sjógvi er minkað munandi. Harafturat hevur tað víst seg, at tær kvotur ES hevur fingið í føroyskum sjógvi, ikki verða uppfiskaðar. Orsøkirnar til minkaða áhugan hjá ES eru fleiri. Við fiskiveiðusáttmálanum ynsktu partarnir at fáa ein stýrdan og stigvísan niðurskurð í veiðurættindum sum eitt úrslit av fiskimarksútflytingunum. Stórar bygnaðarbroytingar eru farnar fram í fiskiflotanum hjá ES. Fjarfiskiflotin í Bretlandi, Týskland og Fraklandi minkaði rættiliga skjótt, eftir at fiskimørkini vórðu flutt út, og londini hava fingið ein flota, sum er lagaður til fiskiskap á heimaleiðum. Sambært ES er ein onnur orsøk til, at kvoturnar ikki vórðu fiskaðar, at høgir oljuprísir og strangar føroyskar reguleringar hava gjørt tað minni lokkandi og lønandi at fiska undir Føroyum. Afturat hesum kemur, at toska- og hýsustovnurin undir Føroyum - sum í síni tíð høvdu týdning fyri serliga bretskar fiskimenn - hava verið illa fyri tey seinnu árini.

**Veiða Føroya** Føroyar hava í størri mun megnað at gagnnýtt sínar kvotur í ES-sjógvi. Men sínámillum fiskiveiðusáttmálin hevur munandi minni týdning í dag, enn hann hevði í síðst í 1970-árunum. Orsøkirnar til niðurgongdina, og at kvoturættindini fingu minni týdning longu

fyrst í 1980-árunum vóru m.a., at tá forboðið ímóti at veiða sild í Norðsjónum varð sett úr gildi, sluppu føroyingar ikki upp í part aftur, at prísirnir á ídnaðarfiski vóru óstøðugir og lækkandi, og at ídnaðarskipini løgdu um til fiskiskap við Føroyar, og tær avmarkingar, sum vóru lagdar á rækjufiskiskapin í Grønlandi.

### 6.2.3 Fiskiveiðupolitikkurin í ES og Føroyar

Við støði í lógarverkinum og grundreglunum hjá ES og teimum ser- og tillagingarskipanum, sum onnur lond og landspartar hava fingið á fiskivinnuøkinum, verða hesir spurningar umrøddir niðanfyri:

- Avgerðarrætturin í veiðumálum og heimildin at regulera fiskiskapin við Føroyar
- Veiðurættindi hjá øðrum ES-skipum í føroyskum sjógvi
- Veiðurættindi hjá føroyskum fiskiførum á ES-leiðum
- Kvotuhopping
- Fiskiveiðuavtalur við triðjalond

**Avgerðarrættur í veiðumálum og heimildin at regulera fiskiskapin við Føroyar**

Um Føroyar gerast partur av ES, ber hetta í sær, at Føroyaleiðin fiskiveiðu viðvíkjandi gerst ES-hav, og at avgerðarrætturin í stýringini av fiskiskapinum í prinsippinum kemur at liggja hjá ES. ES fær myndugleika at áseta MLV og onnur stovnsverndartiltøk. Sum partur av ES varðveita vit tó rættin at regulera lokalar fiskastovnar og gera sjálvi av, hvussu vit býta tillutaðar heildarkvotur. Gerast vit partur av ES, og felags fiskivinnupolitikkurin óbroyttur verður settur í gildi, verður uppgávan hjá føroyskum myndugleikum í høvuðsheitum at seta í verk ES-reglur og at hava eftirlit við, at tær verða fylgdar.

**Serskipanir: Noreg sum dømi**

Spurningarnir, sum stóðu frammarlaga í norska ES-stríðnum og í orðaskiftinum um tað úrslit, norðmenn fingu í limaskapssamráðingunum vóru um Noreg við fiskivinnuloysnini hevði latið ES allan avgerðarrætt, og um ES juridiskt hevði bundið seg til, at Noreg framhaldandi kundi reka sín egna fiskivinnupolitikk norðanfyri 62. stig.

Norska fiskimálaráðið helt, at Noreg hevði fingið eina góða fiskivinnuloysn í limaskapssamráðingunum. Hildið varð, at Noreg hevði fingið juridiska trygd fyri framhaldandi norskum yvirvaldsrætti í norskum sjógvi, at norskir myndugleikar framhaldandi kundu áseta

heildarkvotur, og at ognarrætturin til havleiðir og fiskastovnar n.f. 62. stig var tryggjaður.

ES-andstøðan førdi sínumegin fram

- at Noreg ikki hevði fingið varandi undantøk á fiskivinnuøkinum
- at ábyrgdin í umsitingini av havleiðum og fiskastovnum varð flutt til ES
- at ES skuldi áseta norskar kvotur
- at ES skuldi gera av, hvør slapp at fiska í norskum sjógvi
- at tillagingarskipanirnar bert vóru galdandi í tey tíðarskeið, sum vóru ásett í sáttmálanum, og at hesi tíðarskeið kundu gerast styttri enn tað, sáttmálin tilskilaði
- at felagsyvirlýsingarnar í sáttmálanum onga trygd góvu fyri, hvussu gongdin í fiskivinnupolitikkinum hjá ES fór at vera.

**Norskar tillagingarskipanir**

Norski limaskapssáttmálin ásetti í summum førum greitt, hvussu leingi tillagingarskipanirnar skulu galda:

- Fram til 30.6.1998 skuldi Noreg varðveita rættin at áseta mest loyvdu veiðu fyri stovnar norðanfyri 62.stig, undantikið makrel

- Noreg skuldi varðveita rættin at áseta tekniskar reguleringar í eitt ár

- Forboðið móti útblaking av fiski skuldi galda í 3 ár

- Noreg varðveitti heimildirnar at stongja fiskileiðir í 3 ár

Men í øðrum førum var ikki greitt tilskilað, hvussu leingi skipanirnar í upptøkusáttmálanum skuldu vara. Hetta er m.a. galdandi fyri tann partin, har kvotur og kvotupartar hjá Noreg vóru ásett.

Norska fiskimannafelagið (Norges Fiskarlag) heitti á bretska ES-serfrøðingin Robin Churchill um at gera eina meting av spurninginum. Í metingum sínum sigur hann, at fyri tað fyrsta er ógreitt, hvussu leingi ásettu kvotupartarnir skuldu vera galdandi. Fyri tað annað vísir hann á, at svarið uppá spurningin um mannagongdina viðvíkjandi at broyta ella seta úr gildi ásettu kvotupartarnar ikki er eintýðugt. Tað veldst um, hvør mannagongd í ES-lógarverkinum verður nýtt í samband við broytingarnar. Niðurstøða *hansara* er tó, at ásetingarnar um kvotupartarnar hjá Noreg eru tengdar at áseting-

unum í Lógskipan 3760/92 hjá ES og kundu sostatt broytast ella setast úr gildi við kvalifiseraðum meiriluta í ES-ráðnum.

**Eingi varandi undantøk**

Norsku royndirnar vísa samanumtikið, at um ætlanin er at fara uppí ES, er torført at fáa undantøk frá fiskivinnupolitisku meginreglunum hjá ES. Norðmenn fingu undantøk, men hesi undantøk skuldu bert galda í mesta lagi trý ár. Norski upptøkusáttmálin gav ikki juridiska trygd fyri, at kvotupartarnir í upptøkusáttmálanum vóru permanentir. ES kundi við kvalifiseraðum meiriluta broyta ella seta teir úr gildi.

**Veiðurættindi hjá øðrum ES-skipum í føroyskum sjógvi**

Útgangsstøðið í lógarverkinum hjá ES viðvíkjandi veiðurættindum er, at munur ikki skal gerast á ES-borgarum við støði í tjóðskapi. Tað var hendan meginregla og óttin fyri, at ES-før ótálmað fóru at leggjast á grunnarnar, sum var ein av orsøkunum til, at løgtingið í 1974 samtykti at boða donsku ríkisstjórnini frá, at danski limaskapurin ikki skuldi fevna um Føroyar. Men spurningurin er, um somu grundgevingar galda í dag.

**Veiðurættindi og kvotur**

Tilluting av veiðurættindum í ES er grundað á søguliga veiðu, tann týdning fiskivinnan hevur fyri lond og landspartar, og missur av veiðurættindum vegna fiskimarksútflytingar hjá triðjalondum. Sambært ES-serfrøðinginum Robin Churchill hevur hetta síðsta ongan týdning longur og varð bert brúkt sum lykil í fyrsta kvotubýtinum í 1983. Hetta grundar hann m.a. á, at í sponsku limaskapssamráðingunum avvísti ES spanska kravinum um, at sponsk rættindi á leiðum hjá øðrum limalondum skuldu ásetast við støði í fiskiskapinum, áðrenn fiskimørkini vórðu flutt út á 200 fj.

Um Føroyar gerast partur av felags fiskivinnupolitikkinum í ES, bendir nógv á, at veiðurættindini hjá øðrum ES-skipum í føroyskum sjógvi verða grundaði á søgulig veiðutøl, t.d. fiskiskapin tey síðstu 5-10 árini, saman við serstøðu okkara sum fiskivinnutjóð. Veiðurættindini hjá ES í føroyskum sjógvi verða tí helst á leið tey somu, sum hava verið ásett í fiskiveiðuavtalunum tey seinnu árini.

Grundgevingar fyri hesum eru m.a.:

**Spania og Portugal**

- Veiðurættindini, sum fiskifør úr ES fingu í sponskum og portugisiskum sjógvi, svaraðu í høvuðsheitum til tað, tey høvdu fiskað har undanfarnu árini. Spania og Portugal verða

hildin uttanfyri felags kvotuskipanina hjá ES fram til ár 2002 - tó við møguleika fyri stillingum í 1996.

**Noreg** - Í norsku limaskapssamráðingum vóru partarnir samdir um, at treytirnar hjá ES-førum fyri at sleppa í norskan sjógv skuldu vera á leið tær somu sum frammanundan. Tey fiskiloyvi, ið vóru galdandi fyri ES-før, skuldu halda fram. Hinvegin var yvirhøvur talan um hækkaðar kvotur hjá ES-førum í norskum sjógvi. Veiðurættindi vóru í høvuðsheitum ásett við støði í veiðuni undanfarnu fimm árini. Undantikin vóru tó makrelur og toskur, har 1994 skuldi brúkast sum grundarlag fyri kvotu-ásetingum. Fyri tosk vildi hetta merkt, at parturin hjá ES uppá 2,9 prosent skuldi halda fram. Harumframt varð ískoytiskvotan í EBS-sáttmálanum uppá 11.000 tons í árunum 1994-1997 staðfest. Eftir 1997 skuldi hendan ískoytiskvotan ásetast sum 1,57 prosent av heildarkvotuni fyri arktiska toskastovnin.

**Relativur stabilitetur** - Meginreglan um relativan stabilitet í veiðurættindum í ES ger, at tað veiðumynstur, sum ES-londini hava havt við Føroyar, verður varðveitt.

- Tað landið í ES, sum trokar mest á at fáa veiðurættindi aðrastaðni - Spania - hevur eingi søgulig rættindi við Føroyar. Í eini samráðingarstøðu, har vit verða noydd at lata veiðurættindi, kann hetta verða eitt gott kort at hava á hondini. Havast skal tó í huga, at fiskivinnupolitiska trýstið frá Spania innanhýsis í ES er stórt. Hetta sannaðu norðmenn, tá teir samráddust um limaskap í ES.

**12 fj. strandaleiðir** Um Føroyar gerast partur av ES, verður grundreglan, at ES-fiskifør kunnu fiska sínar kvotur allastaðni í føroyskum øki ella ið hvussu so er á tí ICES-øki, kvotan er knýtt at. Sambært galdandi reglum í ES hava limalondini rætt at hava 12 fj. fiskimark. Innanfyri hetta mark kunnu tey sjálvi áseta reglur fyri fiskiskapin, sum tó skulu vera innanfyri karmarnar av felags fiskivinnupolitikkinum. Fiskifør úr øðrum limalondum sleppa bert at fiska, um tey hava søgulig rættindi innanfyri 12 fj. Strandaleiðir (út til 12 fj.) vóru upprunaliga ætlaðar londum ella landspørtum, sum eru serliga bundin at fiskivinnu. Hóast ES-nevndin ikki hevur sett nakrar nágreiniligar reglur fyri, nær eitt øki er serliga bundið at fiskivinnu, so er lítil ivi um, at Føroyar eru eitt slíkt øki.

**Føroyakassin?** Hetlandskassin er partur av felags fiskivinnupolitikkinum í ES og er beinleiðis nevndur í Lógskipanini. Á hesum leiðum er atgongdin hjá størri fiskiførum avmarkað, og serligt veiðuloyvi krevst. Hesi veiðuloyvi verða umsitin av ES-nevndini.

Á Føroyaleiðini eru í dag fleiri kassar við á leið sama endamáli sum Hetlandskassin (trolfrí øki, vernd av húkaveiðu, gýtingarleiðir osfr.). Gerast vit ein partur av ES, er sum útgangsstøði torført at ímynda sær, at tað fer at bera til at skipa slíkar kassar uttanfyri 12 fj. Men hinvegin er ein møguleika tó at gera alla Føroyaleiðina til ein kassa, og at meginreglurnar í galdandi fiskiveiðusáttmála koma at halda fram.

Ein onnur grundgeving fyri at skipa alla Føroyaleiðina sum ein serligan kassa er, at sambært fiskifrøðingum eru botnfiskastovnarnir undir Føroyum lokalir stovnar, sum bert eru í føroyska sjógvi. Í síni tíð var ein av grundgevingunum fyri at skipa eitt felags ES-hav og felags fiskiveiðupolitikk, at fiskastovnarnir í Norðsjónum vóru felagsstovnar, sum ferðaðust millum leiðirnar hjá fleiri londum. Skuldi stovnsrøktin tryggjast, var neyðugt at londini samstarvaðu.

**Veiðurættindi hjá føroyskum fiskiførum á ES-leiðum**

Á sama hátt, sum onnur ES-før fáa fiskirættindi undir Føroyum, fáa føroysk fiskifør møguleika at fiska á leiðunum hjá øðrum ES-londum. Eins og í áðni verður grundarlagið fyri kvotutilluting søgulig veiða ella tann partur av heildarkvotununum í ES, sum Føroyar sum triðjaland hevur rætt til sambært meginregluni um relativan stabilitet. Hetta merkir, at um vit gerast partur av ES, fara veiðumøguleikar okkara í ES-sjógvi, íroknað Grønland, helst at vera teir somu sum tey seinnu árini.

Tá Spania gjørdist limur í ES, varð teirra partur av heildarkvotunum í ES ásettur við støði í søguligum veiðutølum. Úrslitið av norsku limaskapssamráðingunum var, at partarnir vóru samdir um, at tað veiðumynstrið, sum hevði ment seg innanfyri karmarnar av sínámillum fiskiveiðusáttmálunum, í høvuðsheitum skuldi halda fram. Tó var tað so, at av tí at eitt fimm ára tíðarskeið varð lagt sum grundarlag fyri áseting av kvotum og kvotupørtum (undantikið makrel), komu hesir ikki heilt at avspegla gongdina undanfarnu árini. Tær nærri ásetingarnar og treytirnar fyri norskum fiskiskapi á ES-leiðum skuldu vera á leið tær somu. M.a. tá tað snúði seg um stongdar leiðir og reglur fyri reiðskap.

**Kvotuhoppan**

Úrskurðirnir hjá ES-dómstólinum í málunum um kvotuhoppan staðfesta m.a., at limalondum ikki er loyvt við støði í tjóðskapi at seta treytir um manning og ognarviðurskifti í sambandi við fiskifør.

Úrskurðirnir merkja, at kvotubýtisskipanin ikki longur er nøkur trygd fyri, at limalondini kunnu varðveita sín part av fiskatilfeinginum hjá ES, sum meginreglan um relativan stabilitet leggur upp til. Kvoturnar verða framvegis tillutaðar teimum einstøku limalondunum, men eingin trygd er fyri, at tað eru fiski- og útróðrarmenn í viðkomandi limalandi, sum einsamallir sleppa at fiska kvoturnar.

**Noreg og kvotuhoppan**

Tá norðmenn samráddust við ES, førdu teir m.a. fram, at kvotuhoppan ikki er í samsvar við kvotubýtisskipanina í ES, tvs. relativa stabilitetin. Eitt av endamálunum við hesi skipan er at taka fyrilit fyri fiskivinnusamfeløgum og teimum vinnugreinum, sum eru tengdar at tí virksemi, sum stendst av fiskivinnuni. Norðmenn vístu eisini á, at við at loyva útlendskum ríkisborgarum uttan tilknýti til norska fiskivinnu veiðurættindi, verður ein grundleggjandi partur av norskum fiskivinnupolitikki tileinkisgjørdur.

Sambært grein 35 í norska upptøkusáttmálanum kundi Noreg í eitt trý-ára skeið varðveita reglurnar um, at bert norskir ríkisborgarar kunnu keypa fiskifør. Í felagsyvirlýsing nr.12 í upptøkusáttmálunum verður staðfest, at eitt av endamálunum við kvotubýtisskipanini í ES er at røkja serliga tørvin hjá teimum landspørtum, sum eru serliga bundnir at fiskivinnu og tí virksemi, ið har av stendst.

**Skráseting av fiskiskipum í Føroyum**

Reglurnar fyri at skráseta skip í Føroyum eru, sambært løgtingslóg nr.9 frá 5.mars 1970, broytt við løgtingslóg nr.79 frá 10.mars 1992, at fyri at skip kann metast sum føroyskt og sigla undir føroyskum flaggi, má eigarin verða føroyskur. Sum føroyskur eigari verða mettir: Føroyingar, føroyskir landsstovnar og kommunur, stovnanargrunnar og har bara føroyingar eru í leiðsluni, partsreiðarí, har føroyingar eiga í minsta lagi 2/3, og har fyrisitandi reiðarin er føroyingur, partafeløg og onnur vinnufeløg við avmarkaðari ábyrgd, sum hava valt eina nevnd, har í minsta lagi 2/3 av hesari eru føroyingar, ella onnur vinnufeløg, sum hava valt eina nevnd, har í minsta lagi 2/3 av hesari eru føroyingar. Um stovnanargrunnar, feløg ella vinnufeløg eru luttakarar í partsreiðarí ella í øðrum vinnufeløgum, má hvør einstakur luttakari lúka treytirnar fyri at vera mettur sum føroyskur eigari.

**Lógin um vinnuligan fiskiskap**

Sambært løgtingslóg nr.28 frá 10.mars 1994 um vinnuligan fiskiskap kann fiskiskapur bert fara fram við fiskiførum, sum sambært ognarviðurskiftum eru heimahoyrandi í Føroyum. Fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi krevst, at eigararnir eru einkultpersónar, einkultpersónar í felagsskapi, sum hefta persónliga, solidariskt og beinleiðis. Teir skulu hava fast tilknýti til Føroyar, allir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini og skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum. Fyri feløg er ásett, at tað skal vera partafelag, smápartafelag, lutafelag ella partsreiðarí, har partabrøvini skulu vera navnapartabrøv. Eigararnir skulu lúka somu treytir sum galda fyri einkultpersónar.

Hetta merkir samanumtikið, at í galdandi lógarverki eru lutfalsliga strangar reglur fyri at eiga fiskifar og at fáa veiðurættindi í Føroyum. Stórur dentur verður lagdur á tjóðskap, soleiðis at tey fiskifør, sum kunnu hava veiðurættindi, eru føroysk og at eigararnir hava mest møguligt tilknýti til Føroyar.

Um vit gerast partur av ES, er greitt, at tað verður torført at varðveita slíkar reglur, tí tær eru ikki í samsvar við galdandi meginreglur hjá ES um, at mannamunur ikki skal gerast á ES-borgarum, tá talan er um møguleikar at stovnseta virksemi. Hetta er kjarnin í úrskurðunum hjá ES-dómstólinum í málunum um kvotuhoppan.

Men hinvegin sigur dómstólurin í úrskurðunum eisini, at hóast nasjónalar kvotur kunnu fiskast av borgarum úr øðrum limalondum, so eru hesi rættindi treytað av, at "reelt fíggjarligt samband" er millum veiðufar og flaggstat. Hvussu hetta skal tulkast, er tó ógreitt.

**Veiðuavtalur við triðjalond og millumtjóða felagsskapir**
ES hevur eksklusivan myndugleika at samráðast og at gera fiskiveiðusáttmálar við lond, sum eru uttanfyri ES. Um Føroyar gerast partur av ES, merkir hetta í høvuðsheitum, at fyri tær fiskiveiðuavtalur, sum Føroyar í dag eru partur, verður tað ES - og ikki Føroyar/Danmark - sum í framtíðini kemur at standa fyri samráðingunum. Hetta er galdandi bæði fyri veiðurættindi í triðjalands sjógvi og samstarvi í multilateralum stovnum. Tær avtalur, sum vit hava í dag, verða yvirtiknar av ES - antin beinanvegin ella tá tær fara úr gildi - og at ES í framtíðini kemur at samráðast okkara vegna. Samráðingar og undirskriving av nýggjum fiskiveiðusáttmálum millum almennar myndugleikar er eisini undir heimildarøkinum hjá ES-stovnum.

**Noreg og samráðingar við triðjalond**

Í samband við rættin at samráðast við triðjalond kann nevnast, at eitt av úrslitunum av limaskapssamráðingunum hjá norðmonnum var, at Noreg bert slapp at varðveita rættin at samráðast við Russland um havleiðirnar norðanfyri 62.stig fram til 30.juni 1998. Tað vil siga, at í hesi tillagingartíð skuldi galdandi skipan við felags norsk-russisku fiskivinnunevndini halda fram. Men eftir hetta skuldi ES heilt yvirtaka samráðingarrættin.

Føroyingar hava í dag fiskiveiðusáttmálar við fleiri lond. Umframt ES, so er talan um Noreg, Russland, Ísland, Baltalond. Harafturat fáa vit tillutað veiðurættindi í altjóða sjógvi á Flemish Cap (NAFO) og við Svalbard (Noreg).

Um Føroyar gerast ein partur av ES, er hugsandi, at fiskiveiðusáttmálarnir, vit hava við onnur lond, verða ein av teimum truplu samráðingarspurningunum. Hetta er kanska serliga galdandi fyri Barentshavið. Sum partur av ES koma vit at kappast við onnur ES-lond um veiðumøguleikar, eitt nú tey iberisku londini.

Somuleiðis er hugsandi, at um vit gerast partur av ES, kunnu trupulleikar stinga seg upp við Íslandssáttmálanum. Hetta hevur m.a. samband við, at ein týðandi partur av íslendskum fiskivinnupolitikki eftir toskakrígginі og fiskimarksútflytingarnar hevur verið, at ES-før ikki skulu hava rættindi í íslendskum sjógvi. EBS-sáttmálin gevur heldur ikki ES kvotur av vanligu botnfiskasløgunum við Ísland.

**Millumtjóða felagsskapir**

Ein onnur avleiðing av eksklusiva rættinum hjá ES í fiskivinnumálum er, at ES kemur at umboða okkum í millumtjóða fiskiveiðufelagsskapum sum NAFO, NEAFC og NASCO.

Um vit hava gongdina í millumtjóða fiskiveiðu og fiskiveiðupolitikki tey seinnu árini í huga, kann hetta koma at gerast ein stórur trupulleiki. Á ST-ráðstevnuni um fiskiskap í altjóða sjógvi, í NAFO-samstarvinum og nú viðvíkjandi norðhavssildini í NEAFC hevur ES ikki drigið somu línu sum meirilutin av luttakaralondunum, Føroyar-/Danmark íroknaði. Andsagnirnar millum sjónarmiðini hjá Føroyum og ES viðvíkjandi fiskastovnum í altjóða sjógvi eru tí stórar. Støða ES' er í høvuðsheitum eitt úrslit at innanhýsis trýsti frá Spania.

**Samandráttur**
Um vit gerast partur av ES, er torført frammanundan at siga, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri føroyskan fiskivinnupolitikk og veiðurættindi. Tó er greitt,

- at avgerðarrætturin í fiskiveiðumálum og heimildin at regulera fiskiskapin á Føroyaleiðini í høvuðsheitum kemur at liggja hjá ES.

- at tað veiðumynstur, sum hevur verið innanfyri karmarnar av galdandi fiskiveiðusáttmála, í høvuðsheitum fer at halda fram.

- at ES yvirtekur samráðingarrættin um veiðurættindi hjá triðjalondum. Veiðurættindi sum vit í dag hava við Ísland og í Barentshavinum, kunnu gerast ein av teimum truplu samráðingarspurningunum.

Hvussu leikur annars fer, um vit velja at gerast ein partur av ES, er í fyrstu atløgu ein samráðingarspurningur. Høvuðsorsøkin til, at tað næstan er ógjørligt at koma við haldgóðum svarum, er, at ES onga avtalu hevur við lond, sum eru í somu støðu sum Føroyar. Tvs. pinkutjóð, atland og við fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Fiskivinnan er, hóast hon hevur lítlan týdning fyri BTÚ í ES, ein politisk sera viðbrekin vinna. Fiskivinnusamráðingar eru tí torførar og fløktar.

## 6.3 Evropeiska Búskaparliga Samstarvið (EBS) og fiskivinna

### 6.3.1 Inngangur
Í mei 1992 undirskrivaðu tey 12 ES-londini og tey 7 EFTA-londini sáttmálan, sum legði lunnar undir Evropeiska Búskaparliga Samstarvið (EBS). Í teimum 129 greinunum, 48 protokollunum, 22 fylgiskjølunum og 40 felagslýsingunum, sum tilsaman rúgva einar 800 síður, eru eisini ásetingar, sum hava við fiskivinnu at gera: Marknaðaratgongd fyri fisk, fiskiveiða og veiðurættindi, almennur studningur og kappingaravlaging, atgongd til havnir, transitt, atgongd til at gera íløgur í fiskivinnuna.

### 6.3.2 Marknaðaratgongd
Útgangsstøðið í EBS-sáttmálanum er, at allar vørur skulu hava frítt at fara millum ES og EFTA-londini. Hetta frælsi er tó ikki galdandi

fyri landbúnaðarvørur og fisk. Fiskur og fiskavørur verða ístaðin flokkaðar í tríggjar høvuðsbólkar (sí talvu 6.3).

| Bólkur | Fiskaslag/-vørur |
|---|---|
| 1. Fult tollfrælsi frá 1.januar 1993 | Toskur, hýsa, upsi, kalvi, svartkalvi. Feskt, fryst, fesk fløk. Fiskapinnar og kaviarlíki. |
| 2. Ongar tolllækkingar ("viðbrekin fiskasløg") | Sild, makrelur, laksur, rækjur, jákupsskel, hummari, mjøl og lýsi. |
| 3.Tollurin skal lækkast 70% innan 1.1. 1997 | Annað, sum ikki er nevnt í bólki 1 og 2. |

*Talva 6.3: Tollur á fiski- og fiskavørum í EBS-sáttmálanum*

ES er nettoinnflytari av fiski og fiskavørum. Hetta og tað, at summi EFTA-lond, serliga Noreg og Ísland, hava lágan ella ongan toll á innflutningi av fiskavørum, ger, at tær tollsømdir, sum EFTA hevur veitt ES, hava lítlan praktiskan týdning. Hinvegin hava tollsømdirnar, sum ES hevur givið EFTA, alstóran týdning fyri Ísland og Noreg. Hjá Noreg, sum útflytur 90 prosent av síni fiskaframleiðslu, fara eini 60 prosent av fiskinum til ES-marknaðin. Hjá Íslandi eru góð 78 prosent av útflutninginum fiskur. Eini 70 prosent av íslendska fiskaútflutninginum fer til ES. Hóast londini fingu betri tollsømdir við teimum fríhandilsskipanum, sum vórðu undirskrivaðar fyrst í 1970-árunum, so vóru tollgjøldini mett sum ein forðing fyri handilin við fiski úr EFTA-londunum til ES, serliga við góðskaðum fiskavørum. Eftirgevingarnar frá ES í EBS-sáttmálanum á flestu hvítfiskavørum gagna sum heild Noreg og Íslandi. Saman við einum 70 prosent niðurskurði í grundtollinum á fleiri øðrum fiskavørum merkir hetta, at tollurin á flestu fiskavørum fer at liggja millum 0,9 og 4 prosent í 1997.

**Ikki fríhandil**

Men hóast talan er um munandi betri tollsømdir fyri EFTA-fisk á ES-marknaðinum, so er ikki farið so langt, sum EFTA-londini upprunaliga kravdu í samráðingunum, tvs. fríhandil fyri allan fisk og fiskavørur. Summi fiskasløg hava ongar tollsømdir fingið. Her er m.a. talan um sild, makrel, rækjur og ikki minst laks. Hjá eini alitjóð sum Noreg er hetta síðsta avgjørt ikki nakar fyrimunur. Aldur laksur er tey seinnu árini vorðin ein støðugt hækkandi partur av norska

útflutninginum. Hóast ES-tollurin er lágur á feskum og frystum laksi, so fekst ongin tollniðurskurður á royktum laksi.

**6.3.3 Fiskiveiða og fiskirættindi**

Longu í byrjanini av EBS-samráðingunum gjørdi ES greitt, at treytin fyri at fáa betri handilssømdir á ES-marknaðinum var, at ES fekk veiðurættindi í EFTA-sjógvi. Hóast samráðingarnar um veiðurættindi fóru fram samstundis sum EBS-samráðingarnar, so gjørdust veiðurættindini ikki ein beinleiðis partur av endaliga EBS-sáttmálanum, men vóru knýtt at sjálvstøðugum fiskiveiðusáttmálum millum ES og tey einstøku EFTA-londini. Hesir sáttmálar komu í gildi samstundis sum EBS-sáttmálin. Talan er um fiskiveiðusáttmálar við Noreg, Ísland og Svøríki.

**Noreg**

Rammusáttmálin millum Noreg og ES er upprunaliga frá 1980 og gevur ES-førum atgongd til norskan sjógv. (Grundreglurnar í sáttmálanum eru á leið tær somu sum í okkara fiskiveiðusáttmála við ES). Í sambandi við EBS-sáttmálan var í fiskiveiðusáttmálanum fyri 1992 millum Noreg og ES ásett, at Noreg skal økja partin hjá ES av norska arktiska toskastovninum frá verandi 2,14 prosentum (í 1991) til 2,9% galdandi frá 1993. Harafturat skuldi Noreg lata ES eina eyka toskakvotu fyri tíðarskeiðið 1993-1997, sum skuldi hækkast so líðandi úr 6.000 tonsum í 1993 uppí 11.000 tons í 1997. Noreg skuldi eins og frammanundan lata ES eina kongafiskakvotu uppá 1.500 tons. ES viðurkendi sínumegin, at nevndu rættindi skuldu geva Noreg tilsvarandi rættindi í ES-sjógvi, og at kvotubýtið yvirhøvur skuldi fara fram á ein hátt, sum tryggjaði javnvág í sínámillum veiðurættindum.

**Ísland**

ES-før høvdu ikki havt veiðurættindi í íslendskum sjógvi í nógv ár. Sínámillum sáttmálin millum Ísland og ES var tí heilt nýggjur og ikki eitt framhald av einum verandi sáttmála. Fiskiveiðusáttmálin sigur, at Ísland skal lata ES 3.000 tons av kongafiski, og at íslendsk fiskifør afturfyri fáa 30.000 tons av lodnu í Eystur-Grønlandi.

**Svøríki**

Sáttmálin við Svøríki er minni umfatandi enn hinir báðir, við tað at har verður ásett, at ES-før sleppa at halda fram í ES-sjógvi, eins og ES-Svøríki fiskivinnusáttmálin frá 1977 ásetir.

Gongdin í EBS-samráðingunum og teir tríggir fiskiveiðusáttmálarnir eru dømi um vanliga politikkin hjá ES mótvegis triðjalondum tey seinnu árini. Hesin politikkur er í stuttum, at treytin fyri at fáa betri marknaðarsømdir í ES er, at ES-før fáa veiðurættindi frá viðkomandi

landi. Hesin politikkur er m.a. eitt úrslit av, at tá Spania og Portugal komu upp í ES í 1986, vóru tey í fyrsta umfari hildin uttanfyri felags fiskiveiðupolitikkin hjá ES (kvotubýti o.a.) og fingu at kalla eingi veiðurættindi í ES-sjógvi. Undir limaskapssamráðingunum við portugisar og spaniólar bant ES seg til at skaffa teimum veiðurættindi aðrastaðni, serliga í Afrika og Suður-Amerika.

### 6.3.4 Almennur studningur og kapping

**Almennur studningur**

EBS-sáttmálin hevur eisini ásetingar um kappingaravlaging í samband við almennan studning og onnur almenn inntriv. Høvuðsreglan er, at almennur studningur til fiskivinnuna, sum avlagar kappingina, skal avtakast. Tá metast skal um, hvat er kappingaravlagandi, skulu reglurnar í Rómarsáttmálanum og aðrar ásetingar í fiskivinnulóggávuni hjá ES leggjast til grund.

Rómarsáttmálin ásetir, at við ávísum undantøkum er almennur stuðul, sum avlagar ella hóttir við at avlaga kappingina, og sum ávirkar handilin millum limalondini, ikki loyvdur. Rómarsáttmálin heimilar ES-nevndini at áseta nærri reglur um hetta.

Loyvt er hinvegin at veita studning, sum hevur til endamáls at lætta um menningina av ávísum vinnugreinum ella búskaparligum økjum. Hetta er tó treytað av, at studningurin ikki broytir fyritreytirnar fyri samhandlinum á ein hátt, sum er í stríð við felags áhugamál.

Ásetingarnar um kappingaravlagandi studning hava ikki serliga stóra ávirkan á fiskivinnuna í EFTA-londunum, tí longu í 1989 samtykti EFTA-londini, at innan árslok 1993 skuldi allur kappingaravlagandi almennur studningur til fiskivinnuna avtakast. (Samanber treytirnar hesum viðvíkjandi í okkara handilsavtalum við EFTA-londini). Samanumtikið ber til at siga, at EFTA-londini kunnu veita tey sløg av studningi, sum eru loyvd sambært ES-programmum og -skipanum.

**Onnur kappingaravlaging**

EFTA-londini mugu broyta ella avtaka alla lógir og reglur innan keyp og sølu av fiski, sum avlaga kappingina millum partarnar í EBS-samstarvinum. Tá metast skal um, hvat er kappingaravlaging, skulu ES-reglurnar í marknaðarskipanini fyri fisk og fiskavørur leggjast til grund. Partar av marknaðarskipanini eru undantøk frá høvuðsreglunum í Rómarsáttmálanum um kapping o.a. Produsent-

feløg og prísskipanin fyri fisk- og fiskavørur verða t.d. ikki roknað sum kappingaravlagandi.

Løgfrøðingarnir Robin Churchill og Peter Ørebeck siga í sínum metingum av EBS-sáttmálanum, at spurningurin eftir øllum at døma ikki er um, at EFTA-londini skulu yvirtaka ES-reglur um fiskimarknað og -umsetning, men heldur at lóggáva í EFTA-londunum skal vera í samsvar við ES-reglur.

Hesar ásetingar í EBS-sáttmálanum um keyp og sølu av fiski hava størst ávirkan á Noreg, sum í nógv ár hevur skipanir, sum hava givið fiskimannafelagsskapum lógarvardan einkarætt í fyrstahondsumsetninginum av fiski.

**Anti-dumping**

Umframt greinar um kappingaravlaging í samband við handil við fisk og fiskavørur fiskavørum hevur EBS-sáttmálin eina grein, har sagt verður, at sáttmálalondini skulu tryggja kappingartreytir, soleiðis at hini sáttmálalondini ikki brúka anti-dumpingar atgerðir ella verjutoll. EFTA-londini høvdu upprunaliga vónað, at møguleikin fyri at nýta anti-dumpingar atgerðir fyri fiskavørur als ikki skuldi takast við í EBS-sáttmálanum, men ES helt fast við, at hesin møguleikin skuldi vera til staðar.

### 6.3.5 Atgongd til havnir

EBS-sáttmálin ásetir, at fiskifør úr sáttmálalondunum skulu hava javnbjóðis atgongd til havnirnar hjá hvørjum øðrum. ES-londini høvdu longu javnbjóðis atgongd til havnirnar hjá hvørjum øðrum, og EFTA-londini høvdu nýliga sett líknandi skipan í verk. Endamálið við hesi áseting er tí at tryggja fiskiførum úr sáttmálalondunum javnbjóðis atgongd til havnir og landingarstøð hjá hvørjum øðrum.

**Javnbjóðis atgongd**

Talan er um *javnbjóðis* atgongd og ikki *fría* atgongd. Hetta merkir, at eitt land, sum er partur av EBS, skal veita fiskiførum úr øðrum sáttmálalondum somu atgongd til havnir, sum tað veitir sínum egnu fiskiførum. Tvs. at eitt land ikki kann skerja atgongdina til havnir við støði í nationaliteti. Hinvegin ber tað til at avmarka atgongdina við støði í objektivum faktorum, sum t.d. skipastødd ella hvat fiskifarið hevur inni.

Hesar ásetingar hava fyri tað fyrsta við sær, at møguleikin hjá EFTA-londum at áleggja egnum fiskiførum at avreiða heima, eitt nú fyri at tryggja arbeiðspláss í fiskiídnaðinum, verður skerdur. Fyri tað annað

er tað torførari hjá EFTA-londunum at halda eftirlit við, hvussu nógv verður fiskað. Sama er galdandi fyri ES-londini.

**Landingar-bann**

Sáttmálalondini kunnu seta landingarbann móti veiðu frá fiskastovnum av felags áhuga, og sum álvarslig umsitingarlig ósemja er um. Hóast tað ikki verður nærri tilskilað í sáttmálanum, so er her helst talan um felagsstovnar, tvs. stovnar sum eru í ella ferðast millum sjóøkini hjá tveimum ella fleiri londum. Ella stovnar sum bert eru í økinum hjá einum sáttmálaparti, men sum ein annar partur heldur seg hava rætt til at fiska av. Talan kann eisini vera um stovnar, sum eru í ella ferðast út í altjóða sjógv. Tað er ikki óvanligt, at trætur taka seg upp um slíkar stovnar. Dømi er tvídrátturin millum Noreg og ES um fiskastovnar í Norðsjónum og Skagerrak, fiskiskapurin í Smoguni í Barentshavinum og fiskileiðirnar í altjóða sjógvi við Ný-fundland. Norðmenn styðjaðu seg til EBS-sáttmálan, tá teir herfyri settu ES-nótabátum forboð at landa norðhavssild í Noreg.

**5.3.6 Transitt**

ES ynskti frían transitt fyri fisk og fiskavørur, tað vil siga at ES-fiskifør skuldu kunna leggja veiðuna upp í einum EFTA-landi, og at veiðan síðani kundi flytast eftir landi gjøgnum t.d. Noreg til virkini í ES. Men vegna fyrivarni frá EFTA fekst eingin semja um hendan spurning undir samráðingum um EBS-sáttmálan. Norðmenn vildu sínumegin hava, at ES-veiðan, sum varð løgd upp í Noreg, skuldi fara um norsku *salgslags*-skipanina. Í EBS-sáttmálanum er bert ein einsíðug yvirlýsing frá ES um transitt.

**6.3.7 Atgongd til og íløgur í fiskivinnuni**

EBS-sáttmálin umrøður ikki beinleiðis spurningin um atgongd til ella íløgur í fiskivinnuna. Hinvegin eru fleiri aðrar ásetingar í sáttmálanum, sum hava stóran týdning fyri hesi viðurskifti. Hesar ásetingar snúgva seg um frítt at fara hjá arbeiðsmegi og kapitali, møguleikarnar fyri at seta á stovn virki o.a.

**Arbeiðsmegi**

EBS-sáttmálin ásetir, at arbeiðsmegin kann flyta frítt millum ES-lond og EFTA-lond. Hendan áseting er í stóran mun ein víðkan av frælsinum í ES til eisini at fevna um EFTA. Av tí at ES-dómstólurin hevur gjørt úrskurð um, at fiski- og útróðrarmenn eru "arbeiðsmegi", hava hesir eisini frítt at fara úr einum EBS-landi í eitt annað og arbeiða har sum fiskimenn.

**Stovnsetan av virkjum**

EBS-sáttmálin ásetir fult frælsi at seta á stovn virki. Hetta merkir í høvuðsheitum, at ein vinnurekandi í einum ES- ella EFTA-landi kann flyta til eitt annað ES- ella EFTA-land og fara undir vinnu undir somu treytum og reglum sum fólkið har. Fyritøkur kunnu eisini seta á stovn nýggjar fyritøkur ella dótturfeløg í einum øðrum sáttmálalandi.

**Kvotuhoppan**

Ein áhugaverdur spurningur í sambandi við fiskivinnu og EBS er úrskurðurin hjá ES-dómstólinum á sinni um, at Rómarsáttmálin skal tulkast soleiðis, at tað ikki bert skal vera møguligt hjá sjálvstøðugum vinnurekandi ella virkjum í einum ES-landi at seta virksemi á stovn í einum øðrum ES-landi, men eisini at kunna skráseta skip síni í einum øðrum ES-landi og fiska av kvotum, sum viðkomandi land hevur fingið tillutað sambært býtislyklinum í felags fiskiveiðupolitikkinum. Hendan mannagongd, sum verður rópt kvotuhoppan, hevur serliga verið brúkt av spaniumonnum, sum hava skrásett skip síni í Írlandi og Bretlandi.

Íslendingar og norðmenn stúrdu fyri, at meginreglan í EBS-sáttmálanum um frítt at seta virki á stovn, fór at føra við sær, at ES-áhugamál fóru at seta seg niður í Íslandi og Noreg, skráseta skip síni har og sostatt fáa veiðurættindi í íslendskum og norskum sjógvi, har tey frammanundan høvdu avmarkað rættindi. Hesin óttin var orsøkin til, at fleiri týðandi undantøk eru tikin við í EBS-sáttmálan viðvíkjandi fiskivinnuni.

Í einum fylgiskjali til EBS-sáttmálan, sum snýr seg um rættin at seta virki á stovn, at gera íløgur o.a., verður sagt, at Ísland kann varðveita tær avmarkingar, sum eru fyri útlendingar at fara undir virksemi í fiskiveiðu og fiskavirking. Fyri Noreg fevnir undantakið bert um veiðuliðið.

Av tí at bæði Ísland og Noreg, tá ið EBS-sáttmálin varð undirskrivaður, høvdu lógarverk, sum avmarkaðu rættin hjá útlendingum at eiga í fiskiførum, bendir alt á, at eingin beinleiðis kvotuhoppan fer at vera sum ein avleiðing av EBS-sáttmálanum.

**Kapitalur**

Sambært EBS-sáttmálanum er prinsippielt einki til hindurs fyri, at kapitalur kann flyta frítt millum ES- og EFTA-lond. Tí kunnu fyritøkur í ES- ella EFTA-londum frítt gera íløgur hjá hvørjum øðrum. Ísland og Noreg bóru tó ótta fyri, at hetta frælsi fór at hava óhepnar avleiðingar fyri partar av fiskivinnuni. Eitt nú at fiskivinnufyritøkur í útjaðaraøkjum fóru at flyta til miðøkini, ella at útlendskar íløgur í

skip fóru at gera, at fiskurin fór at verða avreiddur aðrastaðni og sostatt taka grundarlagið undan fiskavirkingini á staðnum.

Fyri at sleppa undan hesum hevur EBS-sáttmálin fleiri týðandi undantøk frá høvuðsregluni um, at kapitalur hevur frítt at fara. Ásetingarnar merkja í stuttum, at Ísland og Noreg í høvuðsheitum kunnu varðveita tað lógarverk, sum avmarkar møguleikarnar hjá útlendingum at gera íløgur í fiskivinnuna (fyri Noreg: veiðuliðið; fyri Ísland: veiðu- og virkislið).

**6.3.8 Samandráttur**

EBS-sáttmálin áleggur ikki EFTA-londunum at seta í verk ES-lógarverk á fiskivinnuøkinum. Tað er bert innan ávís øki - almennur studningur, marknaðarføring og handil - har kravt verður, at EFTA-lóggávan skal fylgja meginreglunum í ES-lóggávuni. EBS-sáttmálin hevur tí ikki sum endamál at fáa í lag ein serligan EBS-fiskivinnu-politikk. Sáttmálin snýr seg í høvuðsheitum um liberalisering av handlinum við fiski og fiskavørum millum ES- og EFTA-londini (tó ikki fullkomnan fríhandil) og avleiðingarnar av eini slíkari liberal-isering, eitt nú reglur sum skulu forða fyri kappingaravlaging í samband við almennan studning og marknaðarinntriv. Somuleiðis tryggjar sáttmálin fiskiførum úr sáttmálalondunum javnbjóðis atgongd til ES- og EFTA-havnir.

Veiðurættindi eru sum so ikki partur av EBS-sáttmálanum. Sjálv-støðugar sínámillum fiskiveiðuavtalur geva ES-fiskiførum rúmari ræsur í íslendskum og norskum sjógvi sum kompensasjón fyri betri marknaðarsømdir í ES.

EBS-sáttmálin hevur eisini ásetingar og serskipanir, sum í rættuliga stóran mun skerja møguleikarnar hjá ES-borgarum at gera íløgur í íslendska og norska fiskivinnu.

Tað er lítið, sum bendir á, at ásetingarnar í EBS-sáttmálanum fiski-vinnu viðvíkjandi fara at halda fram í verandi líki í allari framtíð. Talan er m.a. um at samráða seg lidnan við summar partar av avtaluni, sum semja í fyrsta umfari ikki fekst um, m.a. anti-dumping og transitt. Harumframt ásetir protokoll 46 í avtaluni, at partarnir við tvey ára millumbili skulu endurskoða avtaluna. Fortreytirnar fyri EBS-avtaluni broyttust eisini rættuliga nógv, tá trý EFTA-lond - Finnland, Svøríki og Eysturríki - gjørdust limir í ES frá 1.1.1995.

## 6.4 Hvala- og fuglaveiða

Hóast hvala- og fuglaveiða ikki formliga er ein partur av felags fiskvinnupolitikkinum í ES, so verður hesin táttur kortini heilt stutt umrøddur her.

**Øll hvala-veiða bannað**

Sambært tí sonevnda *habitatdirektivinum* hjá ES er høvuðsreglan, at øll veiða eftir hvali (eisini grindahvali) er bannað. Limalondini hava tó møguleika undir gjølliga eftiransaðum treytum í hvørjum einstøkum føri at geva undantak frá hesi reglu.

Tá undantaksreglan verður nýtt, skulu limalondini annað hvørt ár geva eina frágreiðing um nýtsluna av undantaksregluni, og avgerðin kann verða eftirkannað av ES-ráðnum.

Noreg royndi í upptøkusamráðingunum at fáa m.a. sildrekan av listanum yvir vard hvalasløg, men hetta eydnaðist ikki. Tí er mangt, sum bendir á, at hvalaveiða og grindadráp verður ein av torføru samráðingarspurningunum, um Føroyar velja at fara uppí ES. Føroysk sjónarmið eru grundleggjandi øðrvísi enn ES-sjónarmið. Tað er lítið, sum bendir á, at ES fer at geva Føroyum serskipanir á hesum øki.

**Fuglaveiða**

Fuglaveiða er umfatað av *fugladirektivinum*. Høvuðsreglan er, at øll ræning av eggum frá villum fuglasløgum er bannað. Limalondini hava tó møguleika undir gjølliga eftiransaðum treytum í hvørjum einstøkum føri at geva undantak frá hesi reglu. Limalondini skulu á hvørjum ári geva ES-ráðnum, sum hevur eftirlit við, at direktivið verður hildið, gjølliga frágreiðing um gjørd undantøk.

Somuleiðis er sum høvuðsregla øll veiða av villum fugli bannað, men undantøk eru gjørd fyri ávís fuglasløg. Noreg fekk undir samráðingunum um ES-limaskap víðkað undantøkini við onkrum fuglaslagi, men viðvíkjandi summum skarvasløgum, ritu, ravni, álku, lomviga, teista og lunda vísti ES til almennu undantaks-regluna, sum limalondini hava møguleika at brúka.

# KAP. 7 Landbúnaðarpolitikkur í ES

## 7.1 Inngangur

Felags landbúnaðarpolitikkurin í ES varð settur í gildi í 1960-árunum. Í dag er hann tað politiska málsøkið í ES, sum er mest samansjóðað í felags stovnar og skipanir. Regluverkið er í vavi eisini nógv tað størsta - yvir 1.500 ymiskar ásetingar ella umleið 20.000 síður, svarandi til umleið ein triðing av allari ES-lóggávuni. Landbúnaðarpolitikkurin leggur somuleiðis hald á størsta partin av samlaðu fíggjarætlanini hjá ES. Í 1980-árunum legði landbúnaðarpolitikkurin hald á upp til 70% av ætlanini. Í 1993 var parturin tó komin niður á góð 55% av samlaðu fíggjarætlanini.

**Endamál**

Felags landbúnaðarpolitikkurin er reguleraður í grein 38-47 í Rómarsáttmálanum. Endamálini eru sambært grein 39:

- at økja um produktivitetin og á hendan hátt tryggja bóndunum rímilig livilíkindi,
- at tryggja støðugar marknaðar,
- at tryggja matvøruveitingarnar, og
- at tryggja brúkarunum rímiligar prísir.

Endamálini eru ikki altíð sambærlig, t.d. ynskið um at tryggja bóndunum rímilig livilíkindi og ynskið um at tryggja brúkaranum rímiligar prísir. ES-ráðið hevur higartil mest lagt seg eftir at halda marknaðirnar í eini tryggari legu fyri at tryggja bóndunum rímilig livilíkindi einamest við at borga fyri minstaprísum á flestu landbúnaðarvørum.

**Meginreglur**

Til tess at røkka hesum endamálum byggir landbúnaðarpolitikkurin í ES á hesar meginreglur:

- Felags marknað fyri landbúnaðarvørur
- Verjutoll móti innflutningi av landbúnaðarvørum úr triðjalondum, og
- Felags fígging av tiltøkum í landbúnaðinum

**Ovframleiðsla** Ein av álvarsligu trupulleikunum í landbúnaðinum í ES er ovframleiðsla. Í eini roynd at koma hesum trupulleika til lívs vórðu minstuprísirnir lækkaðir í 1992. Stuðulin verður nú í størri mun givin beinleiðis til framleiðsluorkuna (areal- og djórastuðul). Hann er eisini í størri mun vorðin tengdur at, at framleiðslan verður hildin innan fyri ávís mørk (kvotur). Størri dentur verður lagdur á at stuðla bygnaðarbroytingum, t.d. stuðul til minking av framleiðsluorku, umlegging til aðra framleiðslu, framskundaða pensión, o.a.m.

## 7.2 Tættirnir í landbúnaðarpolitikkinum

Landbúnaðarpolitikkurin í ES hevur tveir høvuðstættir: Marknaðarskipanirnar og bygnaðarpolitikkin.

**Marknaðarskipanir** Marknaðarskipanirnar, sum verða 100% fíggjaðar av ES, eru tann mest týðandi tátturin í felags landbúnaðarpolitikkinum. Tær leggja hald á umleið 90% av fíggjarætlanini til landbúnaðarpolitikkin. Tað eru ásettar marknaðarskipanir fyri allar landbúnaðarvørur av týdningi sum t.d. mjólk, korn, sukur, kjøt, vín, frukt og grønmeti.

Marknaðarskipanirnar í landbúnaðinum kunnu fevna um:

- Vernd av innmarknaðinum í ES við tolli og øðrum avgjøldum á landbúnaðarvørur úr triðjalondum.

- Trygd fyri uppkeypi av yvirskotsvørum fyri ásettar minstuprísir. Yvirskotsframleiðslan verður antin løgd á goymslu ella seld úr ES. Í tí seinna førinum verður stuðul veittur, tí heimsmarknaðarprísirnir vanliga eru lægri enn í ES. Goymslustuðul og útflutningsstuðul hevur higartil verið nógv tann størsti parturin av stuðulsskipanunum í landbúnaðarpolitikkinum.

- Eftir broytingarnar í 1992 eru areal- og djórastuðul eisini vorðin ein týðandi partur av landbúnaðarpolitikkinum í ES. Hesin stuðul svarar í høvuðsheitum til tær lækkingar í minstuprísum, sum tá vórðu framdar.

Flestu marknaðarskipanirnar fevna um øll trý punktini. Men hóast hetta so hevur innflutningurin verið stórur, av tí at nógv undantøk eru frá høvuðsregluni (GATT-reglur, avtalur við samveldislond, menningarlond/fyrrverandi hjálond).

**Bygnaðar-politikkurin**

ES letur eftir bygnaðarpolitikkinum landbúnaðinum stuðul til bygnaðarbroytingar. ES fíggjar ein part (vanliga 25 ella 50%). Restin verður fíggjað av limalandinum. Av stuðulsveitingum kunnu nevnast:

- *stuðul til íløgur* fyri at bøta um kappingarførið. Stuðul verður ikki veittur til íløgur, sum økja um framleiðsluorkuna av vørum, har framleiðslan longu er nóg stór (t.d. svínakjøt), ella til framleiðslur, har vinnan ikki hevur bygnðarbroytingar fyri neyðini (t.d. egg og flogfenað).

- *stuðul til aðra vinnu í tilknýti til landbúnaðin,* t.d. stuðul til umlegging til aðra framleiðslu, ferðavinnu, skeiðvirksemi, o.a.,

- *stuðul til fjallaøkir og onnur økir, sum liggja illa fyri* (fjalladirektivið). Hesi øki (sokallaðu Less Favoured Areas, LFA) fevna um 55% av samlaða landbúnaðarøkinum í ES. Stuðulin skal viga upp ímóti nattúrugivnum rakstrarvansum.

**Nasjónalur stuðul**

Nasjónalar stuðulsskipanir í limalondunum eru eisini ein týðandi táttur í stuðlinum til ES-landbúnaðin. Síðst í 1980-árunum var talan um einar 170 mia. kr, sum svarar til umleið helvtina av tí, sum kemur beinleiðis úr ES-grunnum. Íroknað hesum er kostnaðar-lækkandi tiltøk, gransking, leiðbeining og ráðgeving, almenna-veitingar og skattalætti. Karmarnir um hesar stuðulsskipanir eru settir í grein 42 í Rómarsáttmálanum.

**Kappingar-reglur**

Kappingarreglurnar (grein 85-94) í Rómarsáttmálanum, sum seta forboð ímóti kappingaravlagandi tiltøkum, eru eisini í høvuðs-heitum galdandi fyri landbúnaðarøkið, men enn eru reglurnar um forboð ímóti almennum stuðli ikki settar í gildi. Tó er í flestu marknaðarskipanunum ásett, at reglurnar í Rómarsáttmálanum um almennan stuðul skulu haldast.

Limalondini kunnu sum høvuðsregla ikki veita almennan stuðul, sum er kappingaravlagandi, eitt nú sum reinur rakstrarstuðul ella beinleiðis útflutningsstuðul. Hinvegin er loyvt at veita stuðul, sum hevur til endamáls at fremja dygdargóða framleiðslu, almanna-veitingar, bøta um marknaðarkorini o.a.

**Tekniskar ásetingar**

Tá innnmarknaðurin fór at virka, varð ásett, at teknisku reglurnar fyri landbúnaðarvørur skulu harmoniserast. Endamálið er at bróta niður tekniskar handilsforðingar í samhandlinum við landbúnaðar-

vørum og at tryggja somu krøv til dygd og eftirlit av matvørum í limalondunum. Teknisku ásetingarnar fevna m.a um fóður, tøð, heilsufrøðilig viðurskifti í samband við plantur og dýr o.a.

## 7.3 Føroyar og landbúnaðarpolitikkurin í ES

Um Føroyar fara uppí ES, gerast vit partur av felags landbúnaðarpolitikkinum. Hetta ber m.a. í sær, at vit fáa felags minstaprísskipanir, og at allar nasjónalar stuðulsskipanir skulu verða undir eftirliti av ES.

Eitt nærri tilknýti til ES (tollsamgonga ella limaskapur) hevur við sær:

- At føroyskir innflytarar helst missa møguleikan at keypa landbúnaðarvørur til heimsmarknaðarprís. Hesir prísir liggja vanliga væl undir prísunum í ES - sjálvt eftir uppkravi av GATT tolli. Hetta hevði aftur merkt hægri matvøruprísir í Føroyum.

- Føroyar missa møguleikan fyri marknaðareftirlitið við landbúnaðarvørum, herundir livandi djórum. Hinvegin sleppa vit undan eftirliti í samband við útflutning til ES.

- Føroyar fáa sum limur í ES part í stuðlinum eftir marknaðarskipanunum, men støddin veldst um tær framleiðslukvotur, sum verða tillutaðar Føroyum. Stuðulin til ta føroysku landbúnaðarframleiðsluna liggur sum heild eitt sindur undir stuðlinum í ES.

- Studningsskipanin til landbúnaðin skal helst umskipast samsvarandi ES-reglunum, sum ikki loyva reinan rakstarstuðul til landbúnaðin. Møguliga kann undantak fáast fyri Føroyar. Noreg, Svøríki og Finnland fingu undantøk fyri landbúnaðin norðan fyri 62. breiddarstigið. Annars kann ikki roknast við, at ES-reglurnar eru til hindurs fyri, at tann føroyski stuðulin til landbúnaðin kann verða varðveittur á sama støði, tá tann føroyski stuðulin sum heild liggur undir stuðlinum í ES.

- Væntandi kunnu Føroyar eisini fáa part av stuðulsskipanunum eftir bygnaðarpolitikkinum. Nevnast kann, at í Noreg koma 85% av landbúnaðarøkinum undir heitið *Less Favoured Areas.*

- Føroyar hava eftir fríhandilsavtaluni við ES bundið seg til at avtaka allan verjutoll á landbúnaðarvørur úr ES, tó undantikið mjólk og lambskjøt. ES-sáttmálin loyvir tó áseting av innflutningsgjøldum (javningargjøldum) á landbúnaðarvørur úr ES, í tann mun hetta er neyðugt fyri at byrgja upp fyri útflutningsstuðlinum. Eitt tættari tilknýti til ES ber helst í sær, at vit missa møguleikan at áseta javningargjald á mjólk og mjólkaúrdráttir úr ES. Tørvurin á hesum gjaldi er tó ikki tann sami, um Føroyar t.d. gerast partur av innmarknaðinum hjá ES, tí mjólkarprísurin innan fyri ES er hægri enn prísurin á heimsmarknaðinum.

- Lógartillagingar mugu gerast, fyri at vit kunna verða partur av innmarknaðinum í ES. Hetta er serliga galdandi fyri tekniskar reglur um fóður, tøð, húsdjóraaling og plantu- og djórasaniter viðurskifti.

- Spurningurin er somuleiðis, um føroyska skipanin við landsjørð er sambærlig við ES-rættin, herundir serliga reglurnar um fría stovningarrættin í ES.

# KAP. 8 Orku- og oljupolitikkur í ES

## 8.1 Inngangur

Higartil hava ES-londini ikki lagt serliga stóran dent á at skipa ein felags orkupolitikk. Orkumál hava í høvuðsheitum verið undantøk frá Rómarsáttmálanum. Limalondini hava rikið sín sjálvstøðuga politikk á hesum øki. Men í samband við innmarknaðin setti ES-nevndin sær fyri at royna at fáa hesi undantøk burtur, soleiðis at orkupolitikkur, herundir olja og gass, kom undir felags reglur og gjørdist ein partur av ES-samstarvinum.

ES-nevndin er tó ikki komin á mál við ætlanum sínum at fáa undantøkini burtur. Høvuðsorsøkin er, at mótstøðan er stór í summum limalondum, serliga teimum sum veita almennan studning til kolavinnu, kjarnorku o.a. ES-nevndin hevur tí í fyrsta umfari lagt seg eftir olju- og gassframleiðsluni. Ein orsøkin til hetta er, at í ES-høpi hevur henda vinna nógv minni týdning enn t.d. framleiðslan av el-orku. ES innflytur nærum alla sína nýtslu av olju og gassi. Hóast Bretland framleiðir nógv, so fer meginparturin av hesi framleiðslu til egna nýtslu. Annars er tað bert Danmark og Niðurlond, sum hava olju- og gassframleiðslu av týdningi.

## 8.2 Felags orkupolitikkurin hjá ES higartil

Áðrenn innmarknaður formliga varð settur í gildi í januar 1993, hevði ES ikki lagt seg eftir at fáa í lag felags orkupolitikk. Orkupolitikkurin hevur í størri mun verið tengdur at stevnumiðum og áhugamálum í teimum einstøku londunum. Eitt nú vóru stýring og skipan av innlendis marknaðum, val av orkukeldum og orkuavgjøld og -skattir nasjónal málsøki. Orkupolitikkurin hevur tí verið ymiskur í teimum einstøku londunum.

Rómarsáttmálin hevur ikki havt serskildar reglur um orku og orkupolitikk. Grein 3 í Rómarsáttmálanum nevnir tó, at tiltøk á orkupolitiska økinum skulu vera ein partur av virkseminum hjá ES. Men av tí at olja og gass eisini eru vørur, hava meginreglurnar í Rómarsáttmálanum um, at vørur hava frítt at fara, etableringsreglurnar, forboð móti almennum studningi og øðrum kappingaravlagandi tiltøkum og reglurnar um mannagongdina í samband við almenn innkeyp umvegis havt ávirkan á orkumál.

Samstarvið á orkupolitiska økinum í ES, áðrenn innmarknaðurin varð settur í gildi, snúði seg í høvuðsheitum um at tryggja orkuveitingarnar. Talan hevur serliga verið um at hava tiltøk, sum gjørdu londini betur før fyri at standa ímóti oljuveitingarkreppum í friðartíð. Hesar reglur stava frá oljukreppuni fyrst í 1970-árunum. Somuleiðis hevur ES reglur um tiltøk fyri orkuøkonomisering og at leggja um til alternativar orkukeldur. Stevnumiðini í orkupolitikk-inum hava somuleiðis verið nær tengd at umhvørvispolitikkinum.

Eitt uppskot um, at Rómarsáttmálin skuldi hava serskildar greinar um orkupolitikk, fekk ikki undirtøku í Maastricht í desember 1991. Í eini yvirlýsing frá ráðstevnuni verður tó sagt, at limalondini skulu taka hendan spurning uppaftur á Stjórnarráðstevnuni í 1996.

## 8.3 Oljudirektivið

Uppskotið um eitt serligt direktiv um treytirnar fyri tilluting og nýtslu av konsessjónum í samband við kanningar, leiting eftir og útvinning av olju varð lagt fram í mai 1992. Eftir fleiri viðgerðir í ES-ráðnum kom ráðið í desember í 1993 fram til eina sonevnda "felags støðu". Oljudirektivið varð endaliga samtykt í mai 1994 og kom í gildi 1.juli 1995.

Høvuðsendamálið við oljudirektivinum er at tryggja, at teknisk og handilslig fyrilit skulu stýra útvinningini av olju og gassi. Direktivið ásetur felags reglur, sum skulu galda í samband við olju á innmarknaðinum í ES.

Útgangsstøðið er, at limalondini sjálvi avgera, hvørjar leiðir á landleiðini skulu setast av til leiting eftir og framleiðslu av olju. Limalondini hava somuleiðis heimild at áseta treytirnar fyri oljuvirksemi. Slíkar treytir og krøv kunnu m.a. vera um trygdarskipanir, trygd og heilsu, trygd í samband við flutning, umhvørvisvernd og vernd av livandi tilfeingi, gripum av listarligum, søguligum ella fornfrøðiligum virði, trygd í samband við installasjónir, arbeiðstakaravernd, umsiting av oljutilfeinginum (eitt nú hvussu skjótt skal farast fram í útvinningi, og hvussu staturin skal tryggja sær skattainntøkur).

Hetta merkir, at limalondini í høvuðsheitum varðveita ognarrættin til oljuríkidømi á sínum nærleiðum. Men hóast oljudirektivið staðfestir ognarrætt, so kunnu limalondini ikki fara út um tær generellu avmarkingar, sum Rómarsáttmálin ásetur fyri virksemi hjá almennum myndugleikum. Í hesum liggur m.a., at tá myndugleikarnir tilluta feløgum konsessjónir og áseta treytir, skal hetta fara fram á

ein hátt, sum tryggjar øllum feløgum somu viðferð, uttan mun til í hvørjum landi tey hava heimstað. Her kann sum dømi nevnast, um Noreg gjørdist limur í ES, so hevði kravið um somu viðgerð uttan mun til nasjónalitet og ognarviðurskifti merkt, at norsku oljufeløgini Statoil, Hydro og Saga ikki fingu framíhjárættindi, men skuldu kappast á jøvnum føti við onnur feløg í ES um rættindini til at leita eftir og útvinna olju á norska landgrunninum.

Sambært ES-reglunum er heldur ikki loyvt at seta sum treyt fyri tilluting av rættindum í samband við olju, at nasjónalar vørur og tænastur skulu hava framíhjárætt, ella at leitingar- og borivirksemi skal hava heimstað í ella verða stýrt úr viðkomandi limalandi.

Viðvíkjandi olju kann samanumtikið sigast, at ES hevur góðtikið, at almennir myndugleikar í limalondunum eru ánarar av oljuríkidøm-inum. Men oljudirektivið avmarkar leiklutin hjá tí almenna til tvey øki: Staturin skal framvegis hava fíggjarliga ágóðan av tilfeinginum, og staturin hevur í ein vissan mun heimild at regulera vinnuna.

# KAP. 9 Handil, ídnaður, tænastur, samskifti, heilsufrøðilig viðurskifti

## 9.1 Ídnaður, handil og tænastur

**Ídnaður**

Tiltøk innan ídnað og handil eru grundað á grein 28, 30-36, 85, 91-94, 102A, 113, 115, 130 og 235 í Rómarsáttmálanum. *Ídnaðarpolitikkur* er sum so ikki við í sáttmálanum.

Ídnaðarpolitikkurin hjá ES er grundaður á fría kapping á marknaðarbúskaparligum støði. Eitt av fremstu endamálunum er at minka um almennan stuðul til vinnulívið (við ávísum undantøkum fyri smá og meðalstór virki).

Ídnaðarpolitikkurin hjá ES hevur fyrst og fremst lagt seg eftir at tikið burtur allar forðingar fyri fríari kapping og vart fríu kappingina móti nýggjum forðingum. Eftir at Innmarknaðurin er farin at virka, hava allar vørur og tænastur frítt at fara í ES.

Í *Den almindelige beretning 1994* frá ES-nevndini verður sagt, at tað bert er møguligt at skapa og halda fast um vøkstur, um evropeiski ídnaðurin er kappingarførur, effektivur og innovativur og er førur fyri at virka á opnum marknaðum í fríari kapping.

ES-nevndin heldur, at ídnaðurin í ES kann mennast við at fremja *immateriellar* íløgur, menning av ídnaðarsamstarvi, fremjan av loyalari kapping og nútímansgerð av leiklutinum hjá tí almenna í vinnulívinum.

ES-nevndin broytti í 1994 politikkin fyri tey smáu og meðalstóru virkini (SMV). Samtykt varð ein samlað ætlan fyri hesar fyritøkur og fyri handverksvinnuna. Sum nakað nýtt varð tikið við, at SMV skuldu skattast lagaligari, skuldu lættari kunna seljast og arvast, og at gjaldsfreistir skuldu haldast betur, eisini frá almennari síðu.

Gransking og teknologisk menning (GTM) eru eisini ein týðandi partur av ídnaðarpolitikkinum hjá ES. Samtykt er ein fjórða ætlan (1994-1998) fyri GTM, sum m.a. leggur upp til betri samstarv millum londini í ES. Eisini verður stórur dentur lagdur á at menna útbúgvingar, styrkja sambandið millum útbúgving og vinnuna og at fremja vinnuligu útbúgvingarnar.

**SMV-politikkurin**

Tað eru tær størru fyritøkurnar, sum fáa størstu fyrimunirnar av Innmarknaðinum, men ásannandi at tey smáu og meðalstóru virkini eru ryggurin í vinnuliga framburðinum, og at tað er her, flestu arbeiðsplássini verða skapt, hevur ES ein serligan politikk fyri hesi virkini - SMV-politikkurin.

Afturvendandi trupulleikarnir hjá smáum og meðalstórum virkjum eru avmarkaðu møguleikarnir at fylgja við á hesum økjum:

- Gransking, kunnleika og vørumenning
- Kunnleika um marknaðarføring og leiðslu
- Kunnleika um reglugerðir og standardir á marknaðinum
- Kunnleika um nýggja tøkni á sínum økjum
- Nýtslu av flutnings-, láni- og tryggingarmøguleikum.

SMV-politikkurin hjá ES roynir at stuðla smáum og meðalstórum virkjum í ES á hesum økjum:

- Við at fáa í lag samstarv við virki tvørtur um landamørk
- Við at fremja upplýsing til virkini um ES
- Við at fremja kunnleika um tøkni millum virki og menna førleikan sum heild hjá virkjunum
- Við at stuðla smáum og meðalstórum virkjum við fígging.

Definisjónin av einum SMV-virki er:

- Í mesta lagi 250 medarbeiðarar
- Antin ein umsetning uppá hægst 20 mió. ECU ella eina samlaða fíggjarstøðu uppá hægst 10 mió. ECU
- Í mesta lagi 25% av kapitalinum kann vera í hondunum á einum ella fleiri feløgum, sum ikki lúka hesar treytir, undantikið almenn íløgufeløg, venture-feløg ella - treytað av at tey ikki hava ávirkan - institusjónellir investorar.

Har tað er neyðugt at skilja millum smá og meðalstór virki, verða smá virki defineraðið sum virki við í mesta lagi 50 medarbeiðarum, einum ársumsetningi uppá í mesta lagi 5 mió. ECU og eini fíggjarstøðu uppá í mesta lagi 2 mió. ECU.

**Skipasmíð**

Tey týdningarmestu skipasmiðjulondini í OECD, sum umboða meira enn 70 prosent av altjóða skipabygging, hava samtykt, at allur almennur stuðul til skipabygging skal verða avtikin áðrenn 1.januar 1996. Við trupulleikunum hjá hesi vinnu í huga samtykti ES-ráðið í

desember 1994, at stuðulin kann halda fram eitt ár afturat. Stuðulin, sum limalondini kunnu veita skipasmiðjum teirra, er avmarkaður til 9 prosent av byggikostnaðinum.

**Handil**

Sambært Rómarsáttmálanum er handilspolitikkurin hjá ES í samband við vøruhandil grundaður á felags tollgjøld og felags handilsavtalur við triðjalond. ES tekur undir við grundleggjandi meginreglunum í GATT.

ES gevur summum landabólkum, herundir menningarlondum, tollfyrimunir. Lomé-londini fáa flestu fyrimunir. Síðani koma Meðalhavslondini og at enda hini menningarlondini.

Síðani EF og EFTA undirskrivaðu fríhandilsavtalu hava ídnaðarvørur og ávísar landbúnaðarvørur verið undantiknar tolli. EBS-avtalan hevði við sær, at vørur, tænastur, kapitalur og persónar hava frítt at fara millum ES og EFTA (Sveis tó undantikið).

Í 1991 gjørdi ES assosieringsavtalur við Ungarn, Pólland, Kekkia og Slovakia. Sambært hesum avtalum verður ES og hesi londini fríhandilsøki aftaná 10 ár. Frá januar 1995 hava ídnaðarvørur frá hesum londunum frítt at fara til marknaðin í ES.

Handilsavtalan millum Føroyar og ES ber í sær, at eingin tollur verður lagdur á ídnaðarvørur úr Føroyum til ES.

**Tænastur**

Eins og vørur hava tænastur frítt at fara í ES. Hetta er ein fylgja av teimum fýra frælsunum í innmarknaðinum. Týdningurin av fríum flutningi av tænastum eigur ikki at vera undirmettur, tí meira enn helmingurin av virðisøkingini í framkomnum samfeløgum stavar frá tænastuvinnu.

Øki, sum hava týdning í hesum sambandi, eru:

- Fíggjarligar tænastur
- Flutningur
- Telesamskifti

## 9.2 Samskifti

**Flutningur**

Sonevnda *transevropeiska netið* innan flutning, orku og telesamskifti varð samtykt í 1993. Tað er eitt beinleiðis úrslit av hvítbókini hjá ES-nevndini um vøkstur, kappingarføri og arbeiðspláss. Á flutningsøkinum er ætlanin at gera 58.000 km av vegi, 23.000 km av jarn-

breytum til tok, sum koyra skjótari enn 200 km/t, 12.000 km av siglingarveitum, 250 flogvøllir, umframt nútímansgerð, útbygging og samskiping av havnum. Hetta eru íløgur, ið eftir ætlan fara at kosta 400 mia. ECU í 15 ár. Stovnanin av transevropeiska flutningsnetinum verður av ES-nevndini hildið at vera ein av fremstu fyritreytunum fyri vøkstri, kappingarføri og arbeiðsplássum í ES.

**Flogferðsla** 1.januar 1993 varð flogferðslan í ES liberaliserað. Myndugleikarnir í teimum einstøku limalondunum kunnu bert leggja seg út í, tá talan er um óvanliga høgar ella óvanliga lágar prísir. Heldur ikki verður longur skilt millum rutuflúgving og charterflúgving. Flogfeløg kunnu í høvuðsheitum flúgva frítt í øllum ES. Tó eru innanríkisrutur undir avmarkingum fram til 31.mars 1997.

Líknandi skipan er galdandi fyri flutning á veganetinum, og arbeitt verður eisini við skipanum fyri jarnbreytirnar.

**Telesamskifti** Politikkurin hjá ES á samskiftisøkinum er merktur av liberalisering og harmonisering. Nógv verður gjørt fyri at fáa standardisering, samskipan og samstarv. ES hevur samtykt, at frá 1.januar 1998 verður frí kapping innførd grundað á felags ES-skipan fyri alt teleøkið, galdandi bæði fyri teleinfrastrukturin og fyri teletænasturnar.

Gongdin í flestu ES-londum tey seinnu árini hevur annars verið, at teleøkið stigvíst er liberaliserað.

Í Føroyum og millum Føroyar og umheimin er einkarrætturin hjá Løgtinginum og statinum til *anlæg og drift af telegrafer og telefoner* formliga órørdur. Hann er galdandi sambært lógunum frá 1879 og 1927. Tó skal sigast, at hesin einkarrættur ikki verður hildin uppi so strangliga í praksis.

Væntast má, at ein nýggj avtala við ES eigur - alt eftir hvørji ynski vit hava til broytingar - at seta krøv til eitt nýtt samskifti av tænastuveitingum. Hetta vil sjálvandi eisini verða galdandi fyri teleøkið.

**EBS-sáttmálin og telesamskifti** Sambært ásetingunum í EBS-sáttmálanum um tænastuveitingar á telesamskiftisøkinum skulu summi ES-direktiv byggjast inn í EBS-sáttmálan. Harumframt skulu sáttmálapartarnir taka ávísar ES-rættargerðir til eftirtektar. Stovnast skal ein felags marknaður fyri teletænastur og útgerð. Ásetingar eru m.a. gjørdar um standardisering innan informasjónstøkni og telesamskifti og um samskipan av stovnseting av einum digitalneti (ISN). Ásetingar eru eisini gjørd-

ar um størri samstarv um radiofrekvensir í evropeiskum høpi og um harmonisering. Eisini eru ásetingar gjørdar fyri fyrsta stigið í samband við, at ein almennur telesamskiftismarknaður verður latin upp.

## 9.3 Heilsufrøðilig viðurskifti

**Fiskavørur til matna**

ES hevur í høvuðsheitum bert áhuga í trimum viðurskiftum, tá tað snýr seg um at seta krøv til fiskiídnaðin. Tey eru *heilsa, trygd og umhvørvi.*

Heilsufrøðiligu krøvini til framleiðslu og sølu av fiskavørum í ES eru fyrisett í fiskiídnaðardirektivinum (hygiejnedirektivet 91/493/EØF). Viðvíkjandi krøvunum til triðjalond verður í direktivinum ásett, at triðjalondum skulu setast *í minsta lagi* somu krøv, sum eru galdandi fyri limalondini.

Fiskiídnaðardirektivið fevnir um tveir høvuðspartar. Fyrri parturin, sum er í níggju greinum, hevur m.a. ásetingar um:

- Handfaring og viðgerð av fiski umborð á skipum
- Handfaring við landing
- Virking og eftirlit á virkjum á landi
- Reglur um pakking, merking og goyming
- Reglur um innaneftirlit
- Reglur um løggilding

Seinni parturin er eitt fylgiskjal í níggju kapitlum. Hann hevur nágreiniligar reglur fyri tey einstøku liðini í framleiðsluni og fyri, hvussu eftirlitið skal fara fram.

Fyri at tryggja sær, at *triðjalond* lúka treytirnar, skulu serfrøðingar vitja viðkomandi lond fyri at gera kanningar. Tað, sum serliga verður hugt at, er:

1. Lóggávan
2. Bygnaðurin hjá myndugleikunum, eftirlitspraksis, og hvørjar heimildir myndugleikarnir hava
3. Heilsufrøðiligu fortreytirnar fyri framleiðslu
4. Tann trygd myndugleikarnir kunnu veita, fyri at eftirlit verður útint.

Serfrøðingar hava verið og vitjað í Føroyum. ES-nevndin hevur síðani avgjørt, at føroyska lóggávan á hesum øki er at rokna sum

verandi á hædd við ásetingarnar í direktivinum hjá ES. Eisini hevur ES-nevndin staðfest, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan er før fyri at hava eftirlit við, at lógin verður hildin, og at landsstýrið hevur veitt trygd fyri, at krøvini í ES-direktivinum verða hildin. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er tí tann myndugleiki í Føroyum, sum hevur ábyrgdina av eftirlitinum við, at fiskavørur lúka treytirnar í fiskiídnaðardirektivinum hjá ES.

Fiskavørur av føroyskum uppruna skulu lúka hesi krøv:

1. Við hvørjari sending skal fylgja ein heilsuváttan
2. Vørurnar skulu koma frá góðkendum virkjum ella verksmiðjuskipum
3. Allar eskjur skulu verða merktar við orðinum *Føroyar* og løggildingarnummari. Undantikin frystur fiskur í bulk til niðursjóðing.

Fiskur av fremmandum uppruna, sum verður virkaður í Føroyum, er undir somu heilsufrøðiligu reglum sum fiskavørur av føroyskum uppruna.

**Fiskamjøl og fóður**

Virki í ES, sum framleiða fiskamjøl og fiskafóður, skulu verða góðkend sambært *Balai-direktivinum*. Virki í ES, sum hava fingið hesa góðkenning , kunnu frítt selja fiskamjøl og -fóður innan ES.

Virki í triðjalondum (eitt nú í Føroyum) skulu eisini góðkennast sambært Balai-direktivinum. Umframt at framleiðslan skal kannast dagliga, skal hvør sending av fiskamjøli og fiskafóðri kannast og góðkennast. Tá sendingin er góðkend, kann hon verða seld í ES, men ES londini hava tó framvegis heimild at taka royndir av sendingini, um hon verður flutt millum ES-lond.

# KAP. 10 Búskaparpolitikkur í ES

## 10.1 Inngangur - søguligt baksýni

Síðstu 40 árini eru búskapirnir í ES-londunum tengdir nærri hvør at øðrum. Hetta er lutvíst eitt úrslit av sjálvum samstarvinum í ES og lutvíst ein avleiðing av rákinum í altjóða búskapi.

Í 1960-árunum skipaðu ES-londini eina tollsamgongu, tað vil siga, at innanhýsis tollur varð tikin burtur, og felags tollmúrar vórðu settir móti umheiminum. Í kjalarvørrinum av Werner-frágreiðingini fyrst í 1970-árunum varð fyri fyrstu ferð roynt at skipa eitt valutapolitiskt samstarv. Hendan ætlan datt tó niðurfyri, m.a. tí at um tað mundið skrædnaði altjóða gjaldoyrasamstarvið (Bretton Woods), og fyrstu stóru hækkingarnar í oljuprísunum komu. Hetta elvdi til búskaparligar kreppur í ES-londunum. Innanhýsis búskaparligir trupulleikar komu at standa ovast á politisku dagsskránni í limalondunum, og Werner-ætlanin varð slept.

Í 1980-árunum kom aftur gongd á royndirnar at samansjóða búskapirnar í ES-londunum. Valutakurssamstarvið varð skipað í EMS, og í *Eindarskjalinum*, sum varð samtykt í 1985, varð semja um, at ein innmarknaður skuldi setast at virka frá 1.januar 1993. Innmarknaðurin ber í sær, at vørur, kapitalur, arbeiðsmegi og tænastuveitingar skulu hava frítt at fara um landamørk í ES.

Ein fyritreyt fyri, at innmarknaður kundi virka eftir ætlan, var, at búskaparpolitikkurin í limalondunum varð samskipaður. Eitt nú ber illa til at varðveita ymisk sløg av kapitalskattaskipanum, um kapitalur skal hava frítt at fara um landamørk. Somuleiðis var neyðugt at hava felags gjaldoyrapolitikk og felags pengapolitikk. Hetta m.a. tí at óstøðugir gjaldoyrakursir økja um vandan fyri missi í transaksjónum landanna millum.

## 10.2 Búskapar- og pengapolitiska samgongan

Á fundinum í Maastricht í desember 1991 samtyktu stjórnarleiðararnir í ES at seta á stovn eina búskaparliga og pengapolitiska samgongu. Við eini *búskaparligari samgongu* er ætlanin at skipa felags karmar fyri búskaparpolitikkin í limalondunum. ES leggur karmarnar, sum tjóðartingini í limalondunum mugu laga politikk sín eftir. Ein búskaparlig samgonga merkir eisini, at førdur verður ein

felags regiónalpolitikkur fyri at loysa regionalar trupulleikar, sum tað einstaka landið sjálvt ikki megnar at loysa við búskaparpolitikki sínum. Ein *pengapolitisk samgonga* ber í sær, at londini geva tilsøgn um, at gjaldoyrakursirnir skulu vera fastir. Ætlanin er síðani at skipa felags gjaldoyra. Ein pengapolitisk samgonga førir harumframt við sær, at felags pengapolitikkur verður førdur í øllum ES. Miðað verður ímóti, at meginbankarnir í limalondunum fara saman í eina felags evropeiska meginbankaskipan, og at ein felags meginbanki, sum frá líður, verður settur at virka í ES.

**Stigini í búskapar- og pengapolitisku samgonguni**

Sambært Maastricht-sáttmálanum skal búskapar- og pengapolitiska samgongan setast í verk í trimum stigum.

**1.stig** 1.stig byrjaði 1.juli 1990 og fevnir m.a. um innmarknaðin, sum skal tryggja, at vørur, tænastur, kapitalur og arbeiðsmegi hava frítt at fara um landamørk.

**2.stig** 2.stig byrjaði 1.januar 1994 og varar eftir ætlan til 1.januar 1997. Í hesum tíðarskeiði verður miðað ímóti at samskipa pengapolitikkin og búskaparpolitikkin. ES hevur longu sett á stovn tað, sum er ætlað sum fyrsta stigið á leiðini móti einum meginbanka fyri ES. Her er talan um evropeiska pengapolitiska stovnin (á enskum European Monetary Instititute, EMI). Endamálið við hesum stovni er at samskipa pengapolitikkin í øllum ES, og sum frá líður fáa í lag eina skipan við øllum meginbankunum í ES, (á enskum European System of Central Banks (ESCB)). Áðrenn árslok í 1996 skal EMI leggja fram ætlanir, um hvussu ESCB skal virka. EMI skal somuleiðis byggja upp gjaldoyragoymslur hjá ES. Kursirnir millum gjaldoyrini hjá limalondunum og ECU skulu leggjast í fasta legu og skulu ikki kunna broytast, eftir at 3.stig í búskapar- og pengapolitisku samgonguni er sett í verk. Í 2.stigi skal búskapar- og pengapolitikkurin samskipast. Tey lond, ið ætla sær við í 3.stig í pengapolitisku samgonguni, mugu lúka tær sonevndu konvergens-treytirnar:

- **Fíggjarlógin:** Hallið á fíggjarlógini skal í mesta lagi vera 3 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni.

- **Almenn skuld** skal ikki vera størri enn 60 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni.

- **Stabilar prísir**: Miðal inflatiónsratan í 12 mánaðir, áðrenn landið fer upp í búskapar- og pengapolitisku samgonguna, skal ikki fara upp um miðaltalið fyri trý tey bestu limalondini við meira enn 1,5 prosentstigum.

- **Lágt rentustøði.** Nominella rentan skal í mesta lagi fara upp um miðal í trimum teimum londunum við lægstu inflasjónsratu við 2 prosentstigum.

- **Støðug gjaldoyraviðurskifti**: Landið skal hava verið við í EMS í tvey ár, uttan sjálvt at hava tikið stig til devaluering og uttan stórvegis trupulleikar hava hildið seg innanfyri ásetingarnar í ERM.

Flestu ES-lond lúka sum er ikki konvergenstreytirnar (sí talvu 10.1). Ófriðurin á gjaldoyramarknaðunum og skrædlið í gjaldoyra-samstarvinum í ES í 1992 hava eisini seinkað ætlaðu pengapolitisku samgonguni.

| | Hall á fíggjarlóg. % av BTÚ | Almenn bruttoskuld. % av BTÚ | Inflasjóns-rata | Renta |
|---|---|---|---|---|
| Belgia | -4,3 | 137,4 | 1,9 | 8,1 |
| Danmark | -2,6 | 77,3 | 2,6 | 8,5 |
| Týskland | -2,4 | 59,1 | 2,1 | 7,2 |
| Grikkaland | -11,4 | 115,5 | 9,5 | 18,6 |
| Spania | -5,9 | 65,8 | 4,6 | 10,9 |
| Frakland | -4,8 | 53,0 | 2,0 | 7,7 |
| Írland | -2,2 | 86,0 | 2,8 | 8,7 |
| Italia | -7,8 | 116,6 | 5,0 | 11,4 |
| Luksemborg | 1,6 | 9,8 | 2,5 | 8,1 |
| Niðurlond | -3,3 | 80,0 | 2,3 | 7,3 |
| Portugal | -5,6 | 71,5 | 4,6 | 11,4 |
| Bretland | -3,0 | 51,3 | 3,3 | 8,6 |
| Svøríki | -9,5 | 87,3 | 2,9 | 10,5 |
| Eysturríki | -4,5 | 61,1 | 2,7 | 7,4 |
| Finnland | -5,0 | 69,2 | 2,0 | 9,9 |

*Talva 10.1: Konvergenskrøvini í Búskapar- og pengapolitisku samgonguni og støðan í ES-londunum í apríl 1995. Døkku økini merkja, at treytirnar eru loknar.*

3.stig

Áðrenn ársenda 1996 skal støða takast til, um farast skal undir 3.stig í búskapar- og pengapolitisku samgonguni. Ein av fyritreytunum fyri, at farast kann víðari, er, at limalondini hava lagað búskapin eftir konvergenskrøvunumi. Í 3.stigi er annars ætlanin, at felags gjaldoyra skal setast at galda fyri tey limalondini, sum lúka konvergenstreytirnar. Harumframt skal skipanin fyri evropeisku meginbankarnar setast í verk og evropeiski meginbankin stovnsetast.

Sambært Maastricht-sáttmálanum skal 3.stig setast í verk í seinasta lagi 1.januar 1999.

## Danskt og bretskt fyrivarni

Útgangsstøðið í Maastricht-sáttmálanum er, at øll ES-londini skulu seta í verk øll stigini í búskapar- og pengapolitisku samgonguni. Sáttmálin ásetir, at einki land skal forða einum øðrum í at seta búskapar- og pengapolitsku samgonguna í verk, og at eitt land, sum er partur av Maastricht-sáttmálanum, eisini bindur seg til at fullføra øll trý stigini.

Danmark og Bretland hava tikið fyrivarni fyri hesum ásetingum, og hesi fyrivarni hevur ES góðtikið við tveimum protokollum í Maastricht-sáttmálanum. Um Bretland verður m.a. sagt, at landið ikki er bundið av at seta 3.stig í búskapar- og pengapolitisku samgonguna í verk, uttan so at stjórnin og parlamentið samtykkja tað.

Í protokollini fyri Danmark verður m.a. víst á, at danska grundlógin hevur ásetingar, sum kunnu gera tað neyðugt at halda fólkaatkvøðu um luttøku í 3.stigi í búskapar- og pengapolitisku samgonguni. Sagt verður víðari, at um Danmark boðar ES frá, at tað ikki verður í 3.stigi, skal Danmark verða undantikið.

Danir søgdu sum kunnugt nei til Maastricht-sáttmálan á fólkaatkvøðuni í juni 1992. Í oktober legði danska stjórnin fram eina hvítbók um Danmark og Maastricht-sáttmálan. Nakrar vikur seinni samdust sjey av flokkunum á Fólkatingi um eitt memorandum "Danmark i Europa". Hetta memorandum varð støðið undir tingingunum við hini limalondini á fundinum hjá Evropeiska Ráðnum í Edinburgh í desember 1992. Í eini yvirlýsing frá hesum fundi verður sagt:

> Danmark har meddelt at det ikke vil deltage i tredje fase... Danmark vil derfor ikke deltage i ordningen med en fælles valuta og vil ikke være bundet af de regler vedrørende økonomisk politik, som kun gælder for medlemsstater, der

> deltager i tredje fase af Den Økonomiske og Monetære union, og det vil bevare sine nuværende beføjelser med hensyn til danske love og forskrifter, herunder Danmarks Nationalbanks beføjelser i pengepolitiske anliggender.

Danmark hevur sostatt sambært protokollini og Maastricht-sáttmálanum og yvirlýsingini frá Edinburgh-fundinum fingið møguleika at standa uttanfyri 3.stig í pengapolitisku samgonguni í ES.

Í samband við stovnsetingina av búskapar- og pengapolitisku samgonguni er vert at nevna, at gjaldoyrasamgongan neyvan gerst veruleiki, uttan so at tey stóru londini eru við. Tá t.d. Týskland ratifiseraði sáttmálan og sostatt segði seg sinnað at seta gjaldoyrasamgonguna í verk, var hetta gjørt undir ávísum fyritreytum um luttøku og um, at meginreglurnar í búskapar- og pengapolitiska samgonguni kunnu uppfyllast, og at limalondini halda tær. Um fyritreytinar ikki eru til staðar, er tað ein opin spurningur, hvat ES ger.

## 10.3 Føroyar og búskapar- og pengapolitiska samgongan í Evropeiska Samveldinum

Sambært lógarverkinum hoyra føroysk pengamál undir forsetismálaráðið. Føroyar eru ein partur av danska gjaldoyraøkinum. Hetta merkir, at vit hava felags pengapolitikk og meginbanka við Danmark. Føroyskir peningastovnar eru javnsettir við danskar peningastovnar, tá tað snýr seg um penga- og likviditetspolitisku stýringsamboðini hjá danska tjóðbankanum. Valutalógin er í høvuðsheitum galdandi fyri Føroyar, og liberaliseringin av kapitalflutningi varð við kunngerð sett at galda fyri Føroyar í 1993.

Edinburgh-semjan gav Danmark undantak frá 3.stigi í búskapar- og pengapolitisku samgonguni hjá ES. Hetta merkir í fyrsta lagi, at Danmark ikki verður partur av skipanini við felags gjaldoyra. Í øðrum lagi verður Danmark ikki bundið at teimum reglunum í búskaparpolitikkinum, sum galda fyri limalondini, sum eru við í 3.stigi. Í triðja lagi varðveitir danski tjóðbankin sínar heimildir í pengapolitiskum málum.

Her er tó vert at nevna, at møguleikarnir hjá dønum at reka sín egna pengapolitikk longu frammanundan vóru nógv skerdir, bæði av liberaliseringunum av kapitalflytingum í ES og sum ein avleiðing av altjóða rákinum tey seinnu árini.

Sum limur í ES hevur Danmark bundið seg til at fylgja ES-lóggávuni á nógvum økjum. ES-lóggávan fevnir í fyrstu syftu um ES-sáttmálan

og ta sonevndu sekunderu lóggávuna. Ein rættuliga stórur partur av donsku vinnulívslóggávuni og lóggávan á teimum ymisku økjunum í fíggjarskipanini eru grundað á felags ES-reglur. Týðandi partar av hesi lóggávu eru eisini tiknir við í tað lógarverk, sum føroyska heimastýrið hevur sett at galda á málsøkjum, sum eru yvirtikin sum sermál.

ES-sáttmálin hevur fleiri grundleggjandi ásetingar fyri limaskap. Hesar ásetingar fevna m.a. um grundregluna um forboð móti diskriminering við støði í nasjónaliteti, ásetingar um 2.stig í búskapar- og pengapolitisku samgonguni, sum staðfestir, at kapitalur hevur frítt at fara, reglur um almennan studning, kappingarreglur o.a. Á nógvum økjum er sekunder lóggáva sett at galda í Danmark. Hendan lóggáva ásetir m.a., hvørji rættindi og skyldur tey einstøku limalondini, borgarar og fyritøkur tess hava. Hesar reglur merkja samanumtikið, at Danmark í fíggjarmálum ikki kann gera mannamun á ein hátt, sum gevur donskum ríkisborgarum, fyritøkum ella virðisbrøvum fyrimunir.

Av tí at Føroyar ikki eru limur í ES, hava Føroyar *de facto* ávísar møguleikar at smíða lógir, sum gevur egnum fyritøkum, borgarum ella fíggjarmarknaðum framíhjárætt. Ásetingarnar um frían kapitalflutning seta tó mørk fyri, í hvønn mun slík lóggáva kann varðveitast.

Hvussu støða Danmarkar í búskapar- og pengapolitisku samgonguni kemur at ávirka støðu Føroya á búskaparpolitiska og gjaldoyraøkinum, er ógreitt. Eitt tykist kortini at vera greitt, og tað er, at um Føroyar framhaldandi verða í danska gjaldoyraøkinum og ríkisfelagsskapinum, mugu vit halda okkum til tær generellu reglurnar í búskapar- og pengapolitisku samgonguni, m.a. forboðnum móti moneterari fígging av hallinum á fíggjarlógini. Møguligt hall á fíggjarlógini skal fíggjast við lántøku til marknaðartreytir.

# KAP. 11 Arbeiðsmarknaður

## 11.1 Inngangur

Verandi sáttmáli millum ES og Danmark/Føroyar er ein handilsavtala burturav og fevnir tí ikki um arbeiðsmarknaðarviðurskifti.

**Føroyingar í ES**

Skulu føroyingar hava frítt at fara í ES, eru tveir møguleikar í at velja:

1. Danmark/Føroyar fáa ein sersáttmála við ES, ið eisini fevnir um arbeiðsmarknaðin, t.e. eitt slag av EBS-avtalu

2. Limaskapurin hjá Danmark víðkast til eisini at fevna um Føroyar.

**Sjófólk**

At tørvur er á at fáa eina avtalu við ES um annað enn vørur hava okkara sjófólk kent sviðan av. Dømi er um mann, ið ikki slapp at mynstra í bretskari havn, tí hann ikki var ES- ella EFTA-borgari.

**Føroyar í ES-bás**

Fyri føroyska arbeiðsmarknaðin er tað sera avgerandi, at ein avtala fæst við ES, sum í minsta lagi fær Føroyar í ein vældefineraðan ES-bás.

**EBS**

Aðaltættirnir í eini EBS-avtalu eru teir somu sum aðalhugsanin við ES, t.e. at vørur, persónar, tænastur og kapitalur við onkrum undantaki hava frítt at fara um landamørk.

EBS-økið er ikki ein tollsamgonga, men eitt fríhandilsøki. Hetta týðir, at tað framvegis er marknaeftirlit millum ES-londini og EFTA-londini og eisini EFTA-londini sínámillum.

Føroyar fáa neyvan nakra avtalu við ES um arbeiðsmarknað, ið er stórt øðrvísi enn EBS-avtalan. Tí verða hesi evni í Evropasamveldinum umrødd nærri:

- Arbeiðsmegi
- Sosial trygd
- Stovnsetingar og tænastuveitingar

## 11.2 Arbeiðsmegin í Rómarsáttmálanum

Tað, at ein ES-borgari hevur rætt at arbeiða í øllum limalondunum, ber í sær, at ES-borgarin eisini sleppur frítt inn í eitt annað limaland at arbeiða og at búseta seg.

**Rómar-sáttmálin**

Í stórum ber Rómarsáttmálin í sær, at ES-borgarar hava:

- rættindi at søkja sær arbeiði í øðrum limalandi,
- rættindi at fara í annað limaland at arbeiða,
- rættindi at búgva í øðrum limalandi fyri at søkja sær arbeiði og fyri at arbeiða,
- rættindi at búgva í øðrum limalandi aftaná, at viðkomandi er givin at arbeiða.

**Flytingar**

Hóast norðbúgvar síðan 1954 hava kunnað arbeitt og búsett seg í øðrum norðurlondum, so vísir tað seg, at fólk brúka ikki so nógv hendan møguleikan. Talan er bara um 1% av øllum norðbúgvum, ið búgva í einum øðrum norðurlandi enn heimlandinum.

Sama kann sigast um ES-borgararnar. Í dag búgva einar 5 milliónir ella 1,5% av ES-borgarunum í einum øðrum ES-landi.

## 11.3 Lógskipan um arbeiðsfrælsi

Lógskipan 1612/68 hjá ES-ráðnum er sjálv grundlógin um arbeiðsfrælsi í ES. Her verður ásett, at ein og hvør ES-borgari skal viðgerast á sama hátt sum limalandsins egnu ríkisborgarar viðvíkjandi setanar- og arbeiðskorum. Javnrættindini viðvíkja somuleiðis sosial- og skattaviðurskiftum, rættindi til útbúgving og rættindi til at skipa seg í felag.

Tað hevur verið ivi um, um útlendskir arbeiðstakarar alment kundu sigast at vera javnsettir við landsins borgarar, ella um hetta bara er galdandi fyri slík viðurskifti, ið viðvíkja teirra starvi sum løntakarar. ES-dómstólurin hevur í hesum máli staðfest, at grein 7 í lógskipanini um arbeiðsfrælsi eisini fevnir um allar almanna- og skattligar ágóðar, sjálvt um hesir einki hava við ein setanarsáttmála sum so at gera.

**Útistadd arbeiðsmegi**

Í løtuni arbeiðir ES-nevndin við at orða eitt direktiv um løntakarar, ið verða sendir í annað limaland at arbeiða. Spurningurin er, um t.d. láglønтir portugisiskir arbeiðsmenn, ið eru sendir til Danmarkar at arbeiða, skulu hava danska ella portugisiska løn. Og skulu teir fylgja sáttmálanum frá sama degi, teir byrja at arbeiða, ella verður ein

bíðitíð. Direktivið fer eisini at bera í sær, at útsend arbeiðsmegi skal yvirhalda lóggávu t.d. viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi og trygdarreglum í tilhaldslandinum.

## 11.4 Sosial trygd

Grein 51 í Rómarsáttmálanum er eitt ískoyti til reglurnar um arbeiðsfrælsi. Greinin tryggjar, at løntakarar, sjálvstøðug vinnurekandi og húski teirra ikki missa síni sosialu rættindi, tá ið teir fara í annað ES-land at virka.

ES hevur altíð mett tað vera sera týdningarmikið at útinna ta sosialu trygdina fyri reikandi løntakarar. Tí hevur ES-ráðið eisini gjørt fleiri lógskipanir um sosialu trygdina fyri hendan bólkin. Somuleiðis hevur Ráðið kunngjørt uppíhoyrandi lógskipanir, ið seta nærri reglur fyri, hvussu høvuðslógskipanin skal fremjast.

Sambært lógskipan 1408/71 við seinni broytingum verður lógskipanin nýtt í sambandi við alla lóggávu um sosiala trygd, ið viðvíkur:

- veitingum vegna sjúku og móðurskapi,
- veitingum vegna avlami,
- veitingum vegna aldurdóm,
- veitingum til eftirsitandi,
- veitingum vegna arbeiðsvanlukkur og yrkissjúkur,
- veitingum vegna andlát,
- veitingum arbeiðsloysi,
- veitingum til húski.

## 11.5 Støðan hjá føroyskum løntakarum

Sosiala trygdin hjá føroyingum, ið fara uttanlands at arbeiða, er formliga undir skipaðum viðurskiftum í Danmark og í hinum norðanlondunum, men ikki í ES.

**Danmark** Landsstýrið og Arbeiðsmálaráðið gjørdu 26.08.93 avtalu um at samskipa arbeiðsloysistryggingina soleiðis, at ein persónur bara kann verða arbeiðsloysistryggjaður í øðrum landinum, og at tað sum meginregla skal vera har, sum persónurin arbeiðir.

**Norðurlond** Norðurlendski Millumlandasáttmálin um Sosiala Trygd frá 15.06.92 varð settur í gildi 01.01.94 samstundis sum EBS-avtalan. Og 08.07.94 varð sáttmálin settur í gildi fyri Føroyar. Sáttmálin er galdandi fyri

norðurlendskar ríkisborgarar uttan fyri EBS-økið, føroyingar, grønlendingar og norðurlendskar ríkisborgarar, ið ikki hava verið í arbeiði, t.d. lesandi og heimagangandi.

**ES**

Føroyar hava onga avtalu við ES um arbeiðsloysistrygging o.a. Hetta kemur illa við hjá teimum føroyingum, ið arbeiða í Týsklandi.

Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið heimild at gera tað møguligt hjá fólki at verða tryggjað í ALS, hóast tey arbeiða í ES ella aðrastaðni, t.d. á altjóða skrásettum skipum.

## 11.6 Stovnseting og tænastuveitingar

**Frítt at seta seg niður**

Eitt av teimum fýra frælsunum í ES er, at persónar hava frítt at fara um landamørk í øllum ES. Hetta ber í sær, at sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu hava teirra virksemi, hvar tað skal vera í ES. Tað finnast fleiri direktiv og lógskipanir, ið tryggja EF-borgarum rættindi at stovna og reka vinnuvirki allastaðni í ES undir somu treytum sum landsins egnu borgarar.

**Prógv**

Í hesum sambandi hevur viðurkenning av prógvum og sertifikatum stóran týdning.

**Stutt uppihald úti**

Í sambandi við arbeiði í øðrum ES-landi, ið bara vara í styttri tíð, t.d. undirentreprisuveitingar, kunnu virki taka sína egnu arbeiðsmegi við. Hvat styttri tíð er, er ikki nærri lýst. Í norðurlondum er 1 ár vanligt. Men føroysku skattamyndugleikarnir nýta 6 mánaðir.

Nevndin veit um føroyskt byggivirki, ið hevur stovnað eina deild í Týsklandi. Nevndin veit einki um, at føroysk virki hava verið forðað í at leggja virksemið í einum ES-landi. Men tá eingin formlig avtala er, er greitt, at forðingar kunnu stinga seg upp.

**Avleiðingar fyri føroyingar**

Fáa Danmark/Føroyar eina serskipan við ES, ið fer at líkjast EBS-avtaluni, so merkir hetta, at føroysk virki skulu kappast við ES-virki um heimamarknaðin. Tá ið útlendsk virki ikki higartil hava havt nakran áhuga í at virka í Føroyum, er heldur ikki trúligt, at áhugin verður størri, bara tí at vit hava eina seravtalu við ES.

## 11.7 Niðurstøða

Tað er avgerandi neyðugt fyri føroyska arbeiðsmarknaðin, at Danmark/Føroyar fáa eina avtalu við ES, ið ber í sær,

- at føroysk arbeiðsmegi fær tað sama frælsi, sum ES-borgarar hava,

- at føroyingar fáa ta somu sosialu trygdina, sum ES-borgarar hava,

- at føroysk virki og sjálvstøðugt vinnurekandi fáa tað sama frælsi, sum virki og sjálvstøðugt vinnurekandi í ES hava.

Danmark/Føroyar kann í staðin lata ES-borgarum og ES-virkjum somu frælsi í Føroyum.

# KAP. 12 Útbúgving og gransking

## 12.1 Danskar og føroyskar útbúgvingar

**Føroyar triðjaland**

Tá tað snýr seg um útbúgving og gransking í ES-høpi, verða Føroyar roknaðar sum triðjaland. Sum er, er *eingin avtala* beinleiðis millum ES og Føroyar á hesum øki. Hin vegin kunnu føroyskar útbúgvingar sum skipsførarar og maskinmeistarar, um ávísar treytir eru lúkaðar, geva altjóða vinnubræv, ið einki hevur við ES sum so at gera. Eitt annað er, at føroyskar útbúgvingar yvirhøvur eru góðkendar av donskum myndugleikum. Hetta er m.a. galdandi fyri sjúkrasystrar, sum fáa danska autorisasjón, lærarar og pedagogar eins og útbúgvingarnar frá Fróðskaparsetrinum. Handverkaraútbúgvingar eru eins og flestu teknisku útbúgvingar í síni heild góðkendar av donskum myndugleikum. Tað er einki til hindurs fyri at fáa eitt føroyskt sveinaprógv konverterað til eitt danskt sveinaprógv.

**Danmark sum transittland**

Men eitt vinnubræv ella próvbræv, sum er góðkent í Danmark, gevur ikki í sær sjálvum vinnuloyvi í ES. Í fleiri førum hava føroyingar loyst henda spurning við at flyta til Danmarkar. Tá hava teir heilt aðrar møguleikar, enn tá teir koma beinleiðis úr Føroyum. Teir verða roknaðir sum danir. Sambandið við Danmark er í hesum føri ein ventilur, ið kann gagnnýtast av teimum, sum flyta úr Føroyum.

## 12.2 Útbúgvingarsamstarvið í ES

**Útbúgving nasjónalt mál**

Í ES eru útbúgvingar eitt nasjónalt málsøki. Sambært Maastricht-sáttmálanum eru tað tey einstøku limalondini, ið hava ábyrgdina av innihaldinum í útbúgvingunum, og hvussu tey annars skipa sínar útbúgvingar. Hetta vil kortini ikki siga, at ES ongan útbúgvingar-politikk hevur. Yrkisútbúgvingarpolitikkurin hevur alla tíðina havt eina serliga heimild í Rómarsáttmálanum, og eini aðalrættindi í ES eru, at ES-borgarin hevur frítt at fara í øðrum limalondum. Tað ber í sær, at limalondini hava sum meginreglu, at tey viðurkenna útbúgvingarnar hjá hvørjum øðrum. Greinirnar 57, 126 og 127 í ES-sáttmálanum viðgera hesi viðurskifti. Harumframt hevur ES-ráðið gjørt fleiri fundarsamtyktir, tilmæli, lógskipanir og direktiv viðvíkjandi útbúgvingarmálum, serstakliga um at viðurkenna prógv og sertifikat hjá yrkislærdum. Soleiðis kann eitt land ikki nokta einum persóni, ið hevur longur enn 3 ára útbúgving, starv vísandi til vantandi førleikaprógv frá vertslandinum, um viðkomandi hevur

prógv fyri yrkisførleika frá heimlandinum. Hetta merkir, at kann viðkomandi brúkast í heimlandinum, kann hann eisini brúkast í hinum ES-limalondunum. Fyri Føroyar merkir hetta, at tað snýr seg ikki so nógv um at fáa eina danska útbúgving ella eina ES-útbúgv ing, men at útbúgvingin verður mett javnbjóðis í dygd, sjálvt um hon er bygd eftir føroyskum leisti og til føroyskan tørv.

**Útbúgvingar skulu vera av somu dygd**

**Útbúgvingarprogramm og mobilitetur**

Samstarvið um útbúgving og útbúgvingarspurningar í ES er fyrst og fremst á teimum økjum, sum styðja undir áhugamál, ið eru av týdningi fyri evropeiska felagsskapin sum slíkan - at skapa ein evropeiskan samleika. Ein beinleiðis liður í hesum er at skapa mobilitet millum fólkið í Evropa og fáa tey at lesa hjá hvørjum øðrum. Tað verður tí latin stuðul, so fólk kunnu læra mál. Hetta var fyrsta endamálið við programminum LINGUA. Eisini verður stuðul latin, ið hevur sum endamál at menna tað almenna kunnleikastøðið, fyri at sum mest kann fáast burtur úr nýggjum ídnaðarligum og teknologiskum møguleikum í teimum ymisku limalondunum.

**Evropeiskur samleiki**

Umbýtið av studentum og lærarum er mett at hava stóran týdning í ES-samstarvinum, tí tað gevur øktan kunnleika um mentan og viðurskiftini í teimum ymisku limalondunum. Reglur eru tí um, at lestraravgjøldini í einum landi skulu vera tey somu fyri studentar úr øðrum ES-londum sum fyri landsins egnu studentar.

**Umbýtis-programm**

Samstarvið í ES á útbúgvingarøkinum snýr seg sostatt, umframt í prinsippinum at góðkenna útbúgvingarnar hjá hvørjum øðrum, fyrst og fremst um umbýtisprogramm fyri lærarar og studentar og onnur undir útbúgving. Minsta uppihaldið í øðrum landi er tríggir mánaðir, og tað mesta eitt ár. Mannagongdin er tann, at ein hevur løn ella studning við sær frá heimlandinum og fær nakað av stuðuli fra ES afturat fyri eykaútreiðslur, uml. kr. 10.000 fyri hvørja lestrarhálvu.

Karmurin um uppihald í øðrum londum eru fleiri programm t.d. ERASMUS (hægri útbúgving) og LINGUA (undirvísing í fremmandum málum). Programmið TEMPUS er serliga ætlað teimum, sum vilja lesa eina tíð í einum eysturevropeiskum landi. Fleiri eru hildin uppat í 1994, meðan onnur ERASMUS OG LINGUA eru umskipað í høvuðsprogrammið SOCRATES, sum er programm fyri skúla og hægri útbúgving - eisini almenna útbúgving - frá 1. flokki til hægri lærustovn.

**SOCRATES**

SOCRATES hevur trý høvuðsendamál, at menna ta evropeisku dimensjónina í allari útbúgving, økja mobilitetin hjá studentum og fremja samstarv millum útbúgvingarstovnar.

**LEONARDO DA VINCI**

Eitt annað programm er LEONARDO DA VINCI, sum serliga er fyri tekniskar og vinnuligar útbúgvingar, t.d. við at fara í praktikk í einum øðrum landi. Endamálið við LEONARDO DA VINCI er at fremja dygd í vinnulívsútbúgvingunum í limalondunum, at fremja nýskapan í vinnulívsútbúgvingunum og tað at fremja ta evropeisku dimensjónina í øllum vinnulívsútbúgvingum. SOCRATES og LEONARDO DA VINCI galda fyri tíðina 1. januar 1995 til 31. desember 1999.

**EBS-londini og útbúgving í ES**

Londini í EBS-starvinum kunnu taka lut í útbúgvingarprogrammunum hjá ES. Í summum førum er tó talan um hægri lestraravgjøld. Eitt nú gjalda norskir studentar, sum lesa í Stóra Bretlandi, nógv størri lestraravgjøld enn studentar frá øðrum ES-londum. Íslendingar gjalda umleið helvtina av tí lestrargjaldi, sum studentar úr triðjalondum gjalda.

Føroyar eru ikki limir í ES og hava heldur ikki aðra avtalu um útbúgvingar sum t.d. EBS-londini. Føroyingar, sum lesa ella útbúgva seg í Føroyum á Fróðskaparsetrinum ella øðrum skúlum, kunnu tí ikki koma undir programm sum SOCRATES og LEONARDO DA VINCI, umframt at føroyingar skulu gjalda lestrargjald sum triðjaland, t.v.s. ógvuliga høg gjøld. Hetta er t.d. galdandi fyri føroyingar, sum fara beinleiðis úr Føroyum til Bretland at lesa. Flestu føroyingar fáa hinvegin hægri útbúgving í Danmark. Fyrst búsettir í Danmark eru teir at rokna sum danir og fáa tí somu møguleikar sum danir ella sum aðrir ES-borgarar at fáa nyttu av programmum sum SOCRATES og LEONARDO DA VINCI.

## 12.3 Gransking

**Endamál við granskingini**

Endamálið við granskingar- og menningarsamstarvinum í ES er at fremja menningina av evropeiskum vinnulívi og ídnaði, at gera sítt til at loysa teir felags umhvørvisspurningarnar, verða til reiðar at møta sosialum og heilsuligum (medisinskum) avbjóðingum og økja um umskifti av kunnleika og mobiliteti av granskarum millum limalondini. Granskingin er eisini mett at hava týdning fyri at skapa nýggj arbeiðspláss og at bøta um kappingarførið hjá evropeiska vinnulívinum. Serligur dentur verður lagdur á at styrkja

teknologiska grundarlagið hjá smáum og meðalstórum fyritøkum, tí hesar geva yvirhøvur nógv arbeiði.

Granskingarsamarbeiðið og játtanin úr felags ES-pottinum er skift sundur í fýra virkisøki:

1. granskingarprogramm (86,88%)
2. millumtjóða samstarv - mest við triðjalond (4,39%)
3. spjaðing og gagnnýtsla av úrslitum (2,68%)
4. granskaraumbýti og mobilitetur (6,05%)

**Mest nasjónal gransking**

Tað mesta av granskingini í ES er nasjónal gransking. Tað, sum ES letur úr felagskassanum til gransking og menning, er samanlagt ikki meira enn 4 % av tí, sum tey einstøku londini samanlagt lata til gransking heima hjá sær sjálvum. Tann nasjónala granskingin og menningin er sostatt heili 96% av allari gransking í ES.

**Netverk**

Granskingin í ES-høpi er miðstýrd. Hetta eru rammuprogrammini, ið verða nevnd niðanfyri dømi um. Men talan er eisini um "netverks"-prosjekt, har granskarar og granskingarstovnar í fleiri ymiskum evropeiskum londum taka seg saman um eitt ella fleiri granskingarprosjekt. Í hesum føri fíggjar ES ikki sjálva granskingina, men letur stuðul til tær eykaútreiðslur, sum standast av "netverkinum".

**Rammuprogrammini**

Tann gransking, sum ES letur mest stuðul til, er skipað í ávís miðstýrd "rammuprogramm". Tað programmið, sum nú er í gongd, heldur áfram til 1998. Peningurin, sum er játtaður til hetta, er 12,3 mia. ECU. Harumframt er ein eykajáttan uppá 700 ECU.

Við næstan 90 % av samlaðu granskingarjáttanini hjá ES eru granskingarprogrammini av størsta týdningi. Tey einstøku rammuprogrammini eru hesi (partur av játtan í klombrum):

Telematikkur (6,85%)
Kommunikasjónstøkni (5,12%)
Informasjónstøkni (15,71%)
Framleiðslu- og tilfarstøkni (13,88%)
Máting og royndir (2,34 %)
Umhvørvisvernd (6,93%)
Havgransking og-tøkni (1,85%)
Biotøkni (4,49%)
Biomedisin og heilsa (2,73%)
Landbúnaður, agroídnaður og fiskivinna (5,56%)
Ikki-nuklear orka (8,15%)
Trygd við nuklearari fusjón (3,37%)

Kontrollerað termonuklear fusjón (6,83%)
Flutningspolitikkur (1,95%)
Samfelagsvísindi (1,12%)

Tað er vert at leggja til merkis, at bert 1,12 % er latið til samfelagsvísindi, meðan hugvísindi als ikki er nevnd. Hugvísindalig gransking verður fyrst og fremst roknað sum ein nasjónal uppgáva. Kortini eru tað lond, t.d. Norðurlondini í ES, sum royna at arbeiða fyri at styrkja samfelagsvísindaliga og hugvísindaliga gransking í ES-høpi.

Luttøka í prosjektunum er skipað soleiðis, at ES letur upp til 100 % av teimum *eykakostnaðunum*, sum eitt prosjekt førir við sær fyri universitet og hægri lærustovnar og annars upp til 50 % av samlaðu útreiðslunum. Hini 50 % av samlaðu útreiðslunum, sum eftir eru, mugu útvegast á annan hátt, t.d. frá egnum stovni ella virki.

Granskingarøki, sum serligur dentur verður lagdur á, eru t.d. samskiftistøkni, orkugransking, umhvørvisvernd, og fyri okkum eru kanska serliga havfrøðilig og sjófrøðilig vísindi av áhuga.

**Hvørji lond kunnu søkja granskingarpening úr ES?**
Tað eru fyrst og fremst limalondini í ES, sum kunnu søkja granskingarpening úr ES. Hinvegin ber tað til hjá øðrum londum at koma uppí part uttan kortini at fáa ávirkan á, hvussu prosjektini verða skipað. Taka vit t.d. Noreg sum dømi, so fevndi fríhandilsavtalan, sum Noreg hevði áðrenn EBS-avtaluna, ikki um gransking, men Noreg luttók kortini í rammuprogrammunum hjá ES móti gjaldi við eini assosieringsskipan. Við EBS-avtaluni kann Noreg taka lut í øllum programmunum, men skal samstundis eisini gjalda samsvarandi til ES. EBS-sáttmálin gevur ikki Noreg atkvøðurætt, tá rammuprogrammini skulu fyrireikast, men Noreg verður kortini hoyrt í hesum sambandi.

**Assosierings-skipan**

Tikið samanum, so kunnu onnur lond koma uppí granskingar- og útbúgvingarsamstarvið hjá ES, um sáttmáli verður gjørdur um hetta, men tey hava onga ávirkan á, hvussu granskingin frá byrjan verður fyriskipað.

**Luttøka í einstøkum prosjektum**
Triðjalond kunnu koma uppí við *project by project participation.* Her er m.a. talan um fyrrverandi kommunistisk lond og lond, sum eru sprottin úr gamla Sovjetsamveldinum, umframt Kypros, Malta, Sveis og Turkaland. Her verður gjørd avtala um luttøku í tí einstaka

prosjektinum, og londini skulu sjálvi gjalda fyri tað, sum tað kostar teimum.

Lond, sum eru uttanfyri Evropa, kunnu eisini partvíst taka lut í granskingarprogrammunum. Menningarlond kunnu fáa ávísan stuðul í hesum sambandi, ein stuðul sum vanliga er meira, enn tey sjálvi lata.

**Hvør kann fáa lut í rammuprosjektunum?**
Bæði granskingarstovnar og vinnulív kunnu søkja pening. Talan er um einstaklingar, ídnaðarfyritøkur, stórar sum smáar, universitet og aðrar hægri lærustovnar, granskingarstovnar og felags-granskingarstovnar í ES.

Prosjektini skulu í minsta lagi fevna um luttakarar frá tveimum ymiskum limalondum ella í minsta lagi frá einum limalandi og einum asssosieraðum landi.

Mannagongdin er í stuttum tann, at minst tveir partar frá minst tveimum ymiskum londum mugu finna saman og gera eitt uppskot til prosjekt, ið verður lagt fyri programmkommiteina og fær eina fakliga meting, áðrenn endalig støða verður tikin. Fær eitt prosjekt stuðul, fær tann, sum stendur fyri samskipanini av prosjektinum, pening útgoldnan eftir eini ávísari mannagongd. Hesin hevur so tær fyrisitingarligu uppgávurnar í sambandi við prosjektið, men áðrenn verður ein sáttmáli undirskrivaður av øllum pørtunum í prosjektinum. Sáttmálarnir skulu haldast.

Sum er, er einki til hindurs fyri, at føroyskir granskarar og granskingarstovnar kunnu taka lut í granskingaruppgávum sum undirkontrahentar. Tað eru vit í nøkrum førum longu nú.

Til hvørt rammuprosjekt er ein informasjónspakki við upplýsingum um prosjektið, umsóknarskjølum og vegleiðing í sambandi við, hvussu mannagongdin er, tá søkt verður. Vanliga umsóknarfreistin er 15. mars á hvørjum ári.

**Hvat er gagnligast?**
Uttan at verða fest á blað nakrastaðni, so eru Føroyar í ES-høpi mettar sum *triðjaland* og kunnu luttaka í rammuprosjektum fyri egna rokning. Tað, sum fæst afturfyri, er partur í tí kunnleika og vitan, sum tað ávísa prosjektið førir við sær, umframt at luttakandi fólkini

fáa økt innlit, granskingarligar royndir og førleika. Vit høvdu helst eisini kunnað fingið eina assosieringsskipan um luttøku í einstøkum programmum longu nú. Men fyri hetta mugu vit gjalda eitt gjald, ið verður roknað út í mun til bruttotjóðarúrtøkuna og tað, sum rammuprosjektið kostar. Talið 1,5- 2 mió kr. árliga hevur verið nevnt.

Bera vit saman við Noreg, so vilja Føroyar við eini EBS-líknandi avtalu kunna taka lut í kappingini um at fáa lut í øllum rammuprosjektinum móti at lata eitt ávíst tilmeldingargjald. Noreg skal t.d. gjalda 1,6 % av tí, sum rammuprogrammini kosta.

## 12.4 Niðurstøða

Føroyar hava onga avtalu um útbúgvingar- ella granskingarsamstarv við ES. Hinvegin verður ein føroyingur dani í teirri løtu, hann er skrásettur í einum donskum fólkayvirliti og kann tá gagnnýta somu møguleikar sum danir í ES. Tað eru sostatt formligar forðingar fyri, at føroyingar búgvandi í Føroyum fáa somu møguleikar sum teir, ið fluttir eru. At fara til Danmarkar er ein smoga.

Formliga eru føroyskar útbúgvingar góðkendar av donskum myndugleikum við sama virði sum danskar, t.d. ber tað til at konvertera føroysk sveinaprógv til donsk sveinaprógv. Hetta er kortini ikki nóg mikið, tí føroyingar í Føroyum hava ongan sjálvsagdan rætt at arbeiða í ES, ein rætt sum EBS-londini hava vunnið sær í sínum sáttmála.

Føroyingar, sum eru undir útbúgving í Føroyum, fáa ikki lut í teimum ES-stuðulsmøguleikum sum teir føroyingar, ið eru undir útbúgving í Danmark. Teir, sum t.d. fara beinleiðis úr Føroyum til Bretlands at lesa, mugu gjalda somu lestraravgjøld sum triðjalond og kunnu heldur ikki gagnnýta teir stuðulsmøguleikar, sum eru í ES. Heldur ikki hava føroyskir lærarar og granskarar somu mobilitetsmøguleikar.

Ein annar spurningur er, hvussu vit kunnu fáa nyttu burtur úr einum øktum granskingarsamstarvi við ES. Formliga er einki til hindurs fyri, at vit longu nú samstarva í einstøkum prosjektum *project by project*, um vit vilja gjalda fyri okkum sjálvi. Vit kunnu eisini assosierast til einstøk rammuprosjekt, um vit vilja gjalda okkara part av rammuprosjektinum. Ein EBS-líknandi avtala gevur á leið somu møguleikar sum limaskapur á hesum øki.

Spurningurin er sjálvandi, um tað, sum støðan er í løtuni, er rættasti hátturin at nýta granskingarpening, heldur enn fyrst at menna okkara nasjónalu gransking. Tí tað er greitt, at spurningurin er ikki bert um, hvat vit kunnu fáa burturúr, men um vit duga at koma okkum uppí saman við øðrum. Uttan mun til hvat vit velja, er neyðugt at menna nasjónala føroyska gransking, so vit fáa eitt haldgott fakligt og fíggjarligt støði at byggja á.

## Heimildir

### Bókmentir

*Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya*. Tórshavn 1994

Churchill R.R. 1987: *EEC Fisheries Law*. Matinus Nijhoff Publishers, Dordrecht.

Robin R. Churchill: The EEC's Fisheries Management System and its Implications for Norway in the event of Norwegian Membership of the EEC. Fyrilestur hildin á ráðstevnu um *Norge, EF og fiskeriene* í Tromsø 16. mars 1989.

Robin R. Churchill: Quota hopping: the common fisheries policy wrong footed? *Common Market Law Review* Vol.27.1990.

Robin Churchill og Peter Ørebech: The European Economic Area and Fisheries. *The International Journal of Marine and Coastal Law*, Vol 8, No 4, 1993.

Robin R. Churchill: *The Duration of the Norwegian Quota Arrangements in The Act of Accession*. An Opinion Prepared By Robin Churchill, Cardiff Law School, UK. September 1994.

EF-arbeiðsbólkurin: *Føroyar og EF*. Útlit fyri samvinnu. Frágreiðing latin Føroya Landsstýri 14.juni 1991.

European Commission: Information Packages: Science, Research, Developement: Practical Information and Programmes 1994-1998.

De Europæiske Fællesskabers Tidende (stytt EFT)

*Frágreiðing um bygnaðartrupulleikar í føroyska búskapinum*. Endurreisingarnevnd Landsstýrisins. Tórshavn 25.januar 1994.

John Goodlad : *Fisheries Management by Sectoral Quotas - an Assessment of the UK System*. Paper presented at IV EAFE Conference, Italia april 1992.

John Goodlad: Sea fisheries management: the Shetland position. *Marine Policy*, September 1993.

Claus Gulmann & Karsten H. Sørensen: *EF-ret*. Jurist- og Økonomforbundets Forlag, København 1993.

Karsten Hagel-Sørensen & Laurids Mikaelsen: *EU-Karnov*. Supplement 1994. Karnovs Forlag, København

Nis Graulund Hansen og Jens Frank: EF's Økonomiske-Monetære Union og den økonomiske politik. I Kai Lemberg (red.): *Unionen og Danmark* - demokrati, økonomi og miljø. Akademisk forlag 1992.

Alf H. Hoel: Kvotehopping. Mellom nasjonale interesser og felles politikk. Kapittel 4 í Petter Holm (red.): *Et market for fisk?* Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring. Kystnæringen. Forlag og informasjonskontor AS. Oslo 1993.

Jesper Jespersen: Den europæiske Centralbank - muligheder og begrænsninger. I Kai Lemberg (red.): *Unionen og Danmark* - demokrati, økonomi og miljø. Akademisk forlag 1992.

Søren Kjeldsen-Kragh: *Danmark i Unionen*. Forlaget Fremad, København 1992.

Micheal Leigh: *European Integration and the Common Fisheries Policy*. Croom Helm, London 1983.

Lene Madvig Madsen: Kunning um gransking og útbúgving á fundi í Nóatúni 3.februar 1995.

Jørgen Molde o.a.: *EU-Karnov*. 4.udgave 1993, Karnovs Forlag, København.

Nei til EU: *Norge og EU. Virkninger av medlemskap i Den europeiske union*. Nei til EU 1994.

Jesper Raakjær Nielsen: Fiskernes deltagelse i og indflydelse på udformingen av fiskerireguleringer i Danmark. I *Fiskerireguleringer* - rapport fra Nordisk Kontaktutvalg for fiskerispørsmåls seminar om fiskeriorganisationernes deltagelse i fiskeriforvaltningens beslutningsprosesser, Visby 6.mai 1991. Nordisk Seminar- og Arbejdsrapporter 1991:516, pp.107-133.

NSA 1993:543: *EF's fælles fiskeripolitik, 1992-Revisionen* - revisionen af EF's fiskeripolitik og perspektiverne frem mod år 2002. Nordisk Seminar- og Arbejdsrapporter 1993:543.

Olesen, Chr.: "Hvordan fastsættes mindstepriserne". I *Producentorganisationer og Salgslag* - rapport fra Nordisk Seminar om Førstehåndsomsetning av fisk, Göteborg 18.og 19.mars 1992. Nordiske Seminar- og Arbejdsrapporter 1992:523, pp.41-64.

Rapport 1991 fra Kommissionen til Rådet og Parlamentet om den fælles fiskeripolitik. Kommissionen for De Europæiske Fællesskaber 1991.

Rådets Forordning (EØF) 3759/92 af 17.december 1992 om den fælles markedsordning for fiskerivarer og akvakulturprodukter. EFT nr.L 388/1-36 af 31.12.92.

Rådets Forordning (EØF) 3760/92 af 20.december 1992 om en fællesskabsordning for fiskeri og akvakultur. EFT nr. L 389/1-14 af 31.12.92.

Schina, D. : *State Aids under the EEC Treaty Articles 92-94*. ESC Publishing Ltd. Oxford, 1992.

Sekkelund, E. : "Hvordan oprettes en producentorganisation". I *Producentorganisationer og Salgslag* - rapport fra Nordisk Seminar om Førstehåndsomsetning av fisk, Göteborg 18.og 19.mars 1992. Nordiske Seminar- og Arbejdsrapporter 1992:523, pp.21-40.

Stortingsmelding nr.40. (1993-1994): *Om medlemsskap i Den europeiske union*. Utenriksdepartementet, Oslo.

St.prp.nr.100 (1991-92) *Om samtykke til ratifikasjon av Avtale om Det europeiske økonomiske samarbeidsområde (EØS)*, undertegnet i Oporto 2.mai 1992. Utenriksdepartementet, Oslo.

Særskilt vedlegg til St.prp.nr.100 (1991-92): *Avtale om Det europeiske økonomiske samarbeidsområde*. Utenriksdepartementet, Oslo. (EBS-avtalan)

Særskilt vedlegg nr.1 til St.meld. nr.40 (1993-1994): *Traktat om Kongeriket Norges, Republikken Østerrikes, Republikken Finlands og Kongeriket Sveriges tiltredelse til Den europeiske union*. Utenriksdepartementet, Oslo.

Sørensen, H. : "Hvad arbejder Produsentorganisationerne i Danmark med". I *Producentorganisationer og Salgslag* - rapport fra Nordisk Seminar om Førstehåndsomsetning av fisk, Göteborg 18.og 19.mars 1992. Nordiske Seminar- og Arbejdsrapporter 1992:523, pp.65-75.

Jens Helgi Toftum: *EF og Færøyene*. Forvaltning av fiskeressurser og utveksling av kvoter 1977-1989. Serritgerð. Norges Fiskerihøgskole/ Universitetet i Tromsø, 1990.

Udvalget vedr. kapitalmarkeds- og likviditetsforhold på Færøerne: *Færøske kapitalmarkeds- og likviditetsforhold*. Rapport fra et færøsk-dansk udvalg. Juli 1994.

Wise, M.: *Common Fisheries Policy of the European Community*. Methuen. London 1984.

**Samrøður o.a.**

*Hege Nygård*, løgfrøðiligur ráðgevi undir norsku ES-samráðingunum. Norska fiskimálaráðið.

*Ulf Eriksen*, løgfrøðiligur ráðgevi í ES/EBS-málum og marknaðarviðurskiftum í norska fiskimálaráðnum.

*Stein Owe*, ekspedisjónsstjóri í veiðudeildini í norska fiskimálaráðnum.

*Dag Erling Stai*, ráðgevi í ES/EBS-málum og fiskiveiðumálum í norska fiskimálaráðnum.

*Erik Rolfsen*, EBS/ES-ráðgevi í FNL/NHL (vinnupolitiskur arbeiðsgevarafelagsskapur).

*Erik Rakoczy*, umsitingarstjóri og ES-serfrøðingur í Norges Råfisklag.

*Petter Holm*, ES-granskari á Fiskivinnuháskúlanum í Tromsø.

*Torbjørn Trondsen*, marknaðargranskari á Fiskivinnuháskúlanum í Tromsø.

*Peter Ørebeck*, løgfrøðingur og ES-granskari á Fiskivinnuháskúlanum í Tromsø.

*Jostein Angel*, fiskivinnuráðgevi hjá Landsdelsutvalget for Nord-Norge og norskur ráðgevi undir limaskapssamráðingunum.

Hendan frágreiðing er eitt úrslit av arbeiðinum hjá nevndini, landsstýrið setti at kanna *...møguleikarnar fyri gagnligastu marknaðaratgongd til ES...* og *.... øll viðurskifti ES-Føroyar, sum hava týdning fyri støðutakan politikaranna til framtíðarsamvinnu partanna millum.*

At ynskja sær gagnligastu marknaðaratgongd til ES, uttan at hetta ber í sær grundleggjandi broytingar í viðurskiftum okkara við ES, minnir ikki sørt um at ynskja meira undanvind á súkklubreytunum.

Ein frí marknaðaratgongd, har ongar toll- ella tekniskar forðingar eru, er neyðug fyri kappingarføri okkara á ES-marknaðinum. Men skal gagnligasta marknaðaratgongd fáast, er neyðugt við øðrum samstarvsháttí, sum er víðfevndari enn galdandi handilsavtala. Hetta ber í sær, at fyri vunnin rættindi eru vit sinnað at lata rættindi og átaka okkum skyldur.

Hjá einum samfelag, har meginparturin av framleiðsluni verður útfluttur, er umráðandi, at samvinnan fevnir um annað enn marknaðarsømdir. Kappingarføri snýr seg eisini um, hvussu vit eru við í øðrum altjóða samstarvi, eitt nú um arbeiðsmarknað, tænastur, samskifti, heilsufrøðilig viðurskifti, gransking og útbúgving.

ISBN 99918-3-006-5